# AÐALFUNDUR
# 2020

ÍTRÓTTASAMBAND FØROYA

AÐALFUNDUR

# Ársfrágreiðing 2019-2020

**Tú alfagra land mítt,**
mín dýrasta ogn!
á vetri so randhvítt,
á sumri við logn,
tú tekur meg at tær
so tætt í tín favn.
Tit oyggjar so mætar,
Gud signi tað navn,
sum menn tykkum góvu,
tá teir tykkum sóu.
Ja, Gud signi Føroyar, mítt land!

Hin roðin, sum skínur
á sumri í líð,
hin ódnin, sum týnir
mangt lív vetrartíð,
og myrkrið, sum fjalir
mær bjartasta mál,
og ljósið, sum spælir
mær sigur í sál:
alt streingir, ið tóna,
sum vága og vóna,
at eg verji Føroyar, mítt land.

Eg nígi tí niður
í bøn til tín, Gud:
Hin heilagi friður
mær falli í lut!
Lat sál mína tváa
sær í tíni dýrd!
So torir hon vága
– av Gudi væl skírd –
at bera tað merki,
sum eyðkennir verkið,
ið varðveitir Føroyar, mítt land!

# STARVSNEVND

**Elin Heðinsdóttir Joensen**
*Forseti*

**Jon Hestoy**
*Varaforseti*

**Schandorff Vang**
*Nevndarlimur*

**John Kjær**
*Nevndarlimur*

**Sigurd Rasmussen**
*Nevndarlimur*

# STARVSFÓLK

**Petur Mittún**
*Aðalskrivari*

**Andras Nolsøe**
*Ítrótta- og ungdómsráðgevi*

**Finnbjørg Nattestad**
*Skrivstovufólk*

# UMBOÐSTING

**Elin Heðinsdóttir Joensen**
*Forseti*

**Jon Hestoy**
*Varaforseti*

**Schandorff Vang**
*Nevndarlimur*

**John Kjær**
*Nevndarlimur*

**Sigurd Rasmussen**
*Nevndarlimur*

**Erik E. Thomsen**
*Badmintonsamband Føroya*

**Oddmar Nielsen**
*Bogaskjótisamband Føroya*

**Elinborg C. Mortensen**
*Borðtennissamband Føroya*

**Gunn R. Hermansen**
*Fimleikasamband Føroya*

**Magnus Tausen**
*Flogbóltssamband Føroya*

**Christian F. Andreasen**
*Fótbóltssamband Føroya*

**Sølvi Reinert Hansen**
*Frælsur Ítróttur Føroya*

**Gunn Ellefsen**
*Hondbóltssamband Føroya*

**Sofus Johannesen**
*Judo Føroyar*



**Jógvan „Egga" Jensen**
*Parasport Føroyar*

**Brandur í Dali**
*Ríðisamband Føroya*

**Annika V. Dalsgarð**
*Róðrarsamband Føroya*

**Esmar Joensen**
*Skjótisamband Føroya*

**Arnfinnur Helmsdal**
*Sersambandið fyri Súkkling og Triathlon*

**Rókur í Jákupsstovu**
*Svimjisamband Føroya*

**Ingi Samuelsen**
*Umboð fyri Menningarsambond*

# SERSAMBONDINI

## Badmintonsamband Føroya
Erik Engelbrecht Thomsen, formaður
Herborg á Múruni, næstforkvinna
Mariann Øster, kassameistari/skrivari
Elian Eyðunsson Elttør
Katrin Jacobsen
Johnny í Grótinum
Birgit Ryan, tiltakslimur

## Bogaskjótisamband Føroya
Oddmar Nielsen, formaður
Jógvan Magnus „Eggaba" Andreasen, varaformaður
Jastrid M. Jensen, skrivari
Jógvan Niclasen

## Borðtennissamband Føroya
Elinborg C. Mortensen, forkvinna
Sjúrður Olafsson, næstformaður/skrivari
Randi Nolsøe, peningarøkil

## Flogbóltssamband Føroya
Magnus Tausen, formaður
Jónley Poulsen, næstforkvinna
Rúna Hentze, skrivari
Niclas Joensen, peningarøkil
Christian Nagata
Winnie Simonsen

## Fótbóltssamband Føroya
Christian F. Andreasen, forseti
Róin Schrøter, varaforseti
Anja Rein
Fríðin Ziskason
Fróði Danielsen
Jákup Martin Joensen
Jógvan Páll Joensen
Kristmund Johannessen
Oddmar Selfoss, 1. varalimur
Jákup A. Olsen, 2. varalimur

## Frælsur Ítróttur Føroya
Sølvi Reinert Hansen, formaður
Rigmor Napoleonsdóttir Arge, næstforkvinna
Guttorm Sørensen, peningarøkil
Gunnvá Wardum
Sigga Jacobsen

## Føroya Fimleikasamband
Gunn Reginsdóttir Hermansen, forkvinna
Olivia Due Christiansen, kassameistari
Jóna Hvannastein, nevndarlimur
Tinna Johannesen, samskipari estetiskt
Anna Margit D. Thomsen, samskipari amboð
Ásvør Lognberg, samskipari breidd
Eydna Eyvindardóttir Danielsen, samskipari amboð (barsil)
Miriam Solmunde, skrivstovufólk

## Hondbóltssamband Føroya
Gunn Ellefsen, forkvinna
Jógvan Emil Nielsen, næstformaður
Oyvindur Brimnes
Djóni Højgaard
Annfinn Brekkstein
Birgir Kass, tiltakslimur

## Judo Føroyar
Sofus Debes Johannesen, formaður
Hansa M. Glerfoss, næstforkvinna
Petur Sigurð Johannesen, skrivari
Marit J. Magnussen
Sigmundur Johansen

## Parasport Føroyar
Jógvan „Egga" Jensen, formaður
Petur Elias Petersen, næstformaður
Tóra Norðgerð, skrivari
Uni Rasmussen
Anna Gaardlykke
Hans Karl Højgaard, eykalimur
Sonja R. Norðgerð, eykalimur

## Ríðisamband Føroya
Brandur í Dali, formaður
Zacharias R. Jacobsen, næstformaður
Símun Skaalum

## Róðrarsamband Føroya
Annika Vilhelmsen Dalsgarð, forkvinna
Elsa Magnussen, næstforkvinna
Irena Nolsøe, skrivari
Hallgrím Hansen, kappingarleiðari
Rúni Joensen

## Sersambandið fyri Súkkling og Triathlon
Arnfinnur Helmsdal, formaður
Gunnar Dahl-Olsen, næstformaður
Helgi Winther Olsen

## Skjótisamband Føroya
Esmar Joensen, formaður
Marius F. Joensen
Jógvan Egholm
Finn Ludvig
Jónstein Johannesen

## Svimjisamband Føroya
Rókur í Jákupsstovu, formaður
Símun Michael Sørensen, næstformaður
Ólavur Hansen, skrivari
Eyðun Húsgarð,
Sørin Djurhuus
Dann Hjelm, tiltakslimur

# MENNINGARSAMBONDINI

### BILLARDSAMBAND FØROYA
Urbanus Knud Olsen, formaður

### BOKSISAMBAND FØROYA
Martin Meng Wojciechowski, formaður

### DARTSAMBAND FØROYA
Hans Eivind Olsen, formaður

### GOLFSAMBAND FØROYA
Ingi Samuelsen, formaður

### FØROYA FROSKMANNASAMBAND
Bogi Krossteig

### KURVABÓLTSAMBAND FØROYA
John Norðbúð Thomsen, formaður

### SEYÐAHUNDASAMBAND FØROYA
Eyðstein Jensen, formaður

### STYRKISAMBAND FØROYA
Heini Hátún, formaður

### TAEKWONDOSAMBAND FØROYA
Noomi Kunoy Heradóttir, forkvinna

### TENNISSAMBAND FØROYA
Stefan í Skorini, formaður

# NEVNDARYVIRLIT

### OLYMPISKA NEVND FØROYA
Elin H. Joensen, forseti
Jon Hestoy, varaforseti
Schandorff Vang, nevndarlimur
John Kjær, nevndarlimur
Sigurd Rasmussen, nevndarlimur

### FÍGGJARNEVNDIN
Elin H. Joensen, forkvinna
Jon Hestoy, nevndarlimur
Jørmann Petersen, nevndarlimur

### UNGDÓMS- OG MENNINGARNEVNDIN
Schandorff Vang, formaður
John Petersen, nevndarlimur
Andras Nolsøe, nevndarlimur

### SPF. ÍTRÓTTAVEDDING
Jon Hestoy, formaður
Sigmund Poulsen, varaformaður
Rói Poulsen, nevndarlimur
Gudrun Mortansdóttir Nolsøe, nevndarlimur
Schandorff Vang, nevndarlimur
John Kjær, nevndarlimur
Sigurd Rasmussen, nevndarlimur
Elin H. Joensen, stjóri

### ÍTRÓTTADÓMSTÓLUR
Anna Rein, forkvinna
Eyðhild Skaalum, næstforkvinna
Børge B. Hansen, nevndarlimur
Jóhan Lamhauge, nevndarlimur
Magnus Dam, nevndarlimur
Jóhan E. Simonsen, varalimur
Andrass Thomsen, varalimur
Anja Kristina Øster, varalimur

### DOPINGNEVNDIN
Jónfinn Thomsen, formaður
Jóhanna Arge, nevndarlimur
Pál Weihe, nevndarlimur
Majbritt Lamhauge, varalimur

### ANTIDOPINGNEVNDIN
Jarvin Feilberg Hansen, formaður
Katrin Rubek Nielsen, nevndarlimur
Sofus Debes Johannesen, nevndarlimur

### ÍTRÓTTAGRUNNUR FØROYA
Niels T. Nattestad, formaður
Álvur Hansen, skrivari
Petur Ove Petersen, nevndarlimur
Annika H. Lindenskov, nevndarlimur
Kristian Johansen, nevndarlimur

### FØROYA ÍTRÓTTASAVN
Johannes Joensen, formaður
Palli Ziskason, kassameistari
Andrass Sólstein, skrivari
Petur Ove Petersen, nevndarlimur
Katrin Holm, nevndarlimur

### ÚRVAL
Ragnar Joensen, formaður
Jóhanna á Bergi, nevndarlimur
Katrin Olsen, nevndarlimur
Svanna Hanusardóttir Jensen, nevndarlimur
Páll Isholm, nevndarlimur
Petur Mittún, skrivari

### HEIÐURSSKJAL POUL E. PETERSEN
Anna Rein
Óli Holm
Heðin Mortensen
Marjun Kalsø
Signar á Brúnni

# Korona órógvaði fjølbroytta føroyska ítróttalívið

## Ítróttaárið 2019-20 byrjaði sum vanligt við ágrýtni og hugagóðum ítróttafólkum, men endaði brádliga í flestu førum uttan FM-meistarar orsakað av korona-kreppuni. Ítrótturin er tíbetur komin varliga í gongd aftur, og nógvar spennandi avbjóðingar liggja fyri framman bæði heima og altjóða

Tað stóð knappliga sólarklárt fyri okkum, hvussu stóran týdning ítróttur í roynd og veru hevur fyri trivnaðin og fólkaheilsuna, tá korona rakti alt føroyska samfelagið. Fjølbroytta og frælsa ítróttalívið var tikið frá okkum.

Ítróttaárið 2019-20 fer í søguna sum eitt serligt ár við ongum føroyameistarum í flestu ítróttagreinum. Korona rakti ítróttin eins og alt annað í okkara gerandisdegi, og tá samfelagið fór nógv niður í ferð ella at kalla læt aftur 13. mars, noyddist ítrótturin eisini at lata aftur.

Korona rakti mitt inn í okkara fjølbroytta ítróttalív við spennandi avbjóðingum bæði úti og heima. 6. mars, eina viku áðrenn løgmaður setti ferðina niður, heitti Ítróttasamband Føroya á øll sambondini innan ítróttin, øll ítróttafeløg og øll ítróttafólk um at taka tær fyrstu korona-tilráðingarnar frá Heilsumálaráðnum og Landslæknanum í størsta álvara.

ÍSF vildi gera greitt, at ítrótturin vildi vera við til at avmarka smittuvandan. Beinanvegin var tó nógv orðaskifti um, hvussu ymisku ítróttagreinarnar á skilabesta hátt vórðu skipaðar í samsvari við almennu korona-tilráðingarnar. Men tað gekk bert ein vika, so læt samfelagið aftur.

Hósdagin 12. mars heitti ÍSF á feløg og sambond innan ÍSF um fyribils at steðga øllum ítróttavirksemi í tvær vikur, eftir at korona-tiltøkini vórðu herd. Áheitanin fevndi um venjingar, dystir, kappingar og annars øll tiltøk í føroyska ítróttaheiminum – bæði innandura og uttandura – í øllum deildum og aldursbólkum.

ÍSF staðfesti, at øll hava møguleika at taka ábyrgd, tí hvør einstakur kann gera sítt til at minka smittuvandan. Heitt var staðiliga á føroyska ítróttaheimin um at taka støðuna í størsta álvara og at vísa samfelagssinni. So leingi almennu myndugleikarnir mæltu fólki frá at savnast, so leingi stóð steðgurin í føroyska ítróttaheiminum við.

8. apríl segði ÍSF í almennari fráboðan, at ítróttasambandið tók undir við ætlanunum hjá landsmyndugleikunum at lata samfelagið varliga upp aftur 20. apríl, og at dystir spakuliga kundu fara í gongd aftur 9. mai.

Samanumtikið hevur gingist væl hjá ítróttinum at halda almennu tilráðingarnar, og nú snýr tað seg um, at ítróttavirksemið kann halda fram á skilabesta hátt. Tó so ítrótturin hevur eisini havt sítt at dragast við í korona-støðuni, og ítróttafelag hava sanniliga eisini merkt ein fíggjarligan svíða av korona-kreppuni.

## Vantandi samskifti

Tá almennu myndugleikarnir fyri páskir boðaðu frá, at ítróttakappingar kundu byrja aftur 9. mai undir skipaðum viðurskiftum og uttan áskoðarar, vóru hetta sjálvsagt gleðilig boð fyri ÍSF, men hesi boð komu óvart á. Almennu myndugleikarnir høvdu als ikki samskift við ÍSF, sum varar av øllum ítrótti í Føroyum, áðrenn fráboðanin varð send út.

Fráboðanin frá almennu myndugleikunum ørkymlaði í føroyska ítróttaheiminum, og spurningar, sum hvat ber til, og hvat ikki ber til, vóru áhaldandi settir dagarnar aftaná. Hetta vóru spurningar, sum vit í ÍSF ikki høvdu møguleika at svara, tí vit vóru ikki tikin við í tilgongdina.

ÍSF gjørdi í skrivi til løgmann og landsstýrismenninir í heilsumálum og mentamálum vart við trupulleikan. ÍSF heitti samstundis á almennu myndugleikarnar um at taka ÍSF við upp á ráð frameftir, tá ið broytingar verða gjørdar, hvussu ítrótturin skal fyriskipast.

Landsstýrið hevur síðani tikið hetta til eftirtektar, og vit eru fegin um, at hetta samskiftið er komið í rættlag aftur.

## Fíggjarligur smeitur

Í summar missa føroysku ítróttafeløgini 8-10 milliónir krónur orsakað av korona-kreppuni. Tað vísa tøl, sum ÍSF hevur savnað inn frá føroyskum ítróttafeløgum. Henda veruleika eiga politikarar at viðurkenna og bøta um beinanvegin við serstakari stuðulsskipan.

Í roynd og veru snýr tað seg um at bjarga ítróttinum undan einum hóttafalli, sum tekur langa tíð at byggja uppaftur. Føroyskur ítróttur er í løtuni í vanda fyri at verða kastaður eini 30-40 ár aftur í tíðina, um politikarar ikki taka støðuna í álvara.

Tað er ein stór hjálp, at løntir venjarar og leikarar hava rætt til pengar úr serligu covid19-skipanini hjá ALS, men tað munar alt ov lítið. Um politiski myndugleikin vil ítróttinum væl, so verður ein stuðulsskipan sett í verk, sum endurrindar mistar inntøkur og fastar útreiðslur hjá føroyskum ítróttafeløgum.

Fleiri lond hava gjørt serstakar hjálparpakkar til ítróttin. Eitt nú hava bæði Svøríki og Noreg veitt ítróttinum og frítíðarvirkseminum 100-tals milliónir krónur í stuðli. Ítróttafeløgini dúva longu ein stóran part av sínum virksemi upp á sjálvboðna arbeiðsmegi, og tað verður sera óhugaligt hjá hesum góðu kreftum at brúka komandi árini at savna pengar til at rinda skuld, sum korona-kreppan elvir til. Tað verður tyngri at fáa fólk í nevndir og til onnur sjálvboðin størv.

Tað er, sum nevnt, nú ítrótturin fyri stóran part hevur verið lagdur lamin, at vit síggja veruliga virðið, ítrótturin hevur fyri føroyska samfelagið, ikki minst fyri trivnaðin og fólkaheilsuna – serstakliga hjá børnum og ungum. Og vit eiga at fjálga um hetta fyri Føroyar so virðismikla tilfeingið, sum sjálvsagt skal vera í áhaldandi menning. Hetta týðandi samfelagsvirðið eigur ikki at standa framman fyri einum hóttafalli, tað eigur at vera greitt fyri øllum.

***Føroysku EYOF-luttakararnir til endahátíð á áskoðaraplássinum***

## ENGSO-aðalfundurin fluttur

Korona hevði við sær, at ENGSO, meginfelagið hjá ítróttasambondum og olympiskum samstarvsnevndum í Evropa, útsetti aðalfundin, sum ÍSF skuldi verða vertur fyri 5.-7. juni í ár. Avgerð er síðani tikin um, at aðalfundurin 2021 ístaðin verður hildin í Føroyum, og tað fegnast vit um. Aðalfundurin 2020 er fluttur til seinni í heyst.

Aðalfundurin 2021 verður 29. aðalfundurin hjá ENGSO, sum er røddin hjá evropiska ítróttinum – óheft av politiskum skipanum. ENGSO stuðlar og verjir ítróttin í Evropa, og felagsskapurin hevur stóran týdning fyri sjálvboðna ítróttavirksemið í okkara parti av heiminum.

Tað er ein stórur heiður fyri Føroyar at vera vertur fyri aðalfundinum hjá ENGSO 2021. Føroyar vóru eitt av stovnandi limalondunum, og vit gleða okkum at vera ein professionellur samstarvsfelagi, tá vit savna leiðarar innan evropiskan ítrótt í Føroyum í 2021. Vertskapurin er ein viðurkenning, sum Føroyar fáa frá altjóða ítróttaheiminum.

Ungdómssambandið hjá ENGSO hevur sín aðalfund samstundis, umframt at ítróttaseminar verða hildin í tilknýti til aðalfundin.

## Altjóða luttøka

Týdningurin av altjóða arbeiðinum sæst nú aftur. Evropiska Olympiska Nevndin staðfesti endaliga í fjør, at Føroyar sleppa at luttaka undir føroyskum flaggi í teimum kappingum, sum EOC skipar fyri, og har Føroyar hava altjóða limaskap.

Talan er um European Games og European Youth Olympic Festival. Haraftrat var ÍSF bjóðað við sum eygleiðari til Games of Small States of Europe.

European Games er fjórða hvørt ár við umleið 6.000 íðkarum. Føroysku ítróttagreinarnar, sum kundu taka lut í 2019 vóru bogaskjóting, badminton, judo og borðtennis.

European Youth Olympic Festival er annað hvørt ár fyri ungar íðkarar í aldrinum 14-18 ár. Talið av íðkarum

***Bárður av Steig Nielsen, løgmaður, fær handað gullnál og heiðursbræv***

er umleið 3.600. Føroysku ítróttagreinarnar, sum kunnu vera við, eru hondbóltur, judo, svimjing og flogbóltur. Tá leikirnir vóru í Baku í Aserbadjan í 2019, vóru seks føroyskir íðkarar við fyri fyrstu ferð – ein umboðandi judo og fimm umboðandi svimjing.

Games of Small States of Europe er annað hvørt ár millum lond við færri enn einari millión íbúgvum. Umleið 1.000 íðkarar eru við í kappingini. Tað er okkara vón, at Føroyar sleppa at taka lut á leikunum í 2021. Limalondini í Games of Small States of Europe eru: Monako, Kýpros, Andorra, Malta, Luksemborg, Ísland, Liktinstein, San Marino og Montenegro.

Omanfyri nevndu frambrot eru í roynd og veru risastór fet á leiðini at vinna okkum altjóða viðurkenning innan ítrótt, herundir limaskap í Altjóða Olympisku Nevndini, IOC.

Avgerðin hjá Evropisku Olympisku Nevndin gevur okkum mót at halda fram við arbeiðinum at tryggja øllum okkara ítróttagreinum altjóða viðurkenning – og harvið møguleikan áhaldandi at kappast í altjóða kappingum.

Sambondini undir ÍSF, sum enn ikki hava vunnið sær limaskap í altjóða ítróttasambondum, søkja støðugt um altjóða limaskap. Taekwondosambandið hevur fingið limaskap í World Taekwondo og World Taekwondo Europe, og Dartsambandið er vorðið limur í World Darts Federation. Skjótisambandið hevur søkt um limaskap í International Shooting Sport Federation, og góðar vónir eru um, at hesin limaskapurin eisini fæst í hús.

## Vantandi politisk undirtøka

Føroyskum ítrótti tørvar ítøkiliga politiska undirtøku, sum sæst aftur í krónum og oyrum, so føroyskir íðkarar hava ein veruligan møguleika at røkka altjóða málum. Játtanin til ÍSF hevur ikki fylgt teimum góðu úrslitunum, sum okkara ítróttafólk higartil hava avrikað uttanlands, og tí standa sersambond í tí støðu, at tey ikki hava ráð at senda ítróttafólk út í heim at kappast sum føroyingar undir føroyskum flaggi ímóti teimum bestu.

Um landsstýrið ikki økir játtanina til ítróttin 1,5 milliónir krónur í 2021, so minkar stuðulin til sambondini 11 prosent. Orsøkin er, at eingin stórur vinningur í Danske Spil er vunnin í Føroyum seinnu árini, og av hesi orsøk minkar inntøkan frá Sp/f Ítróttavedding.

Føroyskur ítróttur fer sambært einari uppgerð, sum sambondini hava greitt úr hondum, at hava tørv á at økja árligu fíggjarætlanini úr 10 milliónum krónum upp í 25 milliónir krónur innan 2023.

Vit royna støðugt at minna politiska myndugleikan á henda veruleika, sum eisini var viðgjørdur á Ítróttatinginum 29. august í fjør – tveir dagar fyri løgtingsvalið. Tá søgdu flokkarnir seg vilja hækka játtanina til ÍSF munandi komandi árini – tó við ymiskum treytum. Samanumtikið vóru valevnini fyri flokkarnar samd um, at játtanin til ÍSF verður økt við fimm milliónum krónum árliga komandi árini, soleiðis at samlaða játtanin er komin upp á 25 milliónir krónur í 2023.

Á Ítróttatinginum fegnaðist ÍSF um, at tað tykist vera breið semja millum flokkarnar, og vit loyvdu okkum at vænta, at komandi samgongan fór at taka hetta við í samgonguskjalið. Men tá ið av tornaði stóð einki ítøkiligt í samgonguskjalinum um, hvussu bøtast kann um hesa trongu fíggjarstøðu hjá føroyskum ítrótti.

Bæði ítrótturin innlendis í Føroyum og okkara altjóða luttøka kosta pengar, men vit ivast stórliga í, um okkara landspolitikarar hava fata støðuna hjá okkara ítrótti, ella um politikarar tilvitað venda blinda eygað til ítróttin, ítróttafeløg, ítróttafólk og tey mongu sjálvbodnu í føroyska ítróttaheiminum.

## Løgmaður fekk gullnál og heiðursbræv

Bárður á Steig Nielsen, løgmaður, tók við sum verji hjá føroyskum ítrótti 8. oktober 2019.

Síðan 1955 hevur verið siðvenja, at Føroya løgmaður er verji hjá føroyskum ítrótti, og í hesum sambandi handaði ÍSF Bárði á Steig Nielsen gullnál og heiðurs-

***Oyggjaleikir 2019 vóru á Gibraltar***

bræv. Bárður á Steig Nielsen er 13. løgmaður í røðini, sum er verji hjá føroyskum ítrótti. Tá siðvenjan byrjaði í 1955, var Kristian Djurhuus, sum eisini umboðaði Sambandsflokkin, løgmaður.

Bárður á Steig Nielsen takkaði ÍSF fyri stóra heiðurin og segði, at ítróttur og frítíðarvirksemi hava avbera stóran týdning fyri okkara heilsu og trivnað, tí tað gevur okkum øllum møguleika at vera virkin og at vera partur av einum sunnum felagsskapi.

Í okkara stremban eftir altjóða viðurkenning og limaskapi í IOC, hevur tað heilt víst eisini stóran týdning, at landsins hægsti myndugleiki er sjónligur og tekur lut í hesum arbeiði.

## Føroyar í rørslu

ÍSF og Fólkaheilsuráðið eru í ferð við at leggja lunnar undir eina rørsluverkætlan, Føroyar í rørslu, sum hevur til endamáls at geva øllum borgarum í Føroyum javnt góðar møguleikar at røra seg og iðka ítrótt í tryggum umhvørvi.

Øll hava rætt til heilsu, leik og gleði í sínum gerandisdegi, sama hvussu sosiala, likamliga ella persónliga støðan hjá einstaka borgaranum er. Hesin hugburður er í samsvari við 3. heimsmálið hjá ST, sum er at tryggja øllum heilsugott lív og virka fyri trivnaði fyri øll í øllum aldri.

Sjálvbodna arbeiðið, sum fer fram innan ítróttin í okkara landi, er gull vert. Men sjálvboði arbeiði kann eisini av góðum grundum vera ójavnt, tí tað mangan er grundað á herðarnar hjá nøkrum fáum. Rørsluverkætlanin skal skapa betri og tryggari karmar fyri rørslu og ítrótt um alt landið.

Tey fyrstu tiltøkini í rørsluverkætlanini verða skipað í summar sum góð tilboð til allar føroyingar, nú ferðing uttanlands helst verður avmarkað munandi orsakað av korona-støðuni.

## Oyggjaleikir 2019

Tað var við stórum spenningi, at 94 føroysk ítróttafólk settu kós ímóti sólríku hálvoynni, Gibraltar, hósdagin 4. juli í fjør. Atlantic Airways flutti føroysku ítróttafólkini til oyggjaleikirnar á Gibraltar, sum vórðu hildnir í døgunum 7.-12. juli.

Bert nakrir fáir føroyskir áskoðarar vóru við flogfarinum, tí tað var trupult at fáa innivist á Gibraltar. Tá ið av tornaði komu kortini fleiri føroyingar enn væntað at stuðla okkara íðkarum á oyggjaleikunum, tí fleiri føroyingar høvdu leitað sær annan veg til leikirnar við gistingarmøguleikum beint norðan fyri markið – í Spania.

Føroyar vunnu tilsamans 60 heiðursmerki á oyggjaleikunum 2019, og av hesum vóru 22 gullheiðursmerki. Vit vunnu 13 gull í svimjing, fimm gull í judo, trý gull í skjóting, og í Triatlon ognaðu vit okkum eitt gullheiðursmerki.

Føroyingar vóru við í 10 ítróttagreinum: Badminton, borðtennis, frælsum ítrótti, skjóting, judo, tennis, kurvabólti, svimjing, súkkling og triatlon.

Gibraltar skipaði fyri leikunnum fyri aðru ferð í fjør – fyrstu ferð var í 1995.

Í 2019 vóru 30 ár síðani, at oyggjaleikirnir vóru í Føroyum í 1989. Tað er størsta ítróttakapping, sum Føroyar hava hýst. Tá kappaðust 800 ítróttafólk úr 15 oyggjasamfeløgum í Føroyum.

Vit gleða okkum til at verða vertir fyri oyggjaleikunum, sum verða aftur í Føroyum í 2029. Innleiðandi fyrireikingarnar eru farnar í gongd.

## Ársins ítróttafólk

Tiltakið „Ársins Ítróttaheiður 2019" varð hildið fyri innbodnum í Müllers Pakkhúsi leygarkvøldið 28. desember, har ÍSF enn einaferð hevði tikið stig til at heiðra tey bestu innan føroyskan ítrótt.

***Vinnarar „Ársins Ítróttaheiður 2019" saman við Føroya løgmanni og forseta ÍSF***

Almenningurin hevði høvi at fylgja tiltakinum á netinum, og ÍSF hevur fingið nógvar jaligar afturboðanir um „Ársins Ítróttaheiður 2019".

Sverri Sandberg Nielsen var kosin ársins Ítróttanavn 2019. Høvuðsorsøkirnar til heiðurin vóru tveir sigrar á World Cup stevnum, HM-silvur, og at hann hevði tryggjað sær luttøku í OL.

Sverri Sandberg Nielsen segði í takkarrøðu síni m.a., at viðurkenningin í Føroyum hevur stóran týdning fyri hann, og at hóast hann rør undir donskum flaggi, so kennir hann seg ernan av at umboða Føroyar á altjóða róðrapallinum.

Súsanna K. Olsen – betur kend sum Ussa – fekk Heiðursskjal Poul E. Petersen, sum verður latið fólki, ið hava gjørt vart við seg og tænt ítróttinum á serstakan hátt. Heiðurin er hin mest forkunnugi í føroyska ítróttaheiminum, og undan Ussa hava seks onnur fólk fingið hetta heiðursskjalið.

Ussa fekk heiðurin fyri sítt drúgva og trúfasta sjálvbodna arbeiði í hondbóltsfelagnum Kyndli, har hon er ímyndin av eini eldsál. Í takkarrøðuni vísti Ussa m.a. á stóru gleðina at vera partur av felagsskapinum í Kyndli umframt tær mongu góðu upplivingarnar, sum hon hevur fingið gjøgnum sítt arbeiði í felagnum.

Hini, sum vóru heiðrað, vóru:

- Elias Ellefsen á Skipagøtu, hondbóltspælari, Ársins Ítróttastjørnuskot
- Taekwondosamband Føroya, Ársins Ítróttasamband
- Høgni Kunoy Dávason, taekwondoíðkari, Ársins Ítróttafelagi
- Eydnudeildin Føroyar, Ársins Ítróttaátak

***Úrvalsstuðul 2020 varð latin til íðkarar innan flogólt, hondbólt, svimjing, fimleik, frælsan ítrótt, súkkling, taekwondo og paraítrótt***

## Nógv fingu úrvalsstuðul

2020 byrjaði við, at tilsamans 1.864.400 krónur vóru handaðar úrvalsíðkarum úr átta sambondum á samkomu 3. januar, har Jenis av Rana, landsstýrismaður í ítróttamálum, helt røðu.

Talan er um higartil hægsta úrvalsstuðul, og ongantíð áður hava so nógv ítróttafólk og ítróttagreinar fingið gleði av úrvalsstuðlinum. Talið av væl skikkaðum umsøkjarum var eisini methøgt. Tað ber boð um, at føroyskur ítróttur er í stórari menning. Nevndin í Úrvali samtykti at býta úrvalsupphæddina millum 15 einstaklingar og lið.

Svimjisambandið fekk samanlagt størstu upphæddina. Fýra einstaklingar fingu stuðul, umframt at SSF fekk 50.000 krónur til yngri úrvalssvimjarar. Flogbóltssambandið og Hondbóltssambandið fingu stuðul til trý ungdómslandslið, og harumframt varð stuðul eisini latin til fimleik, frælsan ítrótt, súkkling, taekwondo og paraítrótt.

Millum móttakararnar vóru fleiri, ið áður hava fingið stuðulsupphædd, men eisini vóru fleiri, sum ikki hava fingið fyrr.

## Skeið og tiltøk

Eins og undanfarin ár hevði ÍSF í 2019 eisini skeið og vitanarspjaðing á skránni.

Skipað var fyri vanliga venjaraskeiðnum, Venjari 1, og skeiðnum fyri kassameistarum og nevndarlimum. Arbeitt verður við at gera eina venjaraútbúgving, sum verður føroysk burturav. Avgjørt er at endurskoða skeiðstilboðini.

ÍSF skipaði fyri tveimum evniskvøldum undir heitinum „Nær skal eg velja", har spurningurin um úrval innan ungdómsítrótt varð viðgjørdur. M.a. var hugt nærri eftir, um tað er neyðugt hjá børnum fult og heilt at velja sær eina ítróttagrein fyri at røkka langt? Hvussu ofta og hvussu nógv ymiskt kunnu børn og ung venja? Og hvat er talent, og hvussu kemur tað til sjóndar?

***Pallborðið „Nær skal eg velja"***

Tiltøkini vóru skipað við framløgum og pallborði, sum svaraði spurningum frá áhoyrarum. Helgi Winther Olsen samskipaði tiltøkini fyri ÍSF, sum vóru stroymd á netinum. Vit hava fingið jaligar afturboðanir um evniskvøldini.

## Frítíðarkortið

Orðaskifti tók seg upp um frítíðarkortið, ið vit eisini kenna úr Íslandi sum ein stuðul til børn og ung at iðka ítrótt. Í kjalarvørrinum á hesum orðaskifti kom Runavíkar kommuna í fjør sum fyrsta kommuna við einum frítíðarkorti til allar borgarar í aldrinum 6-18 ár.

ÍSF var á fundum við Runavíkar kommunu og Kommunufelagið, har vit greiddu frá okkara sjónarmiðum um, m.a. hvørji krøv eiga at vera galdandi fyri feløgini, sum ynskja at vera partur av tilboðnum.

Vit løgdu serligan dent á, at útbúnir venjarar yvir 18 ár hava høvuðsábyrgdina av børnunum. Hetta hevði við sær, at Runavíkar kommuna avgjørdi, at venjaraútbúgvingin hjá ÍSF – ella líknandi útbúgving frá avvarðandi sersambandi – skal vera grundarlagið hjá øllum venjarum í ítróttafeløgum í Runavíkar kommunu, sum taka ímóti frítíðarkortinum.

Vit vænta stóran eftirspurning eftir venjaraútbúgvingin hjá ÍSF, so hvørt fleiri kommunur fara at bjóða sínum borgarum frítíðarkort.

Nes kommuna, Sjóvar kommuna, Eiðis kommuna og Tvøroyrar kommuna hava síðani eisini sett eina skipan við frítíðarkorti í verk.

## 80 ára tiltøk

ÍSF fylti 80 ár hósdagin 4. apríl 2019, og vit valdu m.a. at varpa ljós á dagin saman við ítróttafeløgum kring landið.

Á føðingardegnum skipaði ÍSF fyri almennari mót-

***Ítróttafeløgini høvdu opið hús, tá ÍSF fylti 80 ár og Piddi vitjaði feløgini á 80-ára degnum***

tøku í Smæruni, har fyrrverandi ÍSF-forsetar hugleiddu um avgerandi hendingar í søguni hjá ÍSF. Við á móttøkuni vórðu eisini løgmaður, landsstýrismaðurin í ítróttamálum og borgarstjórin í Tórshavnar kommunu. Sama dag læt framsýning upp í SMS, sum lýsti søguna hjá ÍSF og oyggjaleikirnar.

Í sama viðfangi skipaðu ítróttafeløgini fyri tiltakinum „opið hús" kring alt landið. Talan var um eitt felags tiltak fyri allar ítróttagreinar, har øll høvdu møguleika at royna ymisku ítróttagreinarnar. Tiltakið fekk sera

# Javnstøða í føroyskum ítrótti

Tølini her byggja á upplýsingar frá teimum 10 menningarsambondunum, 15 sersambondunum umframt starvsnevnd ÍSF's

**Talva 1: Býtið í % millum kynini í starvsnevndunum 2019/20**




**Talva 2:**




**Talva 3:**



***Andras tekur yvir eftir Jarvin***

góða undirtøku, og tað er vælhóskandi at gera til ein afturvendandi ítróttadag, har fólk kunnu royna ymiskar ítróttagreinar.

Poul E. Petersen, lærari og ítróttaráðgevi, var fyrsti formaður í ÍSF. Hann tók stig til at savna fólk til ein fyrireikandi fund á Sjómansheiminum 16. august í 1938, har lógir fyri ÍSF vórðu góðkendar. 4. apríl 1939 var so stovnandi aðalfundur – eisini á Sjómansheiminum. Sjey feløg vóru við til at stovna ÍSF: HB, Havnar Fimleikafelag, Havnar Róðrarfelag, Neistin, SÍ, VB og EB. ÍSF-forsetarnir eftir Poul Petersen hava verið: Martin Holm, Ólavur Lambaa, Líggjas Joensen, Erhard Næs, Jógvan Arge, Heðin Mortensen, Sølvi Reinert Hansen, Petur Elias Petersen og Elin Heðinsdóttir Joensen, sitandi ÍSF-forseti.

Í dag er triðihvør føroyingur íðkandi limur í teimum tilsamans 120 ítróttafeløgunum í ÍSF.

## Nýtt menningarsamband

Fyrsta felagið innan styrkiítrótt í Føroyum, Styrkifelag Føroya, varð stovnað 7. september 2019, og 20. desember 2019 var henda ítróttagrein eisini skipað í eitt menningarsamband undir ÍSF, Styrkisamband Føroya, sum varð stovnað tveir dagar frammanundan.

Endamálið hjá Styrkisambandi Føroya er at skipa og menna kraftítróttin í Føroyum. Hetta er eitt øki, sum hevur ment seg við rúkandi ferð seinnu árini, og limatalið er støðugt vaksandi.

Í fyrsta umfari fevnir Styrkisamband Føroya um greinarnar: olympiska vektlyfting, power lyfting, kettle bells og crossfit. Møguleiki er eisini hjá øðrum greinum innan kraftítróttin at søkja um limaskap í Styrkisambandi Føroya.

ÍSF ynskir enn eina ferð Styrkisambandi Føroya hjartaliga tillukku við limaskapinum.

## Nýggjur ítróttaráðgevi

1. oktober byrjaði Andras Nolsøe í starvi sum ítróttaráðgevi hjá ÍSF. Hann avloysti Jarvin Feilberg Hansen, sum hevði verið ítróttaráðgevi í nøkur ár, men valdi at fara í annað starv.

Andras var formaður í Borðtennissambandi Føroya, tá ið hann gjørdist ítróttaráðgevi, men hann legði formanssessin frá sær, eftir at hann byrjaði í starvi hjá ÍSF.

## Roknskapir á heimasíðuni

Í fjør heyst gjørdist lætt hjá øllum at fáa innlit í fíggjarviðurskiftini í føroyskum ítrótti, tá roknskapirnir hjá øllum 15 sersambondunum saman við roknskapinum hjá ÍSF gjørdust almennir á heimasíðuni hjá ÍSF.

Á aðalfundinum í 2018 var samtykt, at roknskapir hjá øllum sersambondum skuldu verða á heimasíðuni. Avgerðin var ein liður í einari yvirskipaðari ætlan um at skapa meira opinleika og gjøgnumskygni.

Í starvsnevndini hevur verið arbeitt miðvíst fyri meiri gjøgnumskygni og opinleika seinastu árini – ikki minst á fíggjarøkinum. Tað ger seg eitt nú galdandi, tá

# Býtið 2016 – 2020

Stuðulin frá løgtingi og ítróttavedding býtt á sersambond




***Uppskot til býti, lagt fyri aðalfundin hjá Ítróttasambandi Føroya 30. mai 2020***

# Stuðul frá Úrval 2014-2020



játtanin til ítrótt á fíggjarlógini verður býtt millum sersambondini við sonevnda býtislyklinum, har virksemið í sersambondunum er avgerandi fyri, hvussu játtanin verður býtt.

Í hesum viðfangi eru roknskapirnir hjá sersambondunum týdningarmiklir, og tí var hóskandi at gera teir alment atkomiligar á einum staði.

## Ítrótturin so sera týðandi

Sera stórur partur av føroyingum er á ein ella annan hátt knýttur at okkara ríka ítróttalívi, sum ítróttaleiðslur, iðkarar og sjálvboðin seta í gongd aftur, eftir at ítrótturin – eins og restin av samfelagnum – var so dyggiliga raktur av korona.

Okkara børn og ungdómar merktu helst sviðan serliga meint, tí frælsa ítróttalívið var tikið frá teimum. Brádliga stóð sólarklárt fyri okkum, hvussu stóran týdning ítróttur í roynd og veru hevur fyri trivnaðin og fólkaheilsuna.

Vit eru komin varliga í gongd aftur við ítróttavirksemið. Tað er eisini okkara vón, at hóast tíðin alt í einum broyttist frá stórari framgongd til risastóra afturgongd, so gloyma vit ikki at stuðla ítróttinum, sum hevur so alstóran samfelagsligan týdning.

Tað liggja avbjóðingar fyri framman – bæði spennandi og torførar. Við góðum ítróttaanda taka vit við øllum hesum avbjóðingum, og sum altíð reisa vit okkum aftur.

Vegna starvsnevndina í ÍSF
Elin Heðinsdóttir Joensen, forseti

# Umboðstingið á várið 2020

# Badmintonsamband Føroya

## Nógv var á skránni í 2019

*2019 hevur verið eitt av teimum mest virknu árunum hjá Badmintonsambandi Føroya. Umframt heimligu kappingarnar var eisini nógv virksemi uttanlands*

Vanligu heimligu kappingarnar – fimm Grand-Prix í einmansleiki, tríggjar kappingar í tvímansleiki og blandaðum tvímansleiki, tvær kappingar fyri U9, FM fyri teimum ungu í einmans-, tvímans- og blandaðum tvímansleiki og Kontrast FM – vóru avgreiddar, og harumframt vóru fleiri kappingar uttanlands.

Fyri triðju ferð var okkara U19 ungdómslandslið við til HM fyri U19 í Kazan í Russlandi, og fyri triðju ferð tók okkara U17 unglingalandslið lut í EM fyri U17 í Gniezno í Póllandi.

BSF styrkti seg á venjarasíðuni í fjør. Wong Fai Yin úr Malaysia byrjaði sum hjálparvenjari 15. august 2019. BSF hevur harvið havt eitt sterkt venjaratoymi við Sune Gavnholt og Wong Fai Yin.

Wong hevur sjálvur verið yrkisbadmintonleikari og hevur spælt á malaysiska landsliðnum frá 2012 til 2016. Hansara besta plass á heimsstyrkilistanum var í 2015, tá hann var nummar 38 í blandaðum tvímansleiki. Hann hevur luttikið í eini ørgrynnu av altjóða kappingum og vann í 2015 Romanian International í blandaðum tvímansleiki. Haraftrat kappaðist hann í heimsmeistarakappingini í 2015 – somuleiðis í blandaðum tvímansleiki.

Í 2019 hevði Sune tríggjar venjingar við bruttolandsliðshópinum í Føroyum, síðstu venjingina hevði hann saman við Wong.

Niðanfyri er ein stutt lýsing av nøkrum av teimum týðandi tiltøkunum, sum BSF hevur verið partur av í farna ári.

### Februar 2019 – Reykjavík International Games

Hetta var eitt sera gott tiltak fyri breiddina. Eitt tiltak, sum samlar øll feløgini, og tað gav okkum 3 gull- og 8 silvurheiðursmerki. Eisini vóru landsdystir spældir millum Føroyar og Ísland í U13, U15, U17 og U19. Tá ið kappingin var liðug, var Sissal Thomsen heiðrað sum besti kvinnuligi leikari í kappingini. Hon vann gull í einmansleiki í U19. Hetta er fyrstu ferð, at ein føroysk kvinna hevur vunnið henda heiður. 60 leikarar og 1 venjari vóru við.

### Mars 2019 – ISI Cup í Ikast

Talan var um eitt tiltak fyri bruttolandsliðið, ið var liður í fyrireikingunum til Island Games 2019 í Gibraltar. 13 leikarar, 2 venjarar og 2 liðleiðarar vóru við.

### Mars 2019 – Hvidovre Cup

Hetta var eisini eitt tiltak fyri bruttolandsliðið sum liður í fyrireikingunum til Island Games 2019 í Gibraltar. 8 leikarar, 1 venjari og 1 liðleiðari vóru við.

### Apríl 2019 – Yonex Junior Cup í Berlin

Á páskum sendu vit fyri triðju ferð eitt ungdómslandslið til Yonex Junior Cup í Berlin. Hetta er ein kapping við sterkum leikarum úr fleiri evropiskum londum. Kappingin var ein avbjóðing fyri okkara leikarar, og samstundis var talan um eitt mennandi átak. Vit tryggjaðu okkum eitt gull- og trý bronsuheiðursmerki í hesum sterka hópinum. 16 leikarar, 2 venjarar og 2 liðleiðarar vóru við.

### Mai 2019 – Junior Faroe Islands Open í Tórshavn

Fyri fjórðu ferð skipaðu BSF og HBF fyri einari opnari altjóða kapping fyri U13 og U15 í Føroyum. Badmintonleikarar úr Íslandi luttóku. Hetta tiltakið eydnaðist sera væl.

### Juli 2019 – Summer School í Podcertrtek í Slovenia

Venjingarlega fyri U17, sum er á sera høgum støði. Fleiri evropisk lond taka lut á hesi leguni, og bæði leikarar og venjarar fáa sera nógv burturúr. 4 leikarar og 1 venjari vóru við.

### Juli 2019 – Island Games í Gibraltar

Vit vunnu tilsamans fimm bronsuheiðursmerki á oyggjaleikunum – eitt heiðursmerki í liðkappingini og fýra í einstaklingakappingini. Sammeta vit við oyggjaleikirnar á Gotlandi, har vit fingu tvey bronsuheiðurs-

merki í einstaklingakappingini, so klárađu vit okkum munandi betur á oyggjaleikunum í Gibraltar.

Í liđkappingini vístu vit, at vit hoyra til í top 3, tá vit lættliga spældu okkum víđari úr bólkaspælinum í dystum móti Hetlandi, Ynys Mon og vertunum Gibraltar. Í hálvfinaluni ímóti Guernsey góvu vit alt, vit áttu, og vit vóru so tætt við at vinna. Bronsudystin ímóti Isle of Man vunnu vit lættliga 3-0.

Í einstaklingakappingini vístu vit, at vit hava ein breiđan hóp. Tađ vóru bćđi eldri og yngri leikarar í hópinum. Av teimum vóru fýra við fyri fyrstu ferđ. Vit komu í átta fjórđingsfinalur og fýra hálvfinalur. Tilsamans fingu vit fýra bronsuheiđursmerki í einstaklingakappingini.

Hesi vunnu bronsu í einmansleiki: Bartal Poulsen í einmansleiki fyri menn, Rannvá Djurhuus Carlsson og Gunnva Jacobsen í einmansleiki fyri kvinnur umframt Niclas Eysturoy og Rannvá Djurhuus Carlsson í blandađum tvímansleiki

Samanumtikið eitt sera gott úrslit, sum leikararnir kunnu vera stoltir av, tí vit settu tvær strikur undir, at vit hava ein sterkan hóp við einum miđalaldri á 20 ár. Allir leikarar vístu, at teir kunnu skaka leikararnar hjá hinum tjóđunum. Vit hava nógv gott í vćntu í fleiri ár frameftir. 10 leikarar, 2 venjarar, 2 liđleiđari og 1 dómari vóru við í Gibraltar.

### Juli 2019 – North Atlantic Camp í Grønlandi

Venjingarlega í Nuuk fyri leikarar og venjarar úr Íslandi, Grønlandi og Føroyum í aldursbólkunum U13, U15 og U17. 8 leikarar, 1 venjari og 1 liđleiđari vóru við.

### August/september 2019 – U17 EM í Gniezno í Póllandi

Fyri triđju ferđ vóru vit við í EM fyri U17. Í liđkappingini, har 35 lond tóku lut, endađi Føroyar sum nummar fýra í sínum bólki – aftan fyri Kekkia, Estland og Wales, men framman fyri Armenia, sum Føroyar vunnu 3-2. Móti Kekkia, Estlandi og Wales vístu leikararnir góđan stríđsanda, men taptu 0-5 fyri sterkari liđum.

Í einstaklingakappingini spældu øll einmansleik, tvímansleik og blandađan tvímansleik, men tađ eydnađist ongum at spæla seg víđari.

Samanumtikið gav hetta EM fyri U17 teimum føroysku leikarunum eitt hav av dystum ímóti leikarum, sum kravdu, at okkara leikarar skuldu spæla sítt allarbesta og undir sera góđum umstøđum. Føroysku badmintonspælararnir eru ivaleyst komnir heim aftur við dýrabarum royndum í viđførinum. 4 leikarar, 1 venjari og 2 liđleiđarar vóru við.

### September/oktober 2019 – U19 HM í Kazen í Russlandi

Fyri triđju ferđ vóru vit í HM í liđkappingini fyri U19. 43 lond høvdu meldađ til kappingina. Føroyar komu í bólk saman við Taiwan, Danmark, New Zealandi og Uzbekistan. Vit taptu 0-5 ímóti Taiwan, Danmark og New Zealandi, og ímóti Uzbekistan tabtu vit 1-4. Tískil komu vit víđari úr bólkinum á einum fimta plássi.

Vit skuldu síđani spæla um plássini 33-38. Vit taptu 1-3 ímóti Noreg, men aftaná vunnu vit 3-0 ímóti Armenia, og vit endađu við at tapa 1-3 ímóti Kazakstan. Síđsta dystin taptu vit tepurt, men endađu á einum 38. plássi.

Tađ er tó týdningarmiklari at nevna, at okkara leikarar spældu sera væl, og teir spældu betur og betur, sum dagarnir gingu. Føroysku leikararnir klárađu væl at taka ímóti vegleiđing og coaching frá landsliđsvenjaranum Sune Gavnholt. 6 leikarar, 2 venjarar og 2 liđleiđarar vóru við.

### November 2019 – eykaađalfundur í BSF

Fyri at styrkja BSF varđ samtykt at víđka nevndina úr trimum upp í fimm nevndarlimir. Nývald vóru Herborg á Mýrini, Katrin Jacobsen og Johnny í Grótinum. Birgit Ryan var vald til tiltakslim.

### Starvsnevnd

- Erik Engelbrecht Thomsen, formaður
- Herborg á Mýrini, næstforkvinna
- Katrin Jacobsen, nevndarlimur
- Elian Elttør, nevndarlimur
- Johnny í Grótinum, nevndarlimur
- Mariann Øster, skrivari og kassameistari
- Birgit Ryan, tiltakslimur

### Dómsnevnd

- Fróði Hansen
- Aksel Poulsen
- Magnus Gaard

### Feløg

- Havnar Badmintonfelag
- Miđvágs Badmintonfelag
- Klaksvíkar Badmintonfelag
- ÍF Badminton
- Sandoyar Badmintonfelag
- Badmintonfelagið Nápur

Tal av limum: 634

# Bogaskjótisamband Føroya

## Tilgongdin av ungum skjúttum er javnt býtt millum kynini

*Tey ungu leggjast aftrat, men enn vanta hóskandi umstøður til skjóting uttandura, sum er ein átrokandi trupulleiki at loysa*

Tilgongdin av ungum skjúttum er sum heild javnt býtt millum kynini, men henda veturin hava serliga fleiri kvinnur víst áhuga fyri bogaskjótingini. Vit vóna, at hetta fer at halda fram.

Bæði BSKF og feløgini hava ynski um at fáa góðar og hóskandi umstøður til uttandura skjóting, so vit ikki standa á berum hvørt ár, tá ið uttandura skjótingin byrjar. Vit arbeiða áhaldandi fyri at fáa eina fasta útibreyt at skjóta á.

Eitt ávíst menningararbeiði er í gongd. BSKF hevur avtalu við norska venjaran, Morten Bøe, og hann hevur verið fast í Føroyum og vant skjúttarnar. Harumframt hava umboð fyri BSKF og feløgini luttikið á skeiði í IANSEO, sum er eitt forrit, ið verður nýtt til allar altjóða kappingar.

Tað er eitt hjartamál hjá Bogaskjótisambandinum at veita fólki ein møguleika at savnast um ta elligomlu ítróttagrein, sum bogaskjóting er.

### Kappingar

BSKF og feløgini hava henda veturin skipað fyri níggju kappingum í Føroyum fyri vaksnu skjúttunum, og átta kappingar hava verið fyri teimum ungu.

Seks skjúttar vóru í Íslandi og tóku lut í íslandsmeistaraskapinum 2019, har skjúttarnir fingu tvey gull- og eitt silvurheiðursmerki.

Tríggir skjúttar vóru við í HM og Dukes of Archery kapping í Hollandi í juni 2019. Mánaðarskiftið juni-juli var NUM í Aalborg, har ein ungdómsskjútti var við. Ein skjútti hevur eisini verið við í kapping í Las Vegas.

Níggju skjúttar vóru við í íslandsmeistaraskapinum 2020 fyri ung upp til 21 ár og 50+ ár. Føroysku skjúttarnir fingu tvey gull-, tvey silvur- og fimm bronsuheiðursmerki.

## Sersambandið

Bogaskjótisamband Føroya hevur fýra fólk í nevndini – formann, varaformann, nevndarlim og skrivara.

## Feløg og limatøl

- Bogaskjótifelagið Tambar – uml. 40 limir
- Bogaskjótifelagið Ørvur – uml. 35 limir
- Bogaskjótifelagið Vágaskot – uml. 35 limir

## Borðtennissamband Føroya

# Borðtennissambandið fekk sína fyrstu forkvinnu

*Elinborg C. Mortensen tók í 2019 við leiðsluni í Borðtennissambandi Føroya, sum boðar frá framgongd og spennandi avbjóðingum bæði úti og heima*

Hjá Borðtenissambandi Føroya gjørdist árið 2019 søguligt, tá sambandið fekk sína fyrstu forkvinnu í tey 40 árini, Borðtennissambandið hevur verið til. Forkvinnan eitur Elinborg C. Mortensen, og hon hevur tikið við eftir Andras Nolsøe, ið er farin í starv sum ítróttaráðgevi hjá Ítróttasambandi Føroya.

Elinborg C. Mortensen er av borðtennisháborgini, Tvøroyri, har hon í mong ár hevur verið virkin sum leikari, og seinnu árini hevur hon eisini havt leiklutir í nevndararbeiði í Borðtennissambandi Føroya. Hon var beinanvegin til reiðar, tá ið heitt var á hana at gerast forkvinna.

– Tá ið eg nú ikki í nærmastu framtíð fór at hava so nógva tíð til venjing, so mátti eg vera uppi í borðtennis á annan hátt. Eg elski borðtennis og vil gera alt fyri at vinna tí frama bæði her heima og uttanlands, sigur Elinborg, sum hevur fingið nógv at síggja til í ovasta sessinum.

– Fyrstu mánaðirnir hava verið strævnir, har nógv hevur verið at seta seg inn í og taka stig til. Men tað er eitt fantastiskt samanhald, og eg elski at síggja tað góðu og jaligu gongdina hjá teimum yngru leikarunum, sigur BTSF-forkvinnan.

### Vunnu á Wales

Í september í 2019 var føroyska ungdómslandsliðið við í kapping á Malta, har luttakandi londini vóru Føroyar, Malta, Noreg, Írland, Wales, Kosovo og Libanon. Hetta var stinn mótstøða fyri føroysku ungdómarnar, men stóra plussið í kappingini var, at føroyska dreingjalandsliðið megnaði at vinna á Wales.

– Hesum sigrinum eri eg errin av. Tað er gott at vita sær, at vit kunnu meta okkum við onnur lond og eisini sleppa at smakka sigursins søta smakk. Hetta er tað, sum motiverar okkum øll, sigur Pætur Albinus, ungdómslandsliðsvenjari.

Virksemið við ungdómslandsliðnum er vaksið nógv seinastu tvey árini, og framgongdin hevur verið eyðsæð. Týðandi samstørv um kappingar eru skapt út í heimi, og hetta boðar frá framhaldandi menning og spennandi avbjóðingum til ungu leikararnar.

### Vaksandi luttakaratal

Tað, sum skapar mest lív í heimliga kappingarárið í borðtennis, er Grand Prix-kappingarrøðin. Spæld vera seks umfør, og ein samlað støða verður gjørd upp. Hetta er gaman og spenningur fyri ungdómin – og eisini ein týðandi partur fyri kappingarføra umhvørvið hjá elituni.

Í Grand Prix spæla øll ímóti øllum – tvørtur um bæði kyn og aldur. Tú veitst ongantíð, hvør stendur hinumegin netið. Tað kann vera ein smágenta við bjartari framtíð ella ein eldri maður, sum bara vil fáa eitt sindur av motión.

Í ár var dømi um ein dyst, har ein sjey ára gamal smádrongur spældi ímóti einum 50 ára gomlum manni. Hetta var ein javnur og spennandi dystur, sum endaði 3-2 til hann við drúgvum lívsroyndum.

Hetta er tað, sum drívur. Øll kunnu vera við.

Kappingin er skipað í bólkar við upp- og niðurflyting, soleiðis at leikarar altíð fáa mótstøðu, ið er á umleið sama støði. Tað er eggjandi og við til at skapa eina natúrliga javnstøðu, tá ið kvinnur og menn kappast ímóti hvørjum øðrum á jøvnum føti. Tað er júst hetta, sum myndar alt Borðtennissamband Føroya, har kvinnur og menn eru javnt væl umboðað heilt frá ovastu rók.

Luttakaratalið í Grand Prix-kappingunum hevur verið støðugt vaksandi seinnu árini. Kappingarárið 2017/18 var miðal luttakaratalið 28,33, í 2018/19 var tað 31,50, og í ár hevur miðal luttakaratalið verið 40,66. Tilsamans hava 70 ymiskir leikarar verið við.

BORÐTENNISSAMBAND FØROYA
1980
BORÐTENNISSAMBAND
FØROYA
TIBA

# Flogbóltssamband Føroya

## Ómetaliga nógv virksemi innan flogbóltin

*Hóast kappingarárið 2019/20 helst eina mest fer í søguna fyri korona, hevur Flogbóltssamband Føroya havt ómetaliga nógv virksemi, sum ikki eigur at verða gloymt. Og finalurnar skulu spælast eftir korona-steðgin*

Nógv er at líta aftur á innan flogbóltin, tó at korona setti kílar í virksemið. Landskappingin hjá teimum vaksnu var undan korona-steðginum komin so mikið langt, at bara heilt fá umfør vóru eftir. Mjølnir stendur seg væl hjá bæði monnum og kvinnum, men serliga hjá kvinnunum er stórur spenningur um finaluplássini, har serstakliga Dráttur og KÍF liggja framvið. Finalurnar skuldu verða spældar fyrst í apríl, men eru útsettar.

Yngru liðini skuldu havt leikt FM-finalur síðst í mars, men tær eru somuleiðis útsettar. FBF hevur tó sett sær fyri, at FM-finalurnar verða leiktar, so at føroyameistarar verða funnir í øllum deildum so ella so.

FBF skipar fyri landskapping fyri øllum liðum. Tey smæstu spæla kappingar, sum feløgini kring landið skipa fyri vegna FBF. Liðini eru býtt í bólkar eftir styrki, og tey fáa stig samsvarandi. Vinnur eitt lið sín bólk, flytur tað upp í næsta bólk. Aftasta liðið í einum bólki flytur niður. Soleiðis verður tryggjað, at øll liðini altíð hava javnbjóðis kapping. Frá 14 árum og uppeftir er talan um vanliga landskapping við heima- og útidystum.

### Steypakappingin

Í steypakappingini vóru hálvfinalurnar leiktar í badmintonhøllini í Klaksvík. Fýra dystir slag í slag ein heilan leygardag í eini badmintonhøll, sum er framúr vælegnað at hýsa slíkum tiltøkum. Nógvir áskoðarar og sera væl nøgdir leikarar, sum á vøllinum góvu okkum nakrar heilt ótrúligar dystir. Serliga minnisríkur var 5-settarin hjá monnunum millum Fleyr og SÍ. SÍ lá omaná til endans.

Sjálvar steypafinalurnar vóru sum vant í høllini á Hálsi, har stórfavorittarnir í Mjølni vunnu hjá monnunum. SÍ er steypavinnari hjá kvinnunum.

Øll tey yngru liðini – líka frá aldursbólkinum 12 ár og uppeftir – sleppa eisini at leika steypafinalur. Alt gekk upp á stás, og talan var um heilt nógvar sera tættar og spennandi dystir.

### Flogbørn

Størsta einstaka verkætlanin hjá FBF nakrantíð er Flogbørn, og verkætlanin helt á hetta kappingarárið um enn nakað broytt. Mest sjónliga í tí almenna rúminum viðvíkjandi Flogbørnum eru kappingarnar fyri skúlarnar, sum hava fingið ómetaliga góða undirtøku.

Tað heilt serliga við Flogbørnum er, at øll børnini eru virkin. Eingin situr uttanfyri ella skal spæla fjeppari. Øll mugu saman royna at vinna fyri flokk sín, skúlan og vinirnar. Lærarar hava tikið sera væl undir við átakinum, og samskiparar okkara Peter og Anne hava hildið skeið fyri lærarum ymsastaðni í landinum. Hesi skeið hava fingið sera góða undirtøku.

### Altjóða pallurin

2019 var árið, tá ið føroyska A-landsliðið hjá monnum fyri fyrstu ferð í 30 ár slapp at royna seg á heimavølli í altjóða kapping. Ikki síðan Oyggjaleikirnar í 1989 hava menninir leikt altjóða kapping á heimavølli.

EM-kappingin gekk sera væl, og føroysku menninir stóðu seg væl. Var tað ikki fyri einum taptum setti ímóti Íslandi, høvdu teir vunnið kappingina, men endin var, at skotar tóku gullið.

Okkara kvinnur stóðu seg eisini sera væl í síni EM-kapping. Hálvfinalan ímóti Luksemborg var framúr, men endaði tíverri sum so ofta við, at Luksemborg akkurát vann. Okkara kvinnur vunnu bronsu.

Sum vant leiktu U17 og U19 landsliðini í NEVZA-kappingini, og aftur hesaferð stóðu tey seg væl. Serliga U17 genturnar, gjørdu ein rættan vørr og endaðu á 3. plássinum fyri Norðurlond. Sama bragdið sum dreingirnir gjørdu í 2018. Grundað á hetta søkti FBF um stuðul frá Úrvali, og tað eydnaðist. So fyri fyrstu ferð fær FBF stuðul til úrvalsarbeiði sítt frá Úrvali. Tað fegnast vit um.

Eftir ætlan skuldu okkara U20 menn leika EM-kapping á heimavølli síðst í mai, og U19 kvinnurnar skuldu til Íslands. Alt hetta er nú útsett, men væntandi verður U20 kappingin í Føroyum í september ístaðin.

## Fíggjarlig viðurskifti

At kalla alt arbeiðið í FBF verður gjørt sjálvboðið. Sum nú er, verður alt fyrisitingarligt arbeiði gjørt sjálvboðið. Harumframt er talan bara um lágar ella ongar samsýningar til venjarar og onnur, ið eru knýtt at mongu landsliðunum.

FBF hevur áhaldandi víst á okkara manglandi fígging yvirfyri ÍSF. Serliga er tað úrvalsarbeiðið, ið ikki fær røttu karmarnar at virka undir, og tað er stórt spell, tá ið hugsað verður um styrkina hjá okkara ungu leikarum.

Ongantíð hevur so nógv verið lagt á sjálvbodnar

herðar sum nú. Men hetta er viðbrekin skipan, og tí er avgerandi neyðugt, at FBF fær eina fíggjarliga játtan, har vit megna at víðka virksemið og styrkja fyrisitingina samsvarandi tí.

## Aleksandar Boričić – frímerkjaútgáva

Forsetin í CEV, Evropeisku Flogbóltssamgonguni, tók av innbjóðing okkara at koma til Føroya í sambandi við frímerkjaútgávu at heiðra 125 ár við flogbólti. Hetta vikuskiftið høvdu vit eisini steypafinalurnar, og Alaksandar fekk høvi at vera við til alt tað umframt sjálva frímerkjaavdúkingina í SMS. Ein stórfingin løta fyri føroyskan flogbólt. Ein varði á leiðini.

Vit nýttu høvið, nú Aleksandar var í Føroyum at fáa fundir við ymiskar partar, har serliga ynskið um limaskap í IOC stóð fremst. Starvsnevndin í ÍSF og løgmaður høvdu fund við Aleksandar um hetta. Í honum hava Føroyar ein góðan umboðsmann, og føroyskur flogbóltur hevur við hesi vitjan fingið samband við nakrar av størstu tjóðunum í flogbóltinum í Evropa við framtíðar samstarvi fyri eyga.

Aleksandar er bergtikin av Føroyum og serliga børnunum og teimum ungu. „So much positive energy" sum hann kallaði tað.

Okkara samband við CEV hevur ongantíð verið sterkari enn tað sama.

# Fótbóltssamband Føroya

# Fótbólturin heldur settu kósina

*Flestu málini í langtíðarætlanini er rokkin, og nýggj mál skulu setast. 2019 var árið við higartil flest landsdystum, og spenningurin var stórur í heimligu kappingunum*

Fótbóltssambandið gjørdi í 2017 eina langtíðarætlan fyri menning av felagsskapinum. Strategiin er kumpassið, sum nevnd og umsiting hava navigerað eftir seinnu árini. Flestu av málunum í ætlanin eru nádd, nú vit koma inn í seinasta árið av ætlanini. Arbeiðið at gera nýggja dagførda strategi fyri FSF byrjar í 2020.

Endamálið hjá FSF er at menna føroyskan fótbólt. FSF megnar tó ikki einsamalt at menna føroyskan fótbólt. Skal fótbólturin mennast, er neyðugt, at føroysku fótbóltsfeløgini standa saman um FSF, og at feløgini eisini savnast og fokusera upp á uppgávuna at menna fótbóltin.

## Landskappingin

Landskappingin í 2019 gekk væl. Stórur spenningur var alla kappingina – serliga í Betri-deildini hjá monnum, har tað endaði við FM-finalu í Gundadali í seinasta umfari millum B36 og KÍ. Klaksvíkingar vóru tó ógvuliga sannførandi í hesum dysti og tryggjaðu KÍ fyrsta FM-heitið í bestu mansdeildini síðan 1999. B36 vann silvur, meðan NSÍ vann bronsu.

Í Kvinnudeildini megnaði KÍ at vinna meistaraheitið. Kappingin var jøvn, og avgerðin fall ikki fyrr enn í næstseinasta leikumfari. HB vann silvur, meðan felagsliðið ÍF/Víkingur/B68 vann bronsu.

Í fjør vóru 423 lið meldað til landskappingina, sum er nakað tað sama sum í 2018. 295 lið vóru tilmeldað innan mansfótbólt og 126 lið innan kvinnufótbólt.

## Steypakappingin

Finaluvikuskiftið var avgreitt á Tórsvøllli 20.-21. september. Finalan um Løgmanssteypið 2019 var millum Víking og HB. Sum altíð til steypafinalur á Tórsvøllli var hýrurin millum áskoðararnar framúr. Endaliga úrslitið av finaluni um Løgmanssteypið var 3-1 sigur til HB. Hjá kvinnunum vann HB eisini steypafinaluna við 3-0 sigri á EB/S/Skála.

Allar finalurnar vóru vístar beinleiðis á heimasíðuni hjá FSF og í KVF. Finaluvikuskiftið var avgreitt í tættum samstarvi við Tórshavnar Kommu og grunnin Tórsvøll, og tey skulu hava stóra tøkk fyri alt arbeiðið, sum var lagt í hetta vikuskiftið.

## Landsliðsfótbóltur

Ongantíð hava Føroyar spælt fleiri landsdystir enn í 2019, tá ið ikki færri enn 54 landsdystir vóru leiktir.

A-landsliðið hjá monnum leikti 10 dystir í EM undankappingini til EURO2020. Okkara menn vóru í einum sterkum bólki saman við Spania, Svøríki, Noreg, Rumenia og Malta. Hóast fleiri góðar dystir, so stóðu bert trý stig á kontuni, tá undankappingin endaði.

EM undankappingin var seinasta undankapping við Lars Olsen sum landsliðsvenjara. Eftir átta mennandi ár vóru partarnir samdir um, at tíðin nú var røtt at royna nýggjar leiðir. Landsliðið hevur ment seg nógv undir leiðslu av Lars Olsen. Minniligu sigrarnir á Grikkalandi standa sum varðar í føroyskum landsliðsfótbólti, og FSF ynskir Lars Olsen blíðan byr víðari á venjaraleiðini.

Nýggjur landsliðsvenjari varð kunngjørdur 16. desember. Svenski Håkan Ericson stendur á odda fyri landsliðnum komandi fýra árini. Håkan Ericson er best kendur sum venjari hjá svenska U21-landsliðnum, har hann førdi liðið til EM-sigur í 2015.

Nýggjur landsliðsvenjarin var settur til kvinnulandsliðið í 2019, tá John Petersen yvirtók sessin frá Pætur Smith Clementsen, ið samstundis gjørdist venjari fyri U19-landsliðið hjá kvinnum.

Kvinnlandsliðið byrjaði landsliðsárið 2019 við einari venjingarlegu í Litava, har tveir landsdystir vóru leiktir ímóti vertunum. Hesir endaðu báðir við javnleiki. Aftaná summarsteðgin byrjaði EM undankappingin, har vit høvdu vitjan av Wales og Noreg, umframt útidyst í Hvítarusslandi á snotliga leikvøllinum í Borisov.

Eins og í undanfarnu undankapping til HM sást, at tað framvegis er rímiliga stórur munur á okkara og

mótstøðuliðunum. Allir tríggir dystir endaðu við ósigri. Tað er tó hugaligt, at áhugin fyri kvinnulandsliðnum er vaksandi. Allir tríggir undankappingardystir vóru vístir beinleiðis í Kringvarpinum.

## Kvinnur í fótbólti

Í 2019 vann FSF uppgávuna at gerast vertur fyri EM endakappingini fyri U17 gentur í 2021. Endakappingin verður størsta einstaka tiltak, sum Fótbóltssambandið hevur staðið fyri. Kappingin verður 30. apríl til 15. mai 2021, og dystirnir verða leiktir á Tórsvølli og Svangaskarði.

Sum partur av EM endakappingin fer FSF nú undir nýggja stuðulsskipan, har feløgini kunnu søkja stuðul til løn til venjarar hjá U15 gentum og U18 gentum. Endamálið við hesi verkætlan er at menna venjingartilboðið til U15 og U18 gentur í feløgunum, umframt at skapa karmar til menning av leikarum til U17 landsliðið við gentum, sum fyrireikar seg til EM endakappingina 2021.

29. august varð skipað fyri fundi við feløgini um menning av kvinnufótbólti í breiðastu merking. Reyðu lampurnar hava lýst í nøkur ár, og støðan við bert 5 liðum í Betri-deildini gjørdi allarhelst, at tankar fóru í gongd um, hvussu vit kunnu betra um støðuna.

Feløgini vórðu kallað inn til ein fund við endamálinum at seta eitt kjak í gongd og í heila tikið hava eitt hugarok um evnið. 50 fólk møttu til fundin.

## Menningararbeiði

FSF arbeiðir alla tíðina við at menna feløgini, og í tí sambandi var ein leiðsluhandbók gjørd í 2019.

Í 2019 varð skipað fyri skeiðum fyri nevndarlimum og øðrum, ið hava ábyrgd av fyrisitingini av feløgunum. Um várið varð skipað fyri skeiði um tryggingar- og fíggjarviðurskifti, og vóru hesi hildin á Tvøroyri, í Klaksvík og í Tórshavn. Um heystið var skeið um skipan av feløgum, har nýggi rektarin á Glasi, Steinbjørn Hardlei, kunnaði um týdningin av millum annað einum greiðum virðisgrundarlagi í felagnum.

Leisturin við fótbóltsmennarum var nakað broyttur í 2019, har størri fokus varð sett á at fáa høvuðs-ungdómsvenjararnar í feløgunum at virka optimalt og av álvara fáa sett menningarætlanina á breddan.

Stjørnufótbóltsskipanin var broytt til í høvuðsheitum at fevna um tvey øki – stuðul til høvuðsungdómsvenjara og stuðul alt eftir tali av skrásettum leikarum. Henda skipan heldur fram í 2020.

Leisturin við mennaraskipanini heldur eisini fram við smávegis tillagingum, har ætlanin er at feløgini framvegis hava ein fast tilknýttan mennara, umframt at tey kunnu biðja um vitjan av øðrum mennara/serfrøðingi.

Sum nakað nýtt bleiv ein verkætlan kallað FSF Úrvalstilboð sett á skinnarar í august 2019. Hetta er tilboð um morgunvenjingar til úrvalsleikarar í aldrinum 16-20 ár, og hevur FSF í hesum sambandi gjørt samstarvsavtalur við nakrar miðnámsskúlar, so leikarar hava plass í tímatalvuni til venjingarnar.

## Framtíðin

Vit hava megnað at skapt góðar kringumstøður fyri føroyskan fótbólt, og fysisku karmarnir eru fyri tað mesa í lagi. FSF hevur megnað at fingið støðug fíggjarkor, og vit hava eisini megnað at økt inntøkurnar. Kortini er tað ein stórur trupulleiki, at fleiri feløg ikki megna at hava ein rakstur í fíggjarligari javnvág.

Inntøkurnar til tey feløg, sum vinna sær plass í Evropa, eru vaksnar sera nógv seinastu árini, meðan inntøkurnar hjá teimum feløgum, sum ikki røkka hesum málum, ikki eru øktar samsvarandi. Hetta hevur ført við sær stóran mun á fíggjarligu umstøðunum hjá feløgunum, og hettar hevur seinnu árini eisini skapt ávísa órógv í føroyska fótbóltsumhvørvinum.

Tað verður ongantíð gjørligt at gera øllum til vildar, men tað verður í hvussu so er neyðugt at hugsa meira um heildina, um vit framhaldandi skulu varðveita mongdina av feløgum í Føroyum.

Vit hava ikki ráð til, at feløg kanska fella frá, og tí má FSF saman við feløgunum í ein ávísan mun syrgja fyri at fremja samhaldsfastar skipanir, sum kunnu vera við til at minka um fíggjarligu gjónna millum feløgini.

Ein annar sera viðkomandi spurningur er, hvussu vit tryggja nýtt tilfeingi av ungum leikarum. Aldurssamansetingin av føroyska fólkinum er broyttur rættuliga nógv, soleiðis at tað í dag eru lutfalsliga færri ungdómar, enn tað var fyri bert fáum árum síðani.

Tað tykist, sum fótbólturin ikki í fullan mun megnar at halda fast í okkara ungdómi. Ein orsøk er sjálvandi, at tilboðini til tey ungu eru munandi meira fjølbroytt í dag. Hesi viðurskifti noyða okkum at taka kappingina upp og syrgja fyri, at tey ungu kenna tað sum eina sjálvfylgu frá ungum árum av at velja fótbóltin sum ítróttargrein.

## Frælsur Ítróttur Føroya

# Royna at seta tey ungu við

*Kappingarnar eru fjølbroyttar og tekniskt krevjandi bæði innan- og uttanlands, og tað skal eitt langt menningararbeiði til innan frælsan ítrótt. Tað er týðandi at seta íðkarar við í góðari tíð*

Frælsur ítróttur fevnir um síðbundnu lopini, kastini og rennikappingarnar á breyt umframt aðrar kappingar av ymsum slagi. Tey seks limafeløgini hjá FÍF, Bragdið, Frælsi, Hvirlan, Hvistan, Roysnið og Treysti gera eitt miðvíst arbeiði fyri at seta ung við til greinarnar á breyt – serliga tey feløgini, sum hava lætta atgongd til breyt.

Talan er tó um sera tekniska ítrótt, og tí skal eitt langt menningararbeiði til. Hópurin av teimum, ið kappast í teimum umleið 10 kappingunum á breyt um árið, er tí avmarkaður. Tó skuldi borið væl til hjá langteinarennarum í øllum aldri at luttikið í longru kappingunum á breyt. Men tey tykjast at halda seg aftur.

Tað eru umleið 20 rennikappingar á vegi um árið. Her er luttøkan høg og kynsbýtið javnt. Tað tykist sum, at føroyski motionisturin veruliga hevur tikið renning til sín. Onkrar av kappingunum hava fleiri hundrað luttakarar og verða útseldar. Ialt fevnir kappingarkalendarin hjá frælsa ítróttinum um meira enn 30 tiltøk, og runnið verður alt árið frá januar til desember.

### Arbeiði á talgilda mótinum

FÍF hevur í eini 10 ár havt el-tíðtøku og málfoto í sambandi við rennikappingar á breyt. Seinasta árið er el-tíðtøka nýtt til mestsum allar rennikappingar á vegnum eisini.

Startlistin verður lagdur á eina serliga heimasíðu beint áðrenn kappingina. Síðani verður tíðin tikin við einum appi á teldli, og úrslitini eru tøk á netinum í somu løtu, ein rennari er komin um strikuna. Hetta hevur lætt munandi um uppgerð av úrslitnum og heiðursmerkjahandan. Eisini er ein chip-tíðtøkupartur knýttur at skipanini, og hann kann nýtast í sambandi við størri tiltøk.

Arbeitt verður somuleiðis við at talgilda úrslita-tænastuna í kasti- og lop-greinunum á breyt.

Seinasta hálva árið er arbeitt við at fáa útgerð til vega, soleiðis at stroymast kann frá tiltøkum í frælsum ítrótti. Nú er komið so væl áleiðis, at útgerðin kann takast í nýtslu í næstum.

### Altjóða avbjóðingar

Tað er ein avbjóðing hjá frælsa ítróttinum, at vit ikki eru viðurkend av altjóða sambandinum fyri frælsan ítrótt, IAAF. Hetta hevur við sær, at okkara evnaríku íðkarar fyrst og fremst kappast á Oyggjaleikum og í ymsum opnum kappingum í grannalondunum. Um tey skulu kappast í kappingum, sum eru undir IAAF, mugu tey luttaka sum danir og harvið lúka tey somu luttøkukrøvini, sum íðkarar í Danmark. Hetta ger gáttina lutfalsliga høga.

Millum kappingarnar, sum føroyska landsliðið luttekur á, eru altjóða kappingarnar í Svøríki, Pallas Spelen innandura og VU-spelen og Øresundspelen uttandura. Frægastu íðkararnir verða sendir av sínum egnu feløgum til DM bæði innandura og uttandura. Harumframt verður luttikið í ymsum opnum kappingum, serliga í Danmark.

| Íðkari | Greinar |
|---|---|
| Alda Sigursdóttir Lamhauge | 100m, 4 x 100m, 4 x 400m |
| Andreas Bjarnastein Antoft | 200m, longdarlop |
| Bára J. Glerfoss | Trýstøkk, 4 x 100m |
| Edna Maria Debes | Longdarlop |
| Elisabet Holm Simonsen | 100m, 200m, longdarlop, 4 x 100m, 4 x 400m |
| Julian Gregersen | 800m, 1,500m |
| Lydia Poula Simonsen | Kúlustoyt |
| Margit Weihe Fríðmundsdóttir | 200m, trýstøkk, 4 x 100m, 4 x 400m |
| Maria Biskopstø | 400m, 800m, 4 x 100m, 4 x 400m |
| Oddvør Josephsen | 400m, 4 x 100m, 4 x 400m |
| Rebekka Fuglø | 800m, 1,500m, 5,000m, 4 x 400m |
| Rigmor Napoleonsdóttir Arge | Hálvmarathon, hálvmarathon liðkapping |
| Sarah Vallin | 10,000m, hálvmarathon, hálvmarathon liðkapping |
| Teresa Fríðriksdóttir Bláhamar | Hæddarlop |
| Tórur Mortensen | 100m, 200m |

## Oyggjaleikir

Oyggjaleikir vóru á Gibraltar seinasta summar, og hetta

| Íðkari | Greinar | Heiðursmerki |
|---|---|---|
| Alda Sigursdóttir Lamhauge | 4 x 400m | Bronsa |
| Elisabet Holm Simonsen | 4 x 400m | Bronsa |
| Lydia Poula Simonsen | Kúlustoyt | Bronsa |
| Maria Biskopstø | 4 x 400m | Bronsa |
| Margit Weihe Fríðmundsdóttir | 4 x 400m | Bronsa |
| Oddvør Josephsen | 4 x 400m | Bronsa |
| Rebekka Fuglø | 800m | Silvur |
| Rebekka Fuglø | 1,500m | Silvur |
| Rebekka Fuglø | 5,000m | Bronsa |
| Rebekka Fuglø | 4 x 400m | Bronsa |
| Rigmor Napoleonsdóttir Arge | Hálvmarathon liðkapping | Bronsa |
| Sarah Vallin | Hálvmarathon liðkapping | Bronsa |
| Sarah Vallin | 10,000m | Bronsa |
| Teresa Fríðriksdóttir Bláhamar | Hæddarlop | Bronsa |

er størsta og mest spennandi ítróttarliga avbjóðingin hjá FÍF. Frælsur ítróttur er ein av stóru ítróttagreinunum á oyggjaleikunum, og sera nógv heiðursmerki eru at vinna. Men kappingin í frælsum ítrótti er sera hørð, og tí skal ofta nógv til fyri at vinna heiðursmerki.

15 frælsítróttafólk luttóku á Oyggjaleikunum á Gibraltar í 2019. Hetta er størsti hópurin í frælsum ítrótti nakrantíð. Tey luttakandi vóru:

Stóri frælsi hópurin megnaði eisini at geva Føroyum eina rúgvu av heiðursmerkjum.

## Førleikamenning

Tað, at frælsur ítróttur hevur so nógvar greinar, sum líkjast frá hvørjum øðrum, ger tað neyðugt at hava skipaða førleikamenning á ymsum mótum – bæði tá talan er um døming av kappingum og venjing av ymsu greinunum.

FÍF arbeiðir við at fáa raðfest førleikamenning í 2020 við at skipa fyri venjaraskeiðum og dómaraskeiðum.

## Umstøður til frælsan ítrótt

Í løtuni eru breytir til frælsan ítrótt á Toftum og í Havn. Í 2018 varð farið undir at gera breyt í Klaksvík eisini, og tað fegnast vit um. Hetta fer at geva Treysti munandi betri umstøður til at íðka kjarnugreinarnar í frælsa ítróttinum. Við tíðini er ynskiligt, at eisini feløgini í Vágum og Suðuroy hava lætta atgongd til breytir.

Næsta stóra takið er at fáa gjørt eina høll til frælsan ítrótt. Sum ein heilársítróttur krevjast nøktandi umstøður, um menningin skal vera støðug. Eins og í øðrum ítróttagreinum er kappingaárið býtt upp. Tey, ið renna mið- og langteinar hava møguleikan at venja og kappast í øðrum greinum – á vegi og í lendisrenning um veturin.

Meiri teknisku og eksplosivu greinarnar hava tað trupult um veturin í Føroyum. Uttanlands venja hesar greinar innandura um veturin, um veðrið er vátt ella kalt. Nærmastu hallirnar hjá okkara íðkarum eru í Íslandi og Danmark, og okkara íðkarar fara eisini har at kappast. Tað er tó eitt ynski hjá frælsa ítróttinum, at vit í Føroyum fáa eina høll at venja og kappast í um veturin.

## Javnstøða

Javnstøða og jøvn rættindi eru natúrligur partur av ítrótti. Um hugt verður eftir luttøku í kappingum, á landsliðum ella í starvsnevndini hjá FÍF sæst, at kynsbýtið er javnt. Hetta er ikki eitt tilætlað val, men ein natúrlig avleiðing av, at javnstøða er.

Tó er neyðugt áhaldandi at hava javnstøðu í huga, ikki bara millum kynini, men eisini millum feløgini, soleiðis at øll feløgini – umboðandi ymsu partarnar av landinum – taka yvirskipaða ábyrgd av frælsum ítrótti, og at tey kenna seg vera við, har avgerðirnar verða tiknar. Í løtuni eru fimm av teimum seks limafeløgunum umboðað í starvsnevndini hjá FÍF.

## Nevndir

### Starvsnevnd

- Sølvi Reinert Hansen, formaður
- Rigmor Napoleonsdóttir Arge, næstforkvinna
- Guttorm Sørensen, kassameistari
- Gunnvá Wardum, skrivari
- Sigga Jacobsen, nevndarlimur
- Kappingarnevnd
- Gunnvá Wardum, forkvinna
- Regin Thomsen
- Niels Jákup Jakobsen
- Søren Antoft
- Rógvi Johansen
- Guttorm Sørensen

### Dómsnevnd

- Arnfinn Johannesen, formaður
- Eyðun Jakobsen
- Andreas Josephsen

### Feløg

- Bragdið
- Frælsi
- Hvirlan
- Hvistan
- Roysnið
- Treysti

Tal av limum: 700

Heimasíða: www.fif.fo

# Fimleikasamband Føroya

## Munagóðar venjingar og víðfevnt virksemi

*Føroyskur fimleikur er á høgum støði, og væl skipaðar venjingar við royndum venjarum síggjast aftur í góðum úrslitum innan eina virkna ítróttagrein*

Aftur í ár vitjaðu donsku Ida-Marie Pedersen og Lasse Smedegaard, sum eru royndir fimleikarar og venjarar. Tey høvdu eitt venjaraskeið, har dentur var lagdur grundvenjing og at brúka spæl í venjingartímanum. Skeiðið eydnaðist væl við fleiri luttakarum, og ætlanin er, at tað verða tvey uppfylgjandi skeið.

Í hesum samstarvinum er ein partur av undirvísingini eisini fyri lesandi á lærararaskúlanum. Á henda hátt kunnu fleiri fáa gagn av skeiðunum, og víst verður, hvussu fimleikur kann brúkast í skúlunum.

### Fimleikafagnaður 2020

Síðst í januar varð Fimleikafagnaðurin hildin í Norðurlandahúsinum. Hetta var 17. ferðin, fagnaðurin var hildin, og í ár var evnið „Kongaríki".

Feløgini, sum luttóku, vóru Fimleikafelagið Støkk, Fimleikafelagið Ljósið, Tvøroyrar Fimleikafelag, Klaksvíkar Fimleikafelag og Havnar Fimleikafelag. Endamálið við fagnaðinum er at vísa breiddina í feløgunum við at lýsa ársins evni við rørslum, ljósi, tónleiki og hugflogi.

Tað var ein góður fagnaður bæði fyri luttakandi feløgini og áskoðararnar. Evnið „Kongaríki" var lýst við fimm sera ymiskum súgningum – søgan um Atlantis, ein kongaligur føðingardagur, leyvanna kongur, kongaríkið Føroyar, Danmark og Grønland og talvheimurin. Hetta gav eina fjølbroytta framsýning við spenningi, stuttleika, nýskapan og hjartanemandi pallmyndum.

Fimleikafelagið Støkk vann Fimleikafagnaðin 2020 við søguni um Atlantis.

Fyri luttakandi feløgini er fagnaðurin gott høvi at savna øll – bæði stór og smá, kappingaríðkarar og breiddaríðkarar á jøvnum føti. Tað er gott fyri felagsskapin í feløgunum, tí allar góðar kreftir eru við í fyrireikingunum, venjingunum og sjálvum fagnaðinum. Dagarnir í Norðurlandahúsinum eru serligir, tí karmarnir eru fantastiskir, og øll eru spent og stuðlandi. Umleið 450 íðkarar, venjarar og hjálparfólk luttaka á Fimleikafagnaðinum.

### Lætt at síggja fimleik

Vit hava í ár lagt okkum eftir at stroyma allar kappingar og størri tiltøk. Hetta hevur eydnast væl, og tekniska støðið og samstarvið við almennu og privatu veitararnar verður betri til hvørja kapping.

Við nýggju heimasíðuni, sum er á veg, eru vónirnar at økja um talgilda tilfarið, sum verður tøkt til fimleikarar, feløg, foreldur og miðlar.

### Úrval og landsliðini í amboð

Mennirnir á landsliðnum í amboð og Rani A. Dalsgarð fingu játtað stuðul frá Úrvali. Hetta er týdningarmikið fyri teir, tí teir nærkast dreyminum um at taka lut í altjóða kappingum. Fleiri av monnunum og kvinnunum eru knýtt at donskum feløgum og danska landsliðnum, har tey eru við til venjingar og royndarkappingar í Danmark.

Í november 2019 var danski landsliðsvenjarin hjá monnum, Marian Rizan, í Føroyum. Hann læt væl at og væntaði, at fleiri av monnunum høvdu møguleika at umboða danska landsliðið í 2020/2021. Hetta sást eisini í steypakappingunum, tá fleiri íðkarar gjørdu nýggj elementir fyri fyrstu ferð í Føroyum.

Til royndarkappingina í februar 2020 gjørdist Astrið Breckmann nr.6 í øllum danska kongaríkinum hjá kvinnunum. Ætlanin var, at fleiri íðkarar skuldu vera við í DM, Cup kappingum og sjálvandi NM og NEC, men tíverri eru fimleikararnir darvaðir av støðuni við covid-19 og óvissuni um, nær kappingarnar verða. Fimleikararnir dríva á við heimavenjingum fyri at halda seg í venjing. Og er tað nakað, sum er størri enn dreymurin hjá hesum ungu fimleikarunum, so er tað viljin.

## Estetisku liðini og órógv í kappingarárinum

Færri lið eru við í ár, men støðið hjá estetisku liðunum er høgt. Serliga í gentubólkinum er ein jøvn og spennandi kapping, ið gevur ábending um fleiri lið, sum møguliga kunnu leggjast aftrat okkara góðu unglinga- og kvinnuliðum.

Tey flestu liðini samstarva við útlendskar venjarar, har teir flestu eru úr Finnlandi – talan er bæði um seriur og venjingarlegur í Føroyum og Finnlandi. Hetta krevur nógv av føroysku venjarunum og íðkarunum, men tað er gevandi at fáa nýggjan íblástur og venjing frá teimum bestu í heiminum.

Feløgini hava verið røsk at senda liðini til altjóða kappingar sum Easter Cup og aðrar Cup kappingar, og tað er eitt stórt arbeiði, sum liggur aftan fyri hesar luttøkur. Tí er tað so harmiligt, at allar altjóða kappingar í ár eru avlýstar vegna covid-19. Tað er ein dyggur smeitur fyri íðkarar og venjarar, men liðini venja framvegis – nú í hvør sínum lag við ymiskum samskiftistólum.

Ætlanin er at avgreiða allar føroysku kappingarnar, so skjótt heimild verður givin til tað, so vit kunnu vísa flotta fimleikin í Føroyum.

## Fleiri feløg

Vit gleðast um, at vit í ár eru sjey feløg í Fimleikasambandinum. Feløgini vísa, at fimleikur er fyri allar aldursbólkar á breiddarliðum og úrvalsliðum. Hetta er ein góð áminning til okkum í Fimleikasambandinum um at varða av øllum fimleikinum.

Við einari samanrenning av nýggjum og eldri feløgum verður høvi at endurskoða ymiskt virksemi og arbeiðishættir, og tað er altíð spennandi. Vit síggja, hvussu feløgini sjálv arbeiða við at menna fimleikin við tiltøkum sum venjaraskeiðum, innanhýsis kappingum og øðrum sosialum tiltøkum umframt tí dagliga virkseminum.

Í hesum døgum verður fimleikurin íðkaður heima við hús, men vit telja niður, til vit aftur kunnu møtast í okkara fimleikahallum og íðka saman.

## Nevndin í Fimleikasambandinum

Starvsnevndin er broytt gjøgnum árið. Sum tiltakslimur gjørdist Anna Margit Thomsen amboðssamskipari fyri Eydnu Danielsen. Jóna Hvannastein kom í nevndina, av tí at Miriam Solmunde, ið var nevndarlimur, varð sett í starv sum skrivstovufólk í desember 2019. Í nevndini eru:

- Gunn Reginsdóttir Hermansen, forkvinna
- Tinna Johannesen, estetiskur samskipari
- Anna Margit D. Thomsen, amboðssamskipari
- Ásvør Lognberg, breiddarsamskipari
- Jóna Hvannastein, nevndarlimur
- Eydna Eyvindardóttir Danielsen, amboðssamskipari (í barsil)
- Miriam Solmunde, skrivstovufólk
- Olivia Due Christiansen, kassameistari

## Feløg og limatøl

- Fimleikafelagið Flog, 142 limir
- Fimleikafelagið Ljósið, 300 limir
- Fimleikafelagið Støkk, 757 limir
- Havnar Fimleikafelag, 1020 limir
- Klaksvíkar Fimleikafelag, 344 limir
- Sandoyar Fimleikafelag, 92 limir
- Tvøroyrar Fimleikafelag, 200 limir

# Hondbóltssamband Føroya

## Føroyskur hondbóltur á altjóða pallinum

*Føroyar hava rokkið málinum um støðugt at vera við í altjóða hondbóltskappingum, men enn manglar altjóða góðkenda høllin til heimadystir á føroyskari jørð. Hondbóltsárið 2019 verður lýst nærri her*

Í fleiri ár hevur aðalmálið hjá HSF verið at luttaka á jøvnum føti við okkara grannalond í altjóða kappingum. Tað gera vit nú – bæði menn og kvinnur eru áhaldandi við í EM- og HM-kappingum, og vit sleppa eisini undan at taka lut í undan-undankappingum, tí vit eru styrkismett hægri.

Føroyar gera veruliga vart við seg í altjóða ungdómshondbólti, har vit í 2019 prógvaðu, at vit eru millum heimsins bestu. Men enn eru avbjóðingar við umstøðunum til altjóða hondbólt í Føroyum, tí eingin høll lýkur treytirnar hjá EHF, og A-landsliðið hjá monnum sleppur ikki at spæla heimadystir í Føroyum, eins og vit ikki hava møguleika at hýsa størri ungdómskappingum.

Niðanfyri verða týdningarmestu hendingarnar í árinum 2019 stutt lýstar.

### Januar

Grønlendska manslandsliðið er á venjingarlegu í Føroyum, og 12. og 13. januar spæla Føroyar og Grønland venjingardystir. Føroysku menninir vinna báðar dystirnar greitt, 37-22 í Havn og 29-19 í Vestmanna. Føroyingurin, Ingi Olsen, er venjari hjá grønlendska landsliðnum.

### Februar

Fleiri og fleiri føroyskir leikarar, bæði kvinnur og menn, eru at síggja í fremru deildunum í okkara grannalondum. Lív S. Poulsen sleppur, bert 17 ára gomul, at royna seg í bestu donsku deildini fyri Ikast-Herning. Tá donsku steypafinalurnar fyri U18 eru, eru tríggir føroyingar á vinnandi dreingjaliðnum og ein føroyingur á vinnandi gentuliðnum. Komandi kappingarár verða føroyskir leikarar at síggja í bestu íslendsku, norsku, donsku og svensku deildunum.

Høllin á Hálsi er fullsett bæði leygar- og sunnudag til stóra steypfinaluvikuskiftið 23. og 24. februar. Heili 12 finalur vera spældar. Kyndil vinnur Faxe Kondi kappingina hjá kvinnum, meðan Neistin vinnur Faxe Kondi kappingina hjá monnum.

### Mars og apríl

Nýggjur kappingarleistur verður royndur í landskappingini hjá monnum, har fýra tey ovastu liðini eftir grundspælið spæla endaspæl við best av trimum hálvfinalum og best av fimm í finalum. Leisturin eydnast væl, og full úrtøka er av dystum við trimum hálvfinalum og fimm finalum. H71 gerst vinnari av Okkara-kappingini hjá monnum, meðan Kyndil vinnur SMS-kappingina hjá kvinnum. Kvinnudeildin verður næsta kappingarár leikt eftir sama leisti, sum menninir leika eftir.

10. apríl tapir A-landsliðið hjá monnum 30-19 móti Ukraina í Kiev, men teir reisa seg aftur tríggjar dagar seinni, tá teir spæla fult upp ímóti ukrainum, hóast teir tapa 27-26. 8.835 áskoðarar eru til heimadystin hjá Føroyum, sum verður leiktur í Royal Arena í Keypmannahavn sama dag, sum Danmark tekur móti Montenegro. Ongantíð áður hava so nógv fólk verið til ein hondbóltslandsdyst hjá Føroyum.

A-landsliðið hjá monnum kann ikki spæla sínar heimadystir í Føroyum og noyðist at spæla sínar EM-undankappingardystir uttanlands. Hetta skyldast, at eingin høll í Føroyum lýkur altjóða krøvini hjá EHF til tílíkar dystir.

### Juni

A-landsliðið hjá monnum tapir 21-24 móti Montenegro í næstseinasta dysti í EM-undankappingini 13. juni. Heimadysturin verður leiktur í Farum. Føroysku leikararnir vísa enn einaferð, at teir kunnu spæla upp ímóti liðum, ið vanliga spæla í EM- og HM-endaspølum. Tríggjar dagar seinni, 16. juni, spælir A-landsliðið hjá monnum seinasta dystin í EM-undankappingini í Aalborg móti Danmark. 4.600 áskoðarar eru til dystin. Heimsmeistararnir úr Danmark vinna 31-24.

### Juli

U17-landsliðið hjá dreingjum ger tað ótrúliga og vinnur European Open í Svøríki framman fyri 23 lond. Føroyska liðið vinnur á stórum hondbóltstjóðum sum Noreg, Spania og Ungarn. Føroyar vinna 36-29 móti Svøríki í

finaluni við 6.155 áskoðarum. Elias Ellefsen á Skipagøtu verður kosin besti leikari í kappingini.

Fólk og vinnulív standa saman um Hondbóltssambandið. Fíggjarliga avbjóðingin at spæla heimadystir uttanlands fær fólk, fjølmiðlar og vinnulív at standa saman um hópfígging til HSF. Á leið ein millión krónur kemur inn.

### Juli

U19-landsliðið við kvinnum er við í EM-kapping í Klaipeda í Litava. Føroyar gerast nummar 5 av 8 liðum í kappingini.

### August

Danska liðið, Bjerringbro-Silkeborg, vitjar í Føroyum, har HSF saman við teimum skipar fyri hondbóltsskúla fyri 160 børnum. Peter Bredsdorff-Larsen, venjari hjá BSV, hevur eisini fyrilestur og heldur eitt venjaraskeið. Føroyska A-landsliðið hjá monnum spælir ein góðan uppvísingardyst móti BSV í Høllini á Hálsi. Úrslitið er 33-25 til BSV.

U17-landsliðið hjá kvinnum luttekur í EM-kapping í Tbilisi í Georgia. Føroyar verða nr. 5 av 10 liðum.

### September

EHF staðfestir, at Føroyar liggja nr. 14 í Evropa á nýggjasta styrkislistanum hjá EHF yvir hondbólt hjá ungdómslandsliðum.

25. september byrjar EM-undankappingin hjá kvinnum. Føroyska a-landsliðið tapir fyrsta dystin 28-16 móti Pólandi í býnum Kwidzyn. Tríggjar dagar seinni spæla føroysku kvinnurnar ein fínan dyst móti Rumenia í Høllini á Hálsi. Tær tapa 25-20 móti Rumenia, sum var í hálvfinaluni til brátt farna HM.

### Desember

Jana Mittún, sum er á føroyska U18-landsliðnum, luttekur vikuskiftið 14.-15. desember í „Respect Your Talent" átakinum hjá EHF í Wien. EHF vil við átakinum stimbra kvinnuliga leiðaraleiklutin í hondbólti og somuleiðis vísa á møguligar yrkismøguleikar, eftir at leikarakarrieran er av.

Á skránni eru m.a. evnini tvíbýtta yrkisleiðin, antidoping, samskiftisvenjing, sosialir miðlar og ítróttalóggáva. Evnini vera viðgjørd saman við fleiri kendum hondbóltsleikarum, sum nú hava stillað hondbóltsskógvarnar, men enn eru virknar í hondbóltinum í øðrum leikluti, m.a. Anja Althaus og Kari Grimsbø.

Jana Mittún kemur á All Star liðið í U18-EM-kappingini í summar, og allar hesar genturnar fáa eina innbjóðing at vera við í átakinum og at vera ambassadørar fyri Respect Your Talent-átakið.

U18-landsliðið hjá monnum er við í Sparkassen Cup í Merzig í Týsklandi. Luttakandi liðini eru, umframt Føroyar, Týskland, Ísland, Holland, Sveis, Hvítarussland, Italia og Saarland, sum er landslutur í Týsklandi. Føroysku U18-menninir enda sum nr. 4 av 8 liðum.

### Starvsnevndin

- Gunn Ellefsen, forkvinna
- Jógvan Emil Nielsen, næstformaður
- Oyvindur Brimnes, nevndarlimur
- Annfinn Brekkstein, nevndarlimur
- Djóni Højgaard, nevndarlimur
- Birgir Kass, Tiltakslimur

### Aðrar nevndir

- Kappingarnevndin: Inga Dahl, forkvinna, Jákup Dam og Beinta Laursen
- Aganevndin: Jens Andrias Vinther, formaður, Hartvig Joensen og Niels Winther
- Dómsnevndin: Súsanna Leo, forkvinna, Kristian Johansen, og Margrið Weihe
- Menningar- og úrvalsnevndin: Oyvindur Brimnes, formaður, Birita Mortansdóttir, Anna Dam, Gilli Wardum og Djóni Højgaard
- Dómaranevdin: Jógvan Emil Nielsen, formaður, Dánjal Samuelsen, Bárður Brimvík og Thomas Juul Thomsen

### Umsiting

- Ári Rouch
- Hallur Danielsen
- Mark Lausen-Marcher

Heimasíða: www.hsf.fo

### Feløg

- Vágs Bóltfelag
- Ítróttarfelagið Argir
- H71
- Neistin
- Kyndil
- Sandavágs Ítróttarfelag/Søljan
- Vestmanna Ítróttarfelag
- Kollafjarðar Ítróttarfelag
- Team Klaksvík
- Stjørnan
- Tjaldur
- Stranda Ítróttarfelag
- Eiði Bóltfelag
- Vípan/B71

Tal av iðkarum: 2600

## Judo Føroyar

# Judo Føroyar hevur sett javnstøðu á breddan

*Javnstøða er vorðin eitt ítøkiligt mál at røkka innan judo-ítróttin, sum hevur lagt eitt hendingaríkt ár aftur um seg við higartil bestu úrslitum á oyggjaleikum*

Seinasta árið hevur verið serliga hendingaríkt á mangar mátar. Vit hava sett hol á menningararbeiðið, ið varð sett á skinnarar seinasta ár, men serliga sermerktur gjørdist endin á kappingarárinum, sum var vendur á høvdið orsakað av korona-kreppuni, ið tók seg upp her til várs.

### Javnstøða

ÍSF hevur heitt á sersambondini at hava javnstøðu millum kynini í huga í sínum arbeiði.

Hesum hava vit tikið av, og á aðalfundi okkara í fjør samtyktu vit broytingar í lógini, sum ásettu, at minst tvey av hvørjum kyni skulu vera í fimmfólka nevnd okkara, og teir tveir tiltakslimirnir skulu vera av hvør sínum kyni.

Av teimum 262, ið iðkaðu judo í vetur, vóru 75 kvinnur og gentur, tað svarar til 28,6 prosent.

Vit vilja av øllum alvi arbeiða fram ímóti meira javnstøðu, eisini í venjingarhøpi, og mál okkara er í fyrsta lagi, at 40 prosent av iðkarunum skulu vera kvinnur og gentur. Hesum vilja vit náa við at fáa fleiri at venja, eins og vit eisini vilja hava fleiri menn og dreingir at venja.

Vit hava tí seinasta heyst valt eina kvinnunevnd, ið skal taka sær av at røkka málinum við fleiri kvinnuligum iðkarum, eins og henda nevndin eisini skal skapa fleiri tilboð og økja um menningina hjá kvinnuligu leikarum okkara. Kvinnunevndin er bara so smátt komin í gongd, men vit fara nú av álvara at seta ferð á hetta arbeiðið.

### Oyggjaleikirnir

Føroyar fingu judo við á oyggjaleikirnar á fyrsta sinni, tá vit skipaðu fyri leikunum í Føroyum í 1989, og árini aftaná var judo ein fastur partur av leikunum. Men á leikunum í 1997 var judo tikið av skránni, og síðani hevur verið sera trupult at fáa okkara ítróttagrein við aftur í leikirnar.

Tað skuldu ganga 10 ár fram til 2007, tá judo aftur var við á Rhodos, og aftur í 2009 sluppu vit at kappast á Álandi. Men so gingu aftur 10 ár, til vit loksins vóru við aftur á Gibraltar í 2019.

Og eftir sum judo er vorðin ein so sjáldsamur gestur á oyggjaleikunum, so valdu vit at leggja rættiliga nógv fyri og hava eitt stórt lið við til leikirnar. Ikki færri enn 15 leikarar – 11 menn og fýra kvinnur umboðaðu Føroyar á Gibraltar.

Úrslitið var eisini avbera gott, tí vit komu heim aftur við 14 heiðursmerkjum – fimm gull, tveimum silvur og sjey bronsu. Hetta er harvið besta úrslitið hjá judo á oyggjaleikunum higartil.

Harafturat høvdu vit ein dómara við til oyggja-leikirnar, og vit ivast so onga løtu í, at Andrias Sumberg var besti dómarin í hesari judokappingini.

### EYOF

Ítróttasamband Føroya hevur seinastu árini miðvíst arbeitt við at útvega okkum limaskap í altjóða Olympisku Nevndini.

Striltið hevur gingið, men loksins eydnaðist í 2019 at útvega Føroyum atgongd til European Games og European Youth Olympic Festival, stytt EYOF.

European Games er ein savning av EM-kappingum fyri nógvar ítróttagreinar saman. Í judo kravdist kvalifisering til kappingina, og tá vit uppdagaðu tað, sóu vit, at her var eingin møguleiki at vera við. Seinni hava vit sæð, at møguleiki var at biðja um wild-card, og nú fáa vit at síggja, um vit skulu royna tann møguleikan næstu ferð.

European Youth Olympic Festival er kapping fyri ungdóm, og í 2019 var tað ungdómur føddur í 2002 og 2003, sum tók lut.

Judo Føroyar valdi at senda Bjarna Kyrri Ólavsson

saman við venjaranum Petur Sigurð Johannesen avstað. Teir luttóku saman við svimjarum úr Føroyum, og vóru annars partur av danska hópinum, sum fór til Baku í Azerbaijan, men sluppu annars at kappast undir føroyskum flaggi.

Bjarni fekk harða kapping, sum hann ongan møguleika hevði at gera nakað við ítróttaliga, men teir fingu eina uppliving fyri lívið. Ætlanin hjá okkum er at taka lut aftur á næstu leikurnum í 2021.

## Feløgini

Vit hava í vetur fingið eitt felag afturat – hesa ferð í Suðuroy. Hetta er ikki fyrsta felagið í Suðuroy, tí tíðliga í 80-unum var eitt felag í Vági eina stutta tíð. Tað gleðir okkum almikið, at vit nú aftur hava felag í Suðuroy, hesa ferð við venjingarhøli á Tvøroyri, men vit vóna, at fólk úr allari oynni fara at taka av hesum frálíka venjingartilboði.

Við hesum nýggja felagnum hava vit nú sjey judofeløg í Føroyum.

Hini seks feløgini hava eisini gjørt sítt ítarsta í vetur, og tað hevur sum heild eydnast sera væl – á leið tað sama sum undanfarna vetur.

## Útbúgving

Judo Føroyar heldur fram við útbúgvingum.

Í vetur høvdu vit dómaraskeið við altjóða dómara. Harafturat eru vit í ferð við at snikka okkara egnu dómaraútbúgving til, soleiðis at vit fáa fleiri lokalar dómarar, eins og vit stuðla dómarum at taka altjóða útbúgvingar.

Venjaraútbúgvingin heldur eisini fram.

Afturvendandi tiltøk

Stóra summarlegan, sum var í Klaksvík á fyrsta sinni í 2018, var eisini í Klaksvík í 2019, har luttakararnir fingu nógv burturúr.

Eisini vanligu kappingarnar hildu fram í vetur – Grand Prix, FM fyri børn og serligu kappingarnar, sum Sunda- og Havnar Judofelag skipa fyri.

Í skrivandi løtu hevur FM fyri vaksin ikki verið orsaka av korona-kreppuni, og óvist er, nær tað verður. Somuleiðis ætlaði Klaksvíkar Judofelag at skipa fyri liðkapping í judo á Norðoyastevnu, men hetta er í løtuni eisini óvist.

At enda takka vit øllum, sum hava tikið eina hond í innan judoítróttin í Føroyum bæði fyri Judo Føroyar og fyri feløgini.

## Nevnd

- Sofus Debes Johannesen, formaður
- Hansa M. Glerfoss, næstforkvinna
- Petur Sigurð Johannesen, skrivari
- Marit J. Magnussen, nevndarlimur
- Sigmundur Johansen, nevndarlimur
- Kristianna á Túgvu, tiltakslimur
- Hendrik Johannesen, tiltakslimur

## Feløgini

- Havnar Judofelag
- Sunda Judofelag
- Skálafjarðar Judofelag
- Klaksvíkar Judofelag
- Vága Judofelag
- Sandoyar Judofelag
- Suðuroyar Judofelag

## Tal av íðkarum/limum

- Havnar Judofelag – 55 íðkandi limir (50 M + 5 K)
- Sunda Judofelag – 39 íðkandi limir (23 M + 16 K)
- Skálafjarðar Judofelag – 38 íðkandi limir (23 M + 15 K)
- Klaksvíkar Judofelag – 69 íðkandi limir (49 M + 20 K)
- Vága Judofelag – 27 íðkandi limir (16 M + 11 K)
- Sandoyar Judofelag – 8 íðkandi limir (5 M + 3 K)
- Suðuroyar Judofelag – 26 íðkandi limir (21 M + 5 K)
- Tilsamans 262 íðkandi limir (187 dreingir/menn + 75 gentur/kvinnur)

PARASPORT FØROYAR

## Parasport Føroyar

# Nógv virksemi innan paraítróttin

*Nú ítróttaárið 2019 er farið afturum, líta vit aftur á árið og gleðast um, at tað aftur í ár hevur verið sera nógv virksemi á paraítrótta-økinum*

Undir slagorðinum og við filminum „Øll kunnu íðka " hevur Parasport roynt at broytt tilvitskuna hjá føroyinginum. Hjá teimum, ið bera brek, snýr tað seg um at halda seg framat, og at avvarðandi, feløg og samfelagið annars ikki ræðast, men taka ábyrgd av at lata øll, ið hava hug at íðka ítrótt, vera við í felagsskapinum

Mangan er vinningurin av at vera atkomulig fyri øll størri enn væntaða avbjóðingin. Øll hava rætt til eitt virkið lív, og fyrimunirnir eru – bæði fyri tann einstaka og samfelagið sum heild – at fólk eru kropsliga virkin. Hetta er til at máta bæði við lívsgóðsku og spardum krónum til m.a. viðgerð og stuðlar.

Málið hjá Parasport er alla tíðina at betra um tilboðini og menna ítróttin, soleiðis at bæði tey, ið íðka til stuttleika, og tey, ið eisini ynskja at royna seg ímóti javnsettum kring heimin, hava møguleika at vera við.

Seinastu árini hevur dentur verið lagdur á eisini at fáa tey, ið hava kropsligt virkistarn, at íðka ítrótt, og vit fegnast um, at vit síggja fleiri ungfólk í hesum bólkinum í ymisku ítróttagreinunum.

Virksemið hevur fevnt víða frá vanligum, regligum venjingum til FM-kappingar í svimjing, boccia, borðtennis og frælsum ítrótti.

### Feløgini.

Vit fegnast um, at fleiri feløg enn nakrantíð hava paraítróttatilboð ella ítróttafólk, ið bera brek, við í sínum virksemi.

Svanur, sum er staðsett í Eysturoy, ið var fyrsta felagið fyri fólk, ið bera brek, helt í 2019 sítt 10 ára hátíðarhald við ítrótti og veitslu. Parasport nýtir høvið til enn einaferð at ynskja Svani tillukku við 10 ára haldinum og blíðan byr í arbeiðinum frameftir.

Gott samstarv er eisini við fleiri onnur sersambond – paraítróttinum at gagni.

### Fjølbroytt virksemi

Luttøka hevur m.a. verið í: Special Olympics World Games, Junior HM í parafrælsum ítrótti, HM í parabadminton, fleiri worldcup og world series kappingum í Triathlon, kappingum í parabadminton, í racerunning legu, special olympics evropakapping, regluligum

venjingum í 10 ítróttagreinum, fundarvirksemi bæði í Føroyum og uttanlands, skúlavitjanum, tiltøkum til rekrutering, Betri para-ítrótta- og kunningardøgum.

Niðanfyri er greitt nærri frá summum av hesum luttøkum.

### Special Olympics World Games.

Í døgunum 14. – 21. mars var Special Olympics World Games 2019 í Abu Dhabi.

Special Olympics var størsta ítróttaliga og humanitera tiltakið í heiminum í 2019 við luttøku av 7.500 ítróttafólkum úr 190 londum í 24 ítróttagreinum, 500.000 áskoðarum og 20.000 sjálvbodnum.

Áðrenn kappingin sjálv byrjaði, vóru okkara ítróttafólk á Host Town vitjan í tríggjar dagar. Host Town vertur hjá Føroyum var Fujairah, ið er eitt av teimum minni kendu Arabisku Emiratunum.

Parasport luttók við 11 ítróttafólkum í fimm ítróttagreinum. Kappingarnar gingu væl, og umstøðurnar í Abu Dhabi og Dubai vóru góðar, og kappingarnar væl fyriskipaðar.

Okkara ítróttafólk stóðu seg væl í kappingunum og komu heimaftur við níggju heiðursmerkjum.

### RaceRunning.

Racerunning er slóðbrótandi ítróttur fyri fólk við skerdari javnvág. Ein RaceRunner er ein serframleidd trýhjólað rennisúkkla uttan pedalir, har javnvágin ikki er ein trupulleiki. Tí er RaceRunning ein uppløgd ítróttagrein til m.a. spastikarar og fólk við gikt.

Ítróttagreinin gevur fólki við breki, ið bert kunnu flyta seg við elkoyristóli, manuellum koyristóli ella gongurollatori, møguleika at flyta seg við egnari megi. Ítróttagreinin gevur sjálvt teimum við um-fatandi breki eina kenslu av at flyta seg frítt og renna.

Í juli 2019 var tann afturvendandi RaceRunner

Camp&Cup hildin á Fredriksberg í Keypmannahavn. Í ár luttók Parasport við einum íðkara og einum venjara.

World Para athletic Junior Championship var í Nottwill í Schweiz í døgunum 15. – 18. august. Levi Hanusarson, ið setti juniormet á 100 metra teininum, umboðaði Parasport Føroyar.

### Paratriatlon

Besta boðið upp á føroyska Paraolympiska luttøku í Tokyo 2020 er Hávard Vatnhamar, ið íðkar triat-lon. Hávard, ið fekk tillutað úrvalsstuðul í 2019, hevur seinastu trý árini miðvíst arbeitt við at vinna seg upp eftir styrkilistanum, ið gevur atgongd til Tokyo 2020.

Teknisk óhapp og skaði høvdu við sær, at 2019 ikki hepnaðist so væl sum vónað, og hetta ávirkaði eisini møguleikan at sleppa til kapping. Hávard endaði árið við at vera millum top-8 í world cup kap-ping í Alanya, og tað gav árræði og mót at halda fram í 2020.

Hávard sigur sjálvur, at hæddarpunktið í 2019 var luttøka í oyggjaleikunum, har hann hóast skerdan kropsførleika kappaðist ímillum tey við ongum breki.

### Parabadminton.

Regluligu parabadminton-venjingarnar, ið byrjaðu í 2018, hildu fram í 2019.

Parabadminton-leikarar vóru við í trimum altjóða kappingum og einari venjingarlegu.

Í juni luttóku tríggir badmintonleikarar í FZ Forza Irish Para Badminton Open 2019.

Úrslitini vóru nøktandi, og kappingin gav luttakarunum týdningarmiklar royndir.

20. august tók Eydna Mouritsen lut í HM Parabadminton í Basel í Sveis. Hon hevur tey seinastu tvey árini vant og kappast í parabadminton í bólkinum fyri koyristólsbrúkarar, og Eydna er fyrsti føroyin-gur, ið hevur verið við í hesi kappingini.

Eisini luttók Eydna í tí árligu parabadmintonkappingini Victor Danmark í Odense dagarnar 15. – 20. oktober.

### INAS Global Games í Brisbane, Australia.

Í døgunum 12. – 19.oktober luttók Signa Vár Dávadóttir Næs Joensen í parasvimji-kapping í INAS Global Games í Brisbane.

INAS stendur fyri „altjóða ítróttasambandið fyri úrvalsítróttafólk við menningarórógvi", og hetta var fimtu ferð, at tey skipaðu fyri Global Games.

Umleið 1000 ítróttafólk úr 50 londum luttóku. Signa Vár kappaðist í 10 svimjigreinum, og hon vann níggju heiðursmerki, trý gull og seks silvur, umframt at hon var nummar tvey í 200 metra blandaðari svimjing.

Signa Vár hevur seinastu nógvu árini svomið við Parasport og Havnar Svimjifelag, og í løtuni gongur hon á ítróttaháskúlanum í Vági, har hon eisini venur.

### Annað virksemi.

Umframt kappingar og venjingarvirksemi hava umboð fyri Parasport luttikið á fleiri venjingarskeiðum og fundarvirskemi bæði í Føroyum og uttanlands.

Limaskapur í fleiri felagsskapum og við fleiri ítróttargreinum kann hava nógv fundarvirksemi við sær, men góða samstarvið við Norðurlond ger, at vit, hóast vit ikki hava møguleika at vera við í øllum, fáa tað týdningarmesta við, og at okkara sjónarmið og virðir verða vard.

### Rekrutering og kunning

Aftur í ár hevur verið skipað fyri serligum tiltøkum við kunning og rekrutering. Á Skránni hava m.a. verið skúlavitjanir, skúlaítróttadagar, serligir ítróttardagar til fólk við virksitarni, „kom og royn" ven-jingum og øðrum.

### Betri Ítrótta- og kunningardagar

Skipað var fyri trimum Betri-ítróttadøgum í 2019. Ein dagur var fyri fólk við cerebral paresu (CP), ein dagur fyri fólk við rørslutarni, og ein dagur var fyri blind og sjónveik.

Endamálið við tiltøkunum var at kunna um møguleikarnar at íðka ítrótt, tá ein ber ávíst brek, og at rekrutera nýggjar íðkarar. Átøkini halda fram í 2020.

### Stuðlarnir

Parasport Føroyar sendir eina serlig tøkk til okkara góðu og trúgvu stuðlar, – Skemmuna, Hotel Haf-nia, Betri, Føroya Landsstýri, ÍSF og Ítróttarvedding, MEGD, Atlantic Airways, Toyota-P/F Reyni Service, stuðlafelagið ÍSB, kommunur, sjálvboðin og mong, mong onnur.

Ein stór tøkk til okkara venjarar, hjálparfólk og okkara ítróttafólk, ið hava lagt nógva orku í arbeiðið, og rokkið framúr góðum úrslitum í farna ári.

Eisini takka vit Svani, Smæruni og Ljósinum fyri stóra arbeiðið áhaldandi at skipa fyri ítrótti fyri fólki við breki. Harumframt senda vit eina tøkk til øll feløgini kring Føroyar, ið gera pláss fyri, at fólk við ymiskum virkistarni kunnu luttaka í virkesminum har.

### Nevnd:

- Jógvan Jensen, formaður,
- Petur Elias Petersen, næstformaður,
- Tóra Norðgerð, skrivari,
- Uni Rasmussen og Anna Gaardlykke, nevndarlimir.
- Eykalimir eru Hans Karl Højgaard og Sonja R. Norðgerð.

Ríðisamband Føroya

# Kappríðingin í áhaldandi menning

*Kappríðing byrjaði fyri umleið 100 árum síðani, og tí telist hesin ítróttur millum elstu ítróttagreinar í Føroyum. Ein ítróttur, sum støðugt setur sær mál og mið*

Hvørt ár verður skipað fyri regluligum FM-kappingum. Fimm kappingarumfør eru í kappríðing, har dystast verður um at hava skjótasta ross í fimm ymiskum greinum. Hetta eru kappingar, ið byrjaðu fyri umleið 100 árum síðani. Kappríðing er sostatt millum elstu ítróttagreinar í Føroyum.

Tað eru fýra ymiskar kappingargreinar – trav, skeið, tvíspor ung og tvíspor vaksin. Sostatt eru 20 FM-kappríðingar á hvørjum ári. Hetta eru alt kappingar, ið Ríðisamband Føroya skipar fyri í tættum samstarvi við feløgini.

Skipað verður eisini fyri kappingum í gonguløgum fyri íslandsross, har eru tríggir ella fýra FM- kappingardagar um árið. Henda kapping er aftur býtt sundur í bólkar fyri tey ymisku gonguløgini og sergreinar innan hesi gonguløg. Vanliga verður kappast í seks greinum – t.v.s. at tað eru minst 18 FM-kappingar árliga.

Hesar kappingar vera fyriskipaðar eftir altjóða lógarverki, tí hetta er grein, har ross, reiðfólk og dómarar hava møguleika at koma út um landoddarnar at dystast.

Um veturin skipa feløgini eisini hvør í sínum lagi fyri kappingum. Tað gongur serliga fyri seg í reiðhøllini í Havnardali, har góðir møguleikar eru fyri hesum.

## Altjóða

Í 2019 vóru trý umboð fyri Føroyar og kappaðust á stóra IceHorseFestivalinum í Danmark. Tað eyðnaðist Elini V. Tindskarð at vinna sína grein T4 – Elin reið á ryssuni Gretu. Harumframt var Heri D. Dahl og dømdi fyri okkum bæði í Noreg og Danmark til stórar kappingar á altjóða støði.

Arbeitt verður framvegis miðvíst eftir at fáa fleiri umboð við til komandi kappingar, hetta er tó í stóran mun tongt at, hvussu fíggjarorkan hjá sambandinum verður frameftir.

## Ungdómsmennarin heldur fram

Nina B. Hansen røkir framvegis starvið sum ungdómsmennari. Feløgini hava verið væl nøgd við hennara leiklut sum mennari hjá teimum ungu. Vónandi verður hetta ein varandi loysn.

## Nýggj spennandi kappingargrein

Sjálvt um ríðing er gomul ítróttagrein, so broytist hon eisini við árinum. Eitt dømi um hetta er kappingargreinin Gæðingakeppni, sum enn ikki hevur fingið føroyskt heiti. Fyri at royna um henda kappingargrein var nakað fyri føroysk reiðfólk, tók RF í 2019 stig til at fáa tveir íslenskar reiðmenn til Føroya at leggja lag á. Hetta eyðnaðist stak væl, og tiltakið endaði við einari royndarkapping.

## Útbúgvingar

Fyri at menna okkara reiðfólk, venjarar og dómarar hevur seinastu árini verið miðvíst arbeitt fyri at fáa bestu fólkini innan ríðiítróttin heim til Føroya at undirvísa. Av tí at Ríðisambandið ikki sjálvt hevur nakra reiðhøll, verður hetta gjørt í tættum samstarvi við tey feløg, ið eiga hallir.

Eisini senda vit eftir tørvi fólk av landinum at nema sær kunnleika innan ríðing og kappingar.

Í desember hildu vit eina workshop fyri at nágreina tøltgreinina innan kappríðing. Í hesum sambandi vóru eisini fingin fólk heim úr Íslandi at standa fyri tiltakinum.

### Vága Ríðingarfelag

- Zacharias R. Jacobsen, formaður,
- Carl Joensen, næstformaður
- Regin Poulsen, kassameistari
- Marian D. Olsen, skrivari
- Egil W. Hansen, nevndarlimur

Limatal: 120

### Føroyskt Íslandsrossafelag

- Heri D. Dahl, formaður
- Símun Skaalum, kassameistari
- Gunnar Grækarisson, skrivari
- Rasmus Patursson, nevndarlimur

Jacklin Durhuus, ítróttaumboð

Limatal: 150

### Føroya Ríðingarfelag

- Hallur Hansen, formaður
- Elspa Petersen, næstformaður
- Bjørn Patursson, kassameistari
- Tummas Pauli av Reyni, nevndarlimur
- Barbara Chaparro, nevndarlimur
- Osvald S. Johanson nevndarlimur

Limatal: 300

### Ríðisamband Føroya

- Brandur í Dali, formaður
- Zacharias R. Jacobsen, næstformaður
- Símun Skaalum, nevndarlimur

# Róðrarsamband Føroya

## Talið av rógvarum er økt

*Týðilig framgongd er at síggja innan kappróðurin. Ódnartøkini gera stóran mun, og inniróðurin hevur givið ungum rógvarum nýggjar møguleikar*

Á summarstevnunum í 2019 vóru 550-600 luttakandi rógvarar á hvørjari av teimum sjey stevnunum. Hetta fegnast vit um og vóna, at jaliga gongdin heldur fram.

Kappingarárið 2019 gekk væl, og allir róðrarnir vóru væl fyriskipaðir av feløgunum. Veðrið var tó ein avbjóðing á nøkrum stevnum, men við góðum samstarvi vóru allir róðrarnir avgreiddir. Á Sundalagsstevnuni darvaði nógvur síðuvindur róðrinum nakað, og á Vestanstevnu var róðurin somuleiðis útsettur í nakrar tímar orsakað av mjørka.

Føroyski kappróðurin hevur verið í framgongd seinastu árini. Tað er ein vøkstur í talinum av luttakarum. Tó eru tað nøkur øki í landinum, har tað er meira virksemi enn aðrastaðni. Í Suðuroy er nógv virksemi í feløgunum í Vági og á Tvøroyri.

Tað eru á hvørjum ári sjey FM-stevnur, ið verða hildnar ymsastaðni kring landið, og sum kappróðrarfeløgini skipa fyri. Hetta verður gjørt eftir føstum mannagongdum sambært galdandi regluverki. Á hvørjari stevnu arbeiða umleið 70 sjálvboðin fólk.

Uttan hesi fólkini hevði tað verið ómøguligt at skipa kappróðurin.

### Ódnartøkini

RSF skipar saman við dómarum hjá RSF og hjálparfólkum hjá feløgunum runt landið fyri Ódnartøkum um várið, áðrenn FM-róðrarnir byrja.

Ódnartøk er kappróður á 140 metra teini. Hesin teinurin ger, at tað er møguligt at hava Ódnartøk á støðum, har kappróður annars ikki vanliga er. Hetta er við til at økja um áhugan fyri okkara tjóðarítrótti, og á henda hátt verður róðrarárið eisini longt.

Ódnartøkini eru sera væl dámd millum rógvarar, og tey verða brúkt sum ein styrkismeting, áðrenn FM-róðrarnir byrja.

Ódnartøkini eru ein stuttleikakapping, har rógvarar fáa vant sínar førleikar í mun til at leggja til start og rógva startin.

### Inniróður

RSF samstarvar við feløgini um inniróður. Tríggjar kappingar vóru í heyst – í Klaksvík, á Glyvrum og í Kollafirði. Hesar kappingar vóru eisini úttøkukappingar til DM í januar 2020, EM í Prag í januar 2020 og HM í París í februar 2020.

Kappingarnar eydnaðust væl, og avgjørt varð at senda átta ung í aldrinum 12 – 17 ár til DM. Tey komu øll heim aftur við sera flottum úrslitum – heili 6 gull-, 4 silvur- og 2 bronsuheiðursmerkir. RSF sendi fimm rógvarar í aldrinum 18 ár og uppeftir til EM og HM. Her vóru úrslitini eisini framúr góð. Heili 4 gull- og 3 silvurheiðursmerkir í EM og 1 gull-, 2 silvur- og

1 bronsuheiðursmerki í HM. Sarita Kristina Hansen gjørdist enn einaferð heimsmeistari í bólkinum lættvekt 30-39 ár.

Úrslitini tala fyri seg og vísa, at vit eru ein kappróðrartjóð og standa okkum væl úti í heimi.

Hóast inniróður er í harðari kapping við aðrar vetrarítróttargreinar, er inniróðurin í vøkstri – serliga hjá teimum ungu. Fleiri nýggir rógvarar vóru við, og hetta fegnast vit um.

RSF skipar eisini á hvørjum ári fyri FM í inniróðri. FM í inniróðri 2019 var í mars.

## Stipendium á lærdum háskúlum

Umframt luttøku í altjóða kappingum hevur inniróðurin aðrar gyltar møguleikar við sær fyri okkara rógvarar.

Taltenleitarar, sum leita eftir serliga evnagóðum ítróttafólkum, eru við til altjóða kappingar í inniróðri kring heimin. Fleiri av hesum talentleitarum hava fingið eygað á ein av okkara rógvarum.

Hesin rógvarin róði so mikið væl í altjóða kappingunum, at fleiri lærdir háskúlar í USA, eitt nú Yale, og ein í Onglandi, hava sett seg í samband við viðkomandi við tilboði um møguligan námsstyrk, stipendium. Hetta er ein avbera góður møguleiki at ogna sær góða útbúgving, og hesin møguleiki hevði ikki verið veruleiki uttan inniróðurin.

Vit fegnast saman við okkara rógvara og vóna, at hetta er nakað, sum eggjar øðrum rógvarum at taka lut í inniróðri.

## NOR-samstarvið

NOR er samstarv millum róðrarsambondini í øllum Norðurlondum. Árliga eru tveir fundir, har umboð fyri RSF luttaka. Annað hvørt ár er ráðstevna, og 6. juli 2019 var henda ráðstevnan hildin í Føroyum. Umboð úr Danmark, Noreg, Svøríki og Finnlandi luttóku á fundinum, og RSF var eisini umboðað. RSF hevði skipað so fyri, at møguligt var at síggja nakað av Føroyum – og sjálvandi at uppliva føroyskan kappróður á Fjarðastevnuni á Strondum.

## Nevndin

Aðalfundurin í Róðrarsambandi Føroya er í mars, og í løtuni manna fimm fólk nevndina. Tey eru: Annika Vilhelmsen Dalsgarð, forkvinna, Elsa Magnussen, næstforkvinnu, Irena Nolsøe, skrivari, Hallgrím Hansen, kappingarleiðari, og Rúni Joensen, nevndarlimur.

## Bátastøddir

Fýra ymiskar bátastøddir vera brúktar í føroyskum kappróðri – 5-mannafør, 6-mannafør, 8-mannafør og 10-mannafør.

5-mannaførini vera brúkt til fimm ymiskar róðrar, har kapping er í barnaróðri fyri gentum og dreingjum upp til 14 ár, gentum og dreingjum í aldrinum 14 til 18 ár umframt kvinnum.

Hjá 6-mannaførunum eru tvær kappingar, menn og kvinnur.

Hjá 8 mannaførunum er ein kapping, har tað oftast bara eru mannfólk, sum rógva. Tað er tó møguligt at hava blandaðar manningar.

Hjá 10-mannaførunum er somuleiðis ein kapping, har tað oftast eru menn, sum rógva. Eins og hjá 8-mannaførum er møguligt at hava blandaðar manningar.

## FM-stevnurnar 2019

- Norðoyastevna í Klaksvík
- Sundalagsstevna í Hvalvík
- Jóansøka á Tvøroyri
- Varmakeldustevna í Fuglafirði
- Fjarðastevna á Strondum
- Vestanstevna í Sørvági
- Ólavsøka í Tórshavn

## Kappróðrarfeløg

Tað eru 32 kappróðrarfeløg í Føroyum, av teimum eru umleið 23 virkin. Hesi eru: Argja Róðrarfelag, Árnafjarðar Róðrarfelag, Froðbiar Sóknar Róðrarfelag, Havnar Róðrarfelag, Hósvíkar Róðrarfelag, Hvalvíkar Streymnesar Róðrarfelag, ÍF Kappróður, Kappróðrarfelagið NSÍ, Kappróðrarfelagið Tindur, KÍF Kappróður, Klaksvíkar Róðrarfelag, Kvívíkar Sóknar Róðrarfelag, Miðvágs Róðrarfelag, Norðdepils Hvannasunds Róðrarfelag, Skála Róðrarfelag, SÍF, Strálan, Suðuroyar Kappróðrarfelag, Sørvágs Róðrarfelag, Róðrarfelagið Knørrur, Vágs Kappróðrarfelag og VÍF Kappróður.

*KAPPRÓÐUR ER VINALAG og SAMANHALD, MEGI og STIMBUR, TREYSTI og ÁHALDNI, kom og ger okkurt COOL, kom og rógv!*

# Súkkling og Triathlon

## Oyggjleikagull í triathlon

*2019 var oyggjaleikaár við fleiri eyka kappingum, sum vóru ein liður í venjingunum til leikirnar á Gibraltar, har vit vunnu gull í Triathlon*

Oyggjaleikirnir á Gibraltar settu sín dám á kappingarárið 2019. Skipað varð fyri fleiri kappingum, sum vóru ein liður í venjingunum til oyggjaleikirnar. Eisini høvdu vit venjingarlegur í Føroyum og uttanlands.

Vit vónaðu at endurtaka góðu úrslitini frá Oyggjaleikunum á Gotlandi, men vit vistu, at hetta fór at vera ein størri avbjóðing á Gibraltar.

Fyrsta kappingin var í triathlon, har okkara Súsanna tíðliga í kappingin vísti, at hon fór at vera við um heiðursmerkini. Í svimjing og súkkling kom hon so langt fram, at tá ið hon fór út á renniteinin, var eingin, sum kundi fylgja við henni. Sostatt tók Súsanna gullið heim.

Súkklukvinnurnar og menninir royndu seg eisini, har Torkil Veyhe og Súsanna Skylv áttu bestu úrslitini – hetta var í einkultstarti við einum 5. plássi.

### Kappingar í Føroyum

Feløgini undir SST hava skipað fyri 7 FM-kappingum – 2 í fjallasúkkling, 2 í triathlon og 3 í roadsúkkling.

Eisini hava feløgini skipað fyri fleiri einstøkum kappingum, har ung og motiónistar kunnu royna seg saman við teimum vaksnu. Fleiri av okkara triathlonfiðkarum hava eisini verið við til havsvimjingar og rennikappingar undir frælsum ítrótti.

Ein nýggj royndi við vetrarkapping í vetraplúmm (fjallasúkkling) og vetracorss (duathlon: súkkling og renning) var eisini roynd og væl dámd av fiðkarum. Hesi vunnu FM:

- Magni Hansen – FM-vinnari 2018 í Triathlon sprint 750m/20km/5km
- Magni Hansen – FM-vinnari 2018 í Triathlon OL-teininum 1500m/40km/10km
- Helgi Winther Olsen – FM-vinnari 2019 Býarsúkkling, menn
- Elsa Bech – FM-vinnari 2019 Býarsúkkling, kvinnur
- Helgi Winther Olsen – FM-vinnari 2019 Einkultstartur, menn:
- Elsa Berg – FM-vinnari 2019 Einkultstartur, kvinnur
- Helgi Winther Olsen – FM-vinnari 2019 Landavegsúkkling, menn

- Elsa Berg – FM-vinnari 2019 Landavegsúkkling, kvinnur
- Helgi Winther Olsen – FM-Fjallasúkkling XCO menn
- Helgi Winther Olsen – FM Fjallasúkkling XCC menn
- Elsa Berg – FM Fjallasúkkling XCC, kvinnur
-

## Uttanlands

Føroyskir súkklarar og triathletar hava eisini roynt seg uttanlands, og teir gera eisini brúk av venjingarlegum uttanlands í vetrahálvuni fyri at gerast betri.

Okkara sterkasti úrvalssúkklari, Torkil Veyhe, koyrir fyri Riwal Readynez Cycling Team.

Fjallasúkkling hevur aftur í 2019 roynt seg uttanlands. Uni Vitalis og Tummas Óli Olsen koyrdu Downhill, har teir vóru við í Donsku Downhill Cup.

Føroyskir triathlon-íðkarar hava luttikið í fleiri kappingum uttanlands. Súsana Skylv og Andrass Joensen hava so góð úrslit, at tey kappast um medaljur í sínum aldursbólki. Besta úrslit var at vinna aldursbólkin.

## 3 feløg eru undir SST

- Føroya Triathlon Felag (FTF)
- Fjallasúklifelagið (MTB)
- Tórshavnar Súkklufelag (TSF)

## Skjótisamband Føroya (SkF)

# Úrslitini á Gibraltar vóru størsta ítróttahending í 2019

*Gull, silvur og oyggjaleikamet gjørdu árið serstakt fyri føroyskan skjótiítrótt, sum er í so stórari menning, at tørvur er á starvsfólki at umsita hesa ítróttagrein*

Oyggjaleikirnar á Gibraltar vóru størsta ítróttahendingin hjá Skjótisambandi Føroya í 2019. Føroysku skjúttarnir vunnu trý gullheiðursmerki og eitt silvurheiðursmerki í seks møguligum kappingum.

Umframt at vinna gull heiðursmerki megnaði Alex Johannesen at seta oyggjaleikamet í Automatic Ball trap, tá hann rakti 140 av 150 dúgvum. Alex vann eisini silvur í OL trap á eini skjótibreyt, sum vit ikki hava í Føroyum í dag.

Í skeet liðkappingini vóru Marius F. Joensen og Tórur Fløtt einaráðandi, og teir vunnu greitt 12 dúgvur framman fyri nummar 2.

Marius vann eisini einstaklingakappingina í skeet, men áðrenn komið var til finaluna, lá hann á einum 2. plássi. Í finaluni vísti hann heimsklassa, og hann læt seg ikki ávirka av keðiligu vindumstøðunum. Hann endaði við at vera fýra dúgvur framman fyri silvurvinnaran, sum lá á 1. plássi áðrenn finaluna.

Góðu úrslitini á oyggjaleikunum vaktu ans. Tá oyggjaleikirnir vóru lidnir, var álit víst Føroyum, við at formaðurin í SkF var valdur í tøkninevndina, sum skal góðkenna og skipa skjótingina á oyggjaleikunum á Guernsey 2021.

### Altjóða viðurkenning

SkF hevur ynski um at luttaka í stórum altjóða kappingum sum t.d. heimsmeistara- og evropameistarakappingum. Útbúgving av altjóða dómarum og venjarum hevur eisini verið á ynskilistanum í fleiri ár. Fyri at fáa atgongd til hetta, krevst limaskapur í ISSF, International Shooting Sport Federation, sum er altjóða felagsskapurin fyri skjóting.

Vit hava fleiri ferðir kannað møguleikan fyri limaskapi, men sambært viðtøkunum fyri ISSF, kundu vit ikki gerast limir, tí limaskapur var bert loyvdur londum, sum hava fullveldi.

Í august 2019 royndu vit kortini at søkja um limaskap, og heilt óvæntað fingu vit svar nakrar dagar seinni, har tey vóru jalig fyri limaskapi, og at tey vóru fús at broyta viðtøkurnar fyri ISSF, so vit kundu fáa limaskap.

Eftir eykaaðalfund í ISSF vóru viðtøkurnar broyttar, og vit fingu munnliga at vita frá aðalskrivaranum og forsetanum í ISSF, at vit nú kundu gerast limir, men nýggj umsókn skuldi fyrst skrivast sambært nýggju viðtøkunum fyri ISSF. Tað er síðani gjørt við m.a. stuðli frá Dansk Skytteunion, Danmarks Idrætsforbund og ÍSF.

Bíðað verður nú í spenningi eftir svari upp á umsóknina, og vit hava fingið at vita, at hon verður viðgjørd á fundi í Tokyo, samstundis sum OL verður.

Í sambandi við umsóknina hevur SkF fingið samband við fleiri leiðandi fólk innan altjóða skjótiítróttin. Heilt óvæntað er, at næstan øll, sum vit hava prátað við, kenna og vita okkurt um Føroyar. Føroyskir skjúttar er eisini bodnir til Finnlands, Fraklands, Noregi og Italia at vera við í kappingum og venjingarlegu, sjálvt um vit ikki enn hava fingið limaskap.

### Kappingar í Føroyum

Í 2019 vóru 24 kappingar avgreiddar, og samlaða luttakaratalið var 295 skjúttar.

Skipanin er, at limafeløgini fyriskipa og avgreiða kappingarnar vegna SkF, ið afturfyri brúkar úrslitini frá kappingunum sum grundarlag undir landsliðsúttøku, úrvalsvenjingum, Føroya Cup og Grand Prix kappingini.

Einasta altjóða kappingin í Føroyum í løtuni er Tórshamar Open, sum verður hildin vikuskiftið undan ólavsøku. Luttakarar úr Danmark og Íslandi hava verið við í hesi kappingini. Í 2020 verður kappingin 25.-26. juli.

## Skjótibreytir og limafeløg

Í dag eru skjótibreytir í Vestmanna, Tórshavn (á Sandvíkum) og í Sundalagnum.

Nýggj trap breyt verður gjørd í Leirvík, og miðað verður eftir at hava kapping á breytini á ólavsøku 2020.

Tórshavnar Kommuna hevur sett pening av at fáa breytina á Sandvíkum nútímansgjørda og uppstigaða, og eftir ætlan verður spakin settur í í 2020. Venjing er á breytini alt árið –sunnudagar og hóskvøld summarhálvuna. Tað gleðiliga er, at áhugin fyri skjóting er nógv vaksin, og nýggj móttøkuskipan er sett í verk at taka ímóti nýggjum skjúttum. Eitt av endamálunum við skipanini er at fáa kvinnur at iðka ítróttaskjóting.

Í Sundalagnum er arbeiðið at flyta breytina longur niðan frá fjøruni liðugt. Felagið umhugsar at skifta kastimaskinurnar og at hegna økið inni. Venjing er á breytini alt árið, og útlit eru fyri, at 1-2 nýggir skjúttar leggjast aftrat ítróttaskjótingini í Sundalagnum.

Í Vestmanna er felagshúsið um at verða liðugt, men skjótingin hevur ligið still um veturin, tí frídagarnir hava verið brúktir til at gera felagshúsið liðugt. Felagið hevur tó havt tiltøk fyri ungum skjúttum niður í 14 ára aldur.

## Vápnapass

SkF hevur í fleiri ár arbeitt fyri at fáa vápnapass til føroysku ítróttaskjúttarnar, og nú verður uppskot borið í løgtingið um at tillaga føroysku vápnalógina, so greiðar reglar eru í sambandi við at ferðast við byrsu úr Føroyum.

Eftir ætlan verður eitt nýtt føroyskt vápnapass kunngjørt, og SkF hevur gjørt uppskot til, hvat kann standa á einum føroyskum vápnapassi. Kemur uppskotið ígjøgnum, verður tað munandi lættari hjá føroysku ítróttaskjúttunum at ferðast til kappingar og venjingarlegur uttanlands.

## Skrivstovuhjálp

SkF er eitt virkið felag, og altjóða arbeiðið, samskipan umframt samskiftið við myndugleikar og fyriskiparar v.m. fyllir nógv í gerandisdegnum. Á komandi fíggjarætlan fyri SkF er ætlanin at seta pening av til eitt starvsfólk, sum skal røkja nevndu uppgávur.

## Starvsnevnd

- Esmar Joensen, formaður
- Marius F. Joensen
- Jógvan Egholm
- Finn Ludvig
- Jónstein Johannesen

## Limafeløg

- Veiðifelagið Byrsumúli (VBM), Tórshavn
- Vestmanna Byrsufelag (VBF), Vestmanna
- Eysturskot (EYS), Leirvík
- Sunda Byrsufelag (SBF), Norðskáli

Samlað limatal: 180

Svimjisamband Føroya

# Nógv svimjing bæði úti og heima

*Meira enn 40 svimjistevnur bæði í Føroyum og uttanlands vóru á skránni hjá føroyskum svimjarum í 2019. Uttanlands vunnu vit meira enn 120 heiðursmerki*

Føroysku svimjifeløgini og SSF skipaðu í 2019 fyri tilsamans 20 svimjistevnum í svimjihøll – harav trimum meistarastevnum og einari norðurlendskari meistarastevnu. FINA góðkendi FM á langgeil 2019 sum úttøkustevnu til HM 2019 og OL 2020 við føroyskum yvirdómara og startara.

## Uttanlands og altjóða

Í 2019 kappaðust føroyskir svimjarar í øllum førum 1.751 ferðir uttanlands og altjóða á minst 23 stevnum, og vit vunnu minst 126 heiðursmerki tilsamans – 46 úr gulli, 40 úr silvuri og 40 úr bronsu. Tá telja vit eisini heiðursmerki, sum útisetar vunnu á stevnu í Danmark.

Tað er serliga vert at nevna, at føroyska svimjilandsliðið vann næstflest heiðursmerki av øllum á Oyggjaleikum 2019, umframt at Signhild Joensen og Vár E. Eidesgaard vunnu gullheiðursmerki á Norðurlendsku Meistarastevnuni í 2019.

Størstu altjóða stevnur vóru HM á langgeil 2019 í Gwangju, har Signhild Joensen, Alvi Hjelm og Óli Mortensen vóru við, og EM á stuttgeil 2019 í Glasgow, har Signhild Joensen, Vár E. Eidesgaard og Róland Toftum tóku lut.

Harumframt var søguliga luttøkan á European Youth Olympic Festival 2019 í Baku, ið var fyrstu ferð, at Føroyar sluppu at luttaka undir egnum flaggi á stevnu í OL-høpi. Føroysku svimjararnir vóru Elisabeth Erlendsdóttir, Kristina í Skála, Rebekka Trygvadóttir, Ronja Ró í Dímun og Bartal E. Eidesgaard.

## Landsliðslegur

SSF skipar regluliga fyri landsliðslegum serliga fyri at samansjóva teir hópar, sum skulu uttanlands at kappast. Í 2019 var ein heilt serlig hending, tá ið ungarska heimsstjørnan Katinka Hosszu kom til Vágs at venja, har hon eisini saman við venjara sínum greiddi føroyskum svimjarum frá úrvalslívinum.

## Lívbjarging

Lívbjargingarskipan SSF koyrir í fastari legu við at fyriskipa skeið og royndir fyri lívbjargarar runt landið, sum eru knýttir av svimjifeløgum, svimjihallum og almennum stovnum so sum skúlum og barnagørðum. Í mars 2019 fingu vit atlimaskap í altjóða lívbjargingarsambandinum, ILS, umframt í evropeiska lívbjargingarsambandinum, ISLE.

## Svimjiførleiki

Føroyar eru við SSF eitt av trimum pilotlondum í verkætlanini „Learn to Swim, Prevent Drowning" hjá evropiska svimjisambandinum, LEN. Høvuðsvirksemið í 2019 var – saman við øðrum – ein vitjan hjá ES-forsetanum í Brússel at greiða frá tørvinum at betra svimjiførleikan í Evropa.

## Útgerð

SSF hevur í 2018 og 2019 gjørt íløgur í útgerð til test av svimjarum og annað – serliga við stuðli frá altjóða svimjisambandinum, FINA. Í 2019 vóru keypini útgerð at máta iltupptøku og til greining av svimjarum, meðan teir svimja. Harumframt vóru keypt grafikkloysn til størru stevnurnar og tíðtakingarútgerð til stevnur í skúlahyljum.

## Útbúgving

SSF sendi í 2019 venjarar á venjaraskeið hjá FINA í Íslandi, so at Føroyar í februar áttu millum heimsins

fyrstu venjarar við FINA-prógvi, og í september áttu vit venjarar millum heimsins fyrstu høvuðsvenjarar við FINA-prógvi. Í mars skipaði SSF harumframt fyri FINA-dómaraskeiði í Tórshavn – umframt at skipað var fyri egnum svimjiskúla og dómaraskeiðum eftir tørvi.

## Stuðlar

Atlantic Airways er langtíðar høvuðsstuðul hjá Svimjisambandi Føroya, umframt at nógvir aðrir trúgvir stuðlar eru serliga í sambandi við sjónvarpaðu Føroyameistarastevnuna á stuttgeil.

## Bygnaður

SSF verður í stóran mun rikið beinleiðis av starvsnevndini og aðalskrivaranum við hjálp frá nevndarlimum og øðrum eldsálum í svimjifeløgunum og svimjiumhvørvinum annars. Tað mesta er sjálvboðið og óløgnt arbeiði, men aðalskrivarin er í hálvum starvi, og eisini verður samsýnt fyri t.d. lán av venjara til landsliðsuppgávur og til daglangar uppgávur so sum at halda skeið.

## Starvsnevnd

Starvsnevnd SSF var fram til aðalfundin í juni 2019: Rókur í Jákupsstovu, formaður, Anita Ryggshamar Nysted, næstformaður, Anni á Hædd, skrivari, Sørin S. Djurhuus og Eyðun Húsgarð, nevndarlimir, umframt Dann Hjelm, varalimur.

Á aðalfundin í juni 2019 vóru valdir í nevndina: Rókur í Jákupsstovu, formaður, Símun Michael Sørensen, næstformaður, Ólavur Hansen, skrivari, Sørin S. Djurhuus og Eyðun Húsgarð, nevndarlimir, umframt Dann Hjelm, varalimur.

## Aðalskrivari

Aðalskrivari í SSF er Djóni Dalsgarð.

## Dómsnevnd

Í dómsnevndini í SSF sita Anni á Hædd, formaður, Poul Poulsen og Jórun Eið Johannesen, nevndarlimir.

## Svimjifeløg

Seks svimjifeløg eru virkin í SSF: Fuglafjarðar Svimjifelag (58), Havnar Svimjifelag (276), Svimjifelagið FLOT (115), Svimjifelagið Reysti (48), Suðuroyar Svimjfelag (92) og Ægir (114). Limatølini eru í klombrum, og tilsamans hava feløgini 703 limir.

## Føroysk met og juniormet

Føroyskir svimjarar settu tilsamans 26 føroysk met og 3 føroysk juniormet í 2019:

- Vár E. Eidesgaard (2001), HS – 11 føroysk met
- Róland Toftum (1998), SuSvim – 3 føroysk met
- SSF menn (1996), SSF – 3 føroysk met
- SSF kvinnur (2000), SSF – 2 føroysk met
- Rókur Trygvason (2000), Ægir – 1 føroyskt met
- HS menn (1996), HS – 2 føroysk met
- HS kvinnur (2001), HS – 1 føroyskt met
- SSF mix (1996), SSF – 1 føroyskt met
- Ægir kvinnur (2000), Ægir – 1 føroyskt met
- Signhild Joensen (2000), Ægir – 1 føroyskt met*
- SuSvim dreingir (2001), SuSvim – 2 føroysk juniormet
- HS dreingir (2002), HS – 1 føroyskt juniormet

## Altjóða virksemi

- 30. januar: NSF aðalskrivarafundur í Stockholm
- 20. mars: LEN LSPD fundur í Brússel
- 10. mai: NSF aðalfundur í St. Pætursborg
- 11. mai: LEN kongress í St. Pætursborg
- 19. juli: FINA kongress í Gwangju
- 2. – 4. oktober: NSLF-fundur í Stockholm
- 5. – 10. oktober: WCDP í Durban
- 6. desember: NSF fundur í Glasgow

## Onnur SSF-tiltøk

- 17. – 19. januar: VO2 Master test á iNOVA
- 28. januar – 1. februar: FINA venjaraskeið í Reykjavík
- 17. februar: Svimjiskúlaskeið í Vági
- 8. – 9. mars: SSF ráðstevna í Vági
- 15. – 16. mars: Landsliðslega í Vági
- 22. – 24. mars: FINA dómaraskeið í Tórshavn
- 8. – 10. apríl: Landsliðslega við Katinku Hosszu í Vági
- 18. – 22. september: FINA høvuðsvenjarskeið í Reykjavík
- 26. oktober: WinGrodan-skeið í Tórshavn

## Billardsamband Føroya

# Billard í Føroyum kann mennast við útlendskum avbjóðingum

*Føroyskir billardspælarar royndu seg ímóti spælarum, sum eru millum teir bestu í Danmark, og slíkar avbjóðingar eru vegurin fram fyri føroyskt billardspæl*

Johnny Hansen, sum kanska er besti billardspælari nakrantíð, og B67 Herning komu til Føroyar at spæla billard í mai 2019. Skipað var fyri kappingum í Fuglafirði og Klaksvík. B67 Herning vann á føroysku spælarunum.

Johnny Hansen hevði venjingar við føroyskum billardspælarum, og hann spældi eisini ein dyst ímóti okkara besta billardspælara.

Í heyst ætlar BiSF aftur at senda eitt lið til Danmarkar at kappast, men hesar fyrireikingar eru ikki byrjaðar enn. Vit trúgva uppá, at billard kann mennast í Føroyum, um vit hvørt ár fáa avbjóðingar uttanífrá.

### Kappingin

Í liðkappingini eru 3 deildir. Í 1. og 2. deild eru seks lið í hvørjari deild, og í 3. deild vóru fimm lið hetta kappingarárið. Í øllum deildum spæla liðini tvær ferðir ímóti hvørjum øðrum – ein heimadyst og ein útidyst. Kappingarnar gingu væl í 2018/19.

Orsakað av korona-støðuni er eingin kapping liðug í skrivandi stund fyri 2019/20. Tó er tað gleðiliga hent, at eitt nýtt felag er komið við í liðkappingina. Menn kring Skálafjørðin hava stovnað eitt felag, Skálafjarðar Billardfelag. SFBF hevur ikki fingið egin hølir, men felagið hevur keypt eitt borð.

SFBF er í samráðingum við Runavíkar kommunu um hølir. SFBF hevur vant og spælt í Fuglafirði, og felagið hevur tvey lið við í 3. deild.

### Úrslit 2018/19

- 1. deild vann BFF, TBF var nummar 2, og KLBF var á 3. plássi.
- 2. deild vann HaBi 3, HaBi 2 var nummar 2, og BFF3 var á 3. plássi.
- 3. deild vann HaBi 4, TBF3 var nummar 2, og HaBi5 var á 3. plássi.

Kappingin fyri einstaklingar í 2019 var spæld í Fuglafirði. Jákup L. Baldvinsson gjørdist føroyameistari í 2019, Dánjal P. Joensen var á 2. plássi, og Jens K. Feilberg var nummar 3.

Átta persónar eru við í kappingini at gerast Føroya besti billardspælari. Seks teir fremstu á styrkislistanum frá liðkappingini koma beinleiðis víðari til finaluumfarið. Síðani er frí tilmelding, har kappast verður um tvey tey seinastu plássini.

Haldor Holm Cup 2019 var sum altíð í Klaksvík. Vinnari var Jákup L. Baldvinsson, BFF, nummar 2 var Hallur Joensen, KLBF, og nummar trý 3 gjørdist Danjal P. Joensen, BBF.

## Borðini

BiSF avgjørdi á fundi í 2018, at øll borðini í Føroyum skulu setast í stand.

TBF hevur fingið eitt nýtt borð, og øll borðini kring landið fingu skift dúk á bandum og borðum. Nakrir bandar máttu sendast til Danmarkar til umvælingar.

Tað er sera umráðandi, at øll borðini hava ein høgan standard, tá ið kappast skal á teimum. Billard í Føroyum er í menning, og tað leggjast nýggir spælarar afturat hvørt ár – tað gleðast vit um í BiSF.

## Nevndin

Nevndin í Billardsambandi Føroya: Urbanus K. Olsen, Jógvan Jørgensen og Páll Heri Nolsøe.

## Limafeløg og limatøl 2019

- Billardfelag Fuglafjarðar (BFF) – 17 limir + 3 heiðurslimir
- Havnar Billardfelag (HaBI) – 14 limir Tvøroyrar Billardfelag (TBF) – 21 limir Klaksvíkar Billardfelag (KLBF) – 21 limir Skálafjarðar Billardfelag (SFBF) – 7 limir

# Boksisamband Føroya

## Eitt upplivingaríkt boksiár

*2019 var eitt upplivingaríkt boksiár við meira enn 40 dystum, steypum, heiðurmerkjum og fyrsta byrjanarmeistaraheitinum*

Føroyskir boksarar tóku ágrýtnir lut á venjingarlegum og í kappingum í 2019, sum eisini gjørdist árið, har Føroyar á fyrsta sinni tóku lut í byrjanarmeistaraheitinum, Dansk Begyndermesterskaber. Føroyar vunnu bæði gull og silvur.

Boskisamband Føroya vil javnstøðu, men vit hava ikki gjørt nakað ítøkiligt fyri at fáa fleiri kvinnur virknar í nevnd felagsins. Sama nevnd hevur sitið tey seinastu árini, av tí at eingin annar hevur víst áhuga í nevndararbeiði.

Niðanfyri er ein gjøgnumgongd av boksiárinum 2019 skipað í tíðarrað.

### Februar – diplom-venjingarlega

Diplom-venjingarlega var í Helsinge. Nóa Jacobsen, Jonathan Malaikev, Benjamin Baadsager, Andreas Dam Poulsen og Teitur Jákupsson vóru við. Tórshavn Boksing fekk trý diplom, og Teitur Jákupsson fekk steyp fyri at vera besti boksari.

### Mars – opið hús

Skipað var fyri framsýning, har útgerð var sýnd fram. Í hesum sambandi vóru fýra framsýningardystir eisini á skránni, umframt at ein gjøgnumgongd var av ymiskum venjingarháttum.

### Apríl – Helsinge, Keypmannahavn og Vordingborg

Venjingarlega var í Helsinge, diplomdystir vóru í Keypmannahavn, og amatørdystir vóru í Vordingborg. 10 boksarar og tríggir venjarar vóru við.

Fimm amatørdystir vóru á skránni. Teitur Jákupsson, Jonathan Malaikev, Benjamin Baadsager og Andreas Dam Poulsen vunnu sínar dystir. Levi Hammer tapti ein sera tættan dyst.

Fimm diplomdystir vóru eisini á skránni. Vit fingu trý diplom við heim, og tveir dystir vóru blástir av.

### Apríl – byrjanarmeistaraheitið

28. apríl vóru Føroyar á fyrsta sinni í føroyskari boksisøgu umboðaðar í Dansk Begyndermesterskaber. Tríggir boksarar vóru við. Teitur Jákupsson vann gull, Jonathan Malaikev vann silvur, og Andreas Dam Poulsen tapti dystin um 3. plássið. Talan var um eitt ótrúliga gott úrslit.

### Mai – Faroe Fight Night.

20 boksifeløg vóru við á Faroe Fight Night. Tríggir VIP profboksarar tóku lut – Jimmy Bredahl, Oliver Meng og Oliver Møllenberg.

110 ítróttafólk komu úr Danmark til føroyska tiltakið, talan var um venjarar, boksarar, dómarar og kampleiðarar.

13 amatørdystir vóru á skránni, har tveir úr Tórshavn Boksing boksaðu og vunnu. Tað vóru Bjartur René Nielsen og Benjamin Baadsager.

Tríggir boksarar úr Tórshavn Boksing boksaðu diplomdystir. Tað vóru Solveig Arge, Sólrun Magnussen og Jonathan Malaikev, sum øll fingu diplom.

### Juni – kappingarárið 2018/19

Kappingarárið 2018/19 var gjørt upp í juni. Vit boksaðu tilsamans 33 diplomdystir, og í hesum dystum fingu vit 21 diplom og tvey steyp. Vit vunnu átta av tilsamans 12 amatørdystum.

mynd: Ólavur Frederiksen

Í byrjanarmeistaraheitinum vunnu vit eitt gull- og eitt silvurheiðursmerki.

Tórshavn Boksing læt tvey steyp fyri bestu avrik hjá monnum og kvinnum. Nóa Jacobsen og Solveig Arge fingu avrikssteypini.

### September – Vordingborg boxcamp 2019

20. september var Tórshavn Boksing umboðað á Vordingborg boxcamp, har føroyska felagið hevði fýra diplomboksarar og fýra amatørboksarar við.

Í diplomdystunum fingu Nóa Jacobsen, Sigurbjørn Joensen, Solveig Arge og Magni Vang diplom og medalju.

Levi Hammer, Benjamin Baadsager, Teitur Jákupsson og Jonathan Malaikev boksaðu í amatørdystunum, og teir taptu allar sínar dystir.

### Oktober – venjing og diplom

25. oktober vóru venjingarlega og diplomdystir í Helsinge, har Sigurbjørn Joensen og Nóa Jacobsen fingu diplom og medalju.

### Desember – venjingarlega og amatørdystir

6. desember var venjingarlega í AK Falken í Frederikssund, og diplom- og amatørdystir vóru í Nykøbing Sjælland.

Solveig Arge fekk diplom og medalju, men hesa ferð fingu Sigurbjørn Joensen og Nóa Jacobsen einki diplom. Jónathan Malaikev vann sín amatørdyst.

### Nevndin í Boksisambandi Føroya

- Martin Meng Wojciechowski, formaður
- Jógvan Joensen, næstformaður
- Beinta Tórsdóttir Johannessen, kassameistari

Mail: boksisambandforoya@gmail.com

### Nevndin í Tórshavn Boksing

- Bjartur René Nielsen, formaður
- Jógvan Joensen, nevndarlimur
- Martin Meng Wojciechowski, nevndarlimur
- Beinta Tórsdóttir Johannessen, kassameistari
- Nurlan Malaikev, nevndarlimur
- Heðin Tórstún, nevndarlimur

Heimasíða: torshavnboksing.fo

Limatal 55

# Dartsamband Føroya

## Dart í stórari menning

*2019 var fyrsta heila árið, Dartsambandið hevði limaskap í ÍSF, og hetta var eisini árið, Dartsamband Føroya trein á altjóða pallin sum nýggjur limur í World Darts Federation*

Alsamt fleiri íðkarar taka lut í dartkappingunum kring landið, og tey átta dartfeløgini hava tilsamans 150 virknar limir.

Dartsambandið gjørdist limur í ÍSF á heysti 2018, og sostatt var 2019 fyrsta heila árið við ÍSF-limaskapi. Aðalfundurin varð hildin í ÍSF-húsinum 31. juli 2019, og starvsnevndin var afturvald.

Eitt dartfelag aftrat er stovnað síðan síðstu ársfrágreiðing. Tað er D9 á Skála. Hetta felagið er longu vorðið eitt av virknastu dartfeløgum í landinum við nógvum limum, ið trúliga møta til venjingar og kappingar.

Tað hevur verið ein munandi vøkstur í talinum av luttakarum í teimum ymisku kappingunum hetta kappingarárið, sum byrjaði í september 2019. Higartil hava 112 spælarar tikið lut í annaðhvørt liðkappingini ella ranking-kappingum.

### Altjóða limaskapur

Í 2018 byrjaði arbeiðið at fyrireika umsókn um limaskap í World Darts Federation. Umsitingin hjá ÍSF hjálpti til við neyðugum váttanum. Ein partur av árligu játtanini frá ÍSF var eisini oyramerktur til hetta arbeiðið. Umsóknin varð send eftir aðalfundin hjá Dartsambandinum í juli 2019.

Starvsnevndin í World Darts Federation góðtók formligu viðurskiftini í umsókini og veitti Dartsambandi Føroya fyribils limaskap.

Endalig støða skuldi takast til føroyska limaskapin á aðalfundinum í World Darts Federation í Rumenia 7. oktober 2019, har HM í dart fyri lið varð hildið ta somu vikuna. Hans Eivind Olsen, formaður, og Kristian Joensen, næstformaður, vóru á aðalfundinum, har teir løgdu fram um Føroyar og føroyskt dart.

Aðalfundurin skuldi eisini taka støðu til umsóknir frá Slovenia, Monaco, Singapore og Kroatia. Eftir framløgurnar atkvøddu øll limalondini um, hvørt hesi fimm londini skuldu fáa limaskap í World Darts Federation. Eftir umleið 10 minuttum vóru umsøkjara-londini biðin

um at koma inn aftur í fundarhølið, har øll londini, íroknað Føroyar, fingu tillutað fullan limaskap.

Limaskapurin í World Darts Federation hevur við sær, at Føroyar hava rætt at taka lut í komandi EM- og HM-kappingum. Limaskapurin ger tað eisini møguligt at halda altjóða ranking-kappingar í Føroyum.

Á hvørjum ári kappast dartspælarar í altjóða kappingum, men hetta kappingarárið hevur verið eitt av teimum lakastu í so máta. Spælarar vóru tó við í kappingum í Danmark og Íslandi.

### FM í dart

27. apríl 2019 var FM-dagurin í dart í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. 32 menn og 8 kvinnur kappaðust um FM-heitini í einmansleiki. Eisini spældu fýra pør um føroyameistaraheitið í tvímansleiki. Haraftrat var finalan í liðkappingini eisini spæld hendan dagin. Finalur og hálvfinalur vóru sendar beinleiðis á Rás1 hjá Televarpinum.

Føroyameistarar á FM-degnum vóru:

Einmansleikur menn Petur Thomsen (D16)

Einmansleikur kvinnur Birthe Sikivat (ADF)

Tvímansleikur Hans Eivind Olsen og Heri Kallsoy (DS/D9)

Liðkappingin Havnar Dartfelag

### Kappingarárið 2019/2020

Kappingarárið í dart gongur frá september til mai.

Í liðkappingini hava átta lið spælt í vetur. Kappingin hevur verið skipað í fýra umførum, har allir dystirnir vóru spældir á sama stað. Liðkappingin endaði 9. mars, og Havnar Dartfelag gjørdist Føroyameistari triðja árið á rað.

Hesi somu fýra vikuskiftini, sum liðkappingarnar vóru spældar, hava eisini verið kappingar í tvímansleiki. Kappingarnar hava givið stig til ein styrkilista, har átta tey bestu pørini eru komin víðari til FM-endaspælið.

Í einmansleiki hava fimm av sjey kappingum verið. Eisini hesar sjey kappingarnar geva stig til ein styrkilista, har topp-32 hjá monnum og topp-8 hjá kvinnum sleppa at kappast um FM-heitið í einmansleiki.

Umframt kappingarnar í einmansleiki og tvímansleiki skipar Havnar Dartfelag fyri kappingum í blandaðum tvímansleiki.

Komandi kappingar

Føroyski limaskapurin í World Darts Federation hevur broytt viðurskiftini hjá dartspælarum í Føroyum munandi.

Fyrstu altjóða skrásettu kappingarnar í dart á føroyskari jørð skuldu verða 14. og 15. mars 2020. Talið av luttakarum var komið upp um 120, harav 53 útlendingar, tá Dartsambandið í evstu løtu noyddist at útseta kappingarnar orsakað av vandanum fyri Corona-smittuni. Kappingarnar verða ístaðin spældar 24. og 25. oktober 2020.

Landsliðini hjá kvinnum og monnum skuldu eftir ætlan verða við í NM-kappingini fyri lið í Esbjerg mánaðarskiftið apríl/mai. Henda kappingin var eisini útsett av Corona-smittuvanda, og NM í dart verður í staðin á vári 2021. NM er á skránni annaðhvørt ár.

Landsliðini hjá kvinnum og monnum eru eisini meldað til EM fyri lið. EM verður spælt í Spania mánaðarskiftið september/oktober. Enn er henda kappingin ikki útsett. Vónandi fer at bera til at spæla EM í dart sum ætlað, so okkara leikarar fáa minst eina av teimum altjóða avbjóðingunum, sum vóru á skránni í 2020.

Til ber at lesa meir um dart í Føroyum á Facebook-vanganum hjá Dartsambandi Føroya og á heimasíðuni www.dartfo.com

### Nevndin í Dartsambandi Føroya

- Formaður: Hans Eivind Olsen
- Næstformaður: Kristian Joensen
- Peningarøkil/skrivari: Jens Albert Simonsen

### Dartfeløgini

- Klaksvíkar Dartfelag
- Pílar og skot (Fuglafjørður)
- D16 (Toftir)
- D9 (Skála)
- Havnar Dartfelag
- Argja Dartfelag
- Vága Dartfelag
- Dart Sandoy

# Golfsamband Føroya

## Golfbreytin á Glyvursnesi í eygsjón

*Tórshavnar kommuna hevur tikið fyrstu ítøkiligu stigini at gera nógv umrøddu golfbreytina á Glyvursnesi. Golfspælarar bíða spentir eftir betri umstøðum*

Golfspælið í Føroyum var í 2019 framvegis darvað av vánaligum umstøðum á golfbreytini á Glyvursnesi, tí har er nógv virksemi í sambandi við útbyggingina av Tórshavnar havn.

Í 2019 hendi tó tað gleðiliga, at gongd sær út til at vera komin á ætlanina hjá Tórshavnar kommunu at gera golfbreyt á Glyvursnesi. Sáttmáli er gjørdur millum Búnaðarstovuna, festaran og Tórshavnar kommunu, og býráðið hevur í prinsippinum játtað pengarnar at gera tey fyrstu níggju holini av eini breyt við 18 holum.

Árið 2020 skal brúkast til fyrireiking og projektering, og so er ætlanin at fara í holt við sjálvt arbeiðið í 2021. Í útgangsstøði er ætlanin at gera arbeiðið yvir trý ár.

Ein íslendskur golfbreytaarkitektur skuldi í mars mánaði koma til Føroyar at seta gongd á projekteringina, men tíverri er hetta fyribils útsett orsakað av korona-tiltøkunum, sum vóru sett í verk 12. mars. Vónandi merkir hetta ikki, at stígur kemur í arbeiðið.

### Golfsambandið

Virksemið í golfsambandinum var lítið í 2019, serliga tí at golfítrótturin ikki var við á oyggjaleikunum í Gibraltar. Í golfsambandinum vera stig nú tikin til at skipa fyri føroyameistarakapping umframt felagskappingina, sum Tórshavnar Golffelag skipar fyri.

Á aðalfundinum í 2019 var nevndin í Golfsambandi Føroya umskipað. Hetta var gjørt í sambandi við, at limatalið tvífaldaðist, tá ið nýstovnaða Eysturoyar Golffelag formliga var innlimað í Golfsamband Føroya.

Avgjørt var at fara niður í tríggjar nevndarlimir. Valdir vóru Ingi Samuelsen, formaður, og Bjarne Jørgensen, umboðandi Tórshavnar Golffelag, og Sonni L. Petersen, peningarøkil, umboðandi Eysturoyar Golffelag.

Felagsmeistarakappingin í Tórshavnar Golffelag: Frá vinstru Palli Henriksen, Jens Guttesen og Janus Norðberg

### Tórshavnar Golffelag

Í Tórshavnar Golffelag gleða vit okkum til – í fyrra lagi – at givist verður við boring og spreinging á Glyvursnesi, og í seinna lagi, at gongd veruliga kemur á ætlanina at byggja nýggja golfbreyt á økinum.

Tórshavnar Golffelag skipar á hvørjum ári fyri felagsmeistarakapping. Í 2019 gjørdist ungi Jens Guttesen felagsmeistari í slagspæli framman fyri Janus Norðberg og Hans Paula (Palla) Henriksen. Jens brúkti 162 sløg at spæla 36 hol, og hetta var nýtt met fyri felagskappingina.

Í holspæli vann Hans Pauli (Palli) Henriksen framman fyri Óskar Eirikssyni og Jens Guttesen. Prix-kappingina vann Óli Edvard Olsen. Prix-vinnarin er tann spælarin, sum samanlagt hevur klárað seg best í øllum kappingarárinum.

Í løtuni eru gott 100 limir í Tórshavnar Golffelag, harav millum 20 og 30 spæla javnan á Glyvursnesi. Eitt limakort í felagnum gevur eisini atgongd til golfvøllir uttanlands, og henda møguleika brúka nógvir limir.

Í juli 2019 vóru tríati ár liðin, síðan Tórshavnar Golfklubbi, sum felagið tá æt, var stovnaður. Stovningardagurin var hildin í sambandi við eina lima-ferð á Asoroyggjum.

### Eysturoyar Golffelag

Í Eysturoyar Golffelag eru millum 15 og 20 limir. Felagið hevur eitt øki oman fyri Hústoftir í Lamba, har roynt verður at skapa møguleikar fyri at spæla golf. Nøkur hol eru stungin út, og ætlanin er at betra um lendið, áðrenn farið verður út at skaffa fleiri limir til felagið.

Í nevndini í Eysturoyar Golffelag sita Sølvi Reinert Hansen, formaður, Petur Meinhard Jacobsen, Bárður Højgaard, Sonni L. Petersen og Johnny Højgaard.

# Kurvaból tsamband Føroya

## Oyggjaleikir fyltu nógv í 2019

*Trygd-kappingin endaði tíðliga, so tað bar væl til at seta manslandsliðið til oyggjaleikirnar at venja í góðari tíð í fjør. Næstu ferð skulu kvinnurnar við*

Oyggjaleikirnir á Gibraltar fyltu nógv hjá kurvabóltinum í 2019. Heimliga Trygd-kappingin endaði tíðliga á árinum – í marts mánaði. Eitt landslið kundi sostatt úttakast í góðari tíð, og miðvísar venjingar kundu byrja beinanvegin.

Vit høvdu glett okkum nógv til leikirnar á Gibraltar fyri at síggja, um vit høvdu flutt okkum síðani síðstu oyggjaleikir á Gotlandi. Allur hópurin var vísur í, at vit vóru betur fyri hesaferð, og nú var tað upp til okkum at vísa tað á vøllinum. Vit fóru avstað við einum nógv yngri liði enn seinast, so tað var ein sera spennandi ferð.

Í okkara fyrsta dysti sást beinanvegin, at vit høvdu tikið okkum nógv fram síðani leikirnar á Gotlandi. Vit leiktu móti Jersey og tóku teir á bóli við at vera frammanfyri allan dystin, tó at vit taptu tepurt í síðstu minuttunum. Síðst vit leiktu móti Jersey, taptu vit við 60 stigum, so teir vóru sjálvandi ikki klárir til mótstøðu.

Sjálvt um tað óhugaligt at tapa, so var tað ein stór „forloysing" at síggja, hvussu nógv vit høvdu flutt okkum rætta vegin. Vit vunnu okkara fyrsta landsliðsdyst í okkara síðsta dysti á Gibraltar ímóti Álandi við stigunum 76-35. Tað stuttliga við hesum dystinum var, at vit byrjaðu við einum reinum U-21 liði. Okkara ungu leikarar vístu okkum, at framtíðin hjá føroyskum kurvabólti sær gott út.

## Kvinnurnar við í 2021

Tá tað er sagt, so er eitt, sum manglar til næstu oyggjaleikir, og tað er kvinnurnar.

Vit hava sett okkum fyri, at eitt kvinnulandslið skal við til oyggjaleikir á Guernsey í 2021. Tann heimliga kvinnukappingin hevur ikki havt somu framgongd sum kappingin hjá monnunum – heldur hevur talan verið um afturgongd.

Vit hava tí boðað frá, at á næstu oyggjaleikum verður eitt kvinnulandslið við. Hesum hava kvinnurnar tikið væl ímóti, og tær eru longu byrjaðar at venja fram ímóti oyggjaleikunum 2021. Vónandi fer hetta eisini at hava við sær, at vit aftur kunnu hava eina skipaða kvinnukapping.

## Kappingar

Fimm manslið eru við í Trygd-kappingini, sum gongur frá november til apríl. Øll lið spæla ímóti øllum – ein dyst heima og ein úti. Kappingin endar við hálvfinalu og finaluumfari.

Fýra lið eru við í U21-kappingini, ið er skipað sum fýra dagskappingar, har øll spæla ímóti øllum. Kappingin endar við einum finaludegi.

3móti3 er ein kapping, sum Hávur skipaði fyri í Klaksvík, áðrenn Trygd-kappingin byrjaði. Hetta er ein opin kapping, har øll kunnu melda lið til. Tríggir leikarar eru á hvørjum liði, og spælt verður í eina kurv. Kappingin er ein góð byrjan upp á árið, har øll kunnu hava tað stuttligt. Og øll kunnu vera við – børn, kvinnur og menn.

Føroyska manslandsliðið spældi venjingardyst í fjør ímóti liðnum Stevnsgade, sum spælir í Serie 1 í Danmark. Stevnsgade vitjaði okkum stutt undan oyggjaleikunum, og hetta var samstundis fyrstu ferð, landsliðið spældi dyst í Føroyum. Stevnsgade vann tepurt á føroyska landsliðnum.

Nevndin í Kurvaból tssambandi Føroya er skipað soleiðis: John Norðbúð Thomsen, formaður, Birgir Petersen, kassameistari, Anna Petersen, skrivari, og Magnus Jakobsen og Erla Mirmansdóttir, nevndarlimir. Eykalimir eru Bjarni W. Zachariasen og Sára Isfeldt.

Kappingarnevnd: Kenneth á Argjaboða, Janus Jakobsen og Magnus Jakobsen

Dómsnevnd: Sigrid Midjord, Pól Jakobsen og Rainer Latupeirissa

## Feløg og limatal

- Hamar 67 limir
- Sporðdrekin 25 limir
- Ravnur 40 limir
- Hávur 26 limir
- Føniks 14 limir

# Seyðahundasamband Føroya

## Seks seyðahundafeløg í Seyðahundasambandinum

*Í 2019 løgdust nøkur seyðahundafeløg aftrat í Seyðahundasambandinum, og mangt bendir á, at onnur feløg eru á veg*

Árið 2019 var eitt hendingaríkt ár, har fleiri lokalfeløg vórðu stovnað. Harumframt er eitt felag undir stovnan, og í Kaldbak, Kaldbaksbotni og á Sundi eru eisini ætlanir um at stovna eitt felag.

Í løtuni eru seks feløg í Seyðahundasambandi Føroya: Sandoyar Seyðahundafelag, Eysturoyar Seyðahundafelag, Suðurstreymoyar Seyðahundafelag, Sunda Seyðahundafelag, Vága Seyðahundafelag og Norðoya Seyðahundafelag.

### FM

Sunda Seyðahundafelag skipaði fyri FM í ár, ið varð hildið í Saksunardali. Dómari var Cathinka Kjeldstrup Paterson úr Noreg, sum er búsitandi í Skotlandi. Hetta var eisini fyrstu ferð, vit høvdu ein kvinnuligan dómara til FM.

Úrslitið av FM gjørdist: Nr. 1 Páll Poulsen við Milo, nr. 2 Tummas Jacobsen við Glen, og nr. 3 var Jónleif Sólsker við Gwen.

### Kappingar uttanlands

Eins og undanfarin ár vóru vit eisini við í EM, sum í 2019 varð hildið í Týsklandi. Vit høvdu fýra hundar í kappingini, og tað vóru Tummas Jacobsen, Páll Poulsen og Anna Sofía Fjallheim, ið umboðaðu okkum.

Føroyar gjørdist nr. 12 fyri lið. Holland vann kappingina, Noreg var nr. 2 og Týskland nr. 3. Hetta var eitt sera gott úrslit, sum vit eru stolt av.

Vit tóku eisini lut í øðrum kappingum uttanlands í 2019. Talan var um norðurlendsku unghundakappingina, NM fyri vaksnar hundar og EM fyri unghundar.

Úrslitini í hesum kappingum vóru eisini sera góð. Í NM vóru vit nr. 4, og vit síggja, at vit hava stóra framgongd innan hesa ítróttagrein í Føroyum.

# Styrkisamband Føroya

## Styrkiítrótturin er nú skipað ítróttagrein undir ÍSF

*Í 2019 var styrkiítrótturin skipaður sum ítróttagrein undir ÍSF í Styrkisambandi Føroya og í Styrkifelag Føroya. Endamálið er at menna styrkiítróttin*

Fyrsta felagið innan styrkiítrótt í Føroyum, Styrkifelag Føroya, var stovnað 7. september 2019, og slakar tríggjar mánaðir seinni, 20. desember 2019, var henda ítróttagrein eisini skipað í eitt menningarsamband undir ÍSF, Styrkisamband Føroya.

Endamálið er at menna ein nýggjan ítrótt í Føroyum, kraftítróttin, sum fevnir um olympiska vektlyfting, power lifting (styrkilyft), kettlebell og crossfit. Aðrar greinar, sum lúka treytirnar fyri at vera ein „kraftítróttur", kunnu eisini vera við, um áhugi er fyri tí.

### Styrkisamband Føroya

Arbeiðast skal á fleiri økjum at fáa gongd á. Styrkiambandið og Styrkifelag Føroya fara at samstarva um hetta saman við ÍSF, venjingarmiðstøðum, kommunum og øðrum áhugabólkum.

Ein kappingarskrá skal gerast, eins og ein hagtalsskipan til almenn met og kappingarúrslit skal setast á stovn. Dómarar skulu hava neyðugu førleikaprógvini.

Vit skulu eisini beinanvegin leggja okkum eftir at skapa møguleikar fyri, at føroyingar umboða Føroyar í norðurlendskum og altjóða kappingum, sum fylgja altjóða reglum (NTF, EWF, IWF).

Í nevndini í Styrkisambandinum sita: Heini Hátún, formaður, Rói Hjaltalin og Guðmundur Danielsen, nevndarlimir. Jákup Suni Berg er tiltakslimur.

### Styrkifelag Føroya

Í fyrstu nevndini í Styrkifelag Føroya vóru: Heini Hátún,formaður, Eyðun Mortensen næstformaður, umframt Jákup Suni Berg, Guðmundur Danielsen og Ári Lützen, nevndarlimir.

Á ársaðalfundi 29. februar 2020 var nýggj nevnd vald. Í hesi nevndini eru: Rói Hjaltalin, formaður, Jenny Persson og Rudi Persson, nevndarlimir. Tiltakslimir eru: Páll Ólavsson og Niels Áki Mørk.

Limatalið var 9, tá ársaðalfundurin var hildin. Fleiri hava tó sagt, at tey ætla at gerast limir. Veruligt virksemi, kappingar og regluligar venjingar eru nú við at taka seg upp.

Miðað hevur verið eftir at fáa kvinnur við í leiðsluna og at luttaka ítróttaligа. Vit vóna at fáa størri kvinnuliga umboðan í tíðini, sum kemur.

Sí meira her: https://sff.fo/

### Førleikamenning og samstarv við venjara

Skipað varð fyri skeiði í olympiskari vektlyfting í sambandi við stovnanina av Styrkifelag Føroya, har Frank Petersen frá Dansk Vægtløftningsforbund lærdi frá sær.

Frank er landsliðsvenjari í Danmark, og hann er eldhugaður at leggja okkum lag á á øllum økjum – fyriskipan, venjingar, kappingar, førleikamenning o.s.fr. Frank sær stórar møguleikar í føroyingum innan hesa ítróttagrein.

### Fyrsta kappingin í olympiskari vektlyfting

Fyrsta kappingin í olympiskari vektlyfting í Føroyum var hildin 22. februar 2020. Kappingin eydnaðist sera væl við góðari luttøku og almennum áhuga.

Tey fyrstu føroysku almennu metini vóru sett. Úrslitini av kappingini síggjast her: *https://sff.fo/ff/* . Føroysku metini eru at síggja her: *https://sff.fo/* samandrattur-og-metyvirlit/

# Taekwondosamband Føroya

# Taekwondo í stórari framgongd

*Bæði á norðurlendska og heimliga pallinum gera føroyskir taekwondo-íðkarar um seg, og altjóða limaskapurin er fingin í hús. Vit líta aftur á eitt sera hendingaríkt taekwondoár*

2019 byrjaði við einum braki, tá Høgni Kunoy Dávason 20. januar gjørdist norðurlendskur meistari í bólkinum 59 kg junior 15 – 17 ár, einans 14 ára gamal. Norðurlendska meistaraskapið var hildið í Keflavík í Íslandi hesaferð. Tað skiftir ímillum Norra, Svøríki, Danmark, Ísland og Finnland. Tey baltisku londini hava eisini møguleika at vera við, men tey hava enn ikki haft kappingina í sínum londum. Vit vóna skjótt at kunna bjóða okkum fram sum vertir fyri norðurlendsku meistarakappingini.

## Kappingar og graduering

Í februar vóru vit í Esbjerg og tóku lut í Esbjerg Kup. Hetta eydnaðist sera væl, og vit gjørdust næstmest vinnandi felag av 22 donskum feløgum. Esbjerg Kup er kapping á miðalstøði.

Í apríl vóru seks av okkara frægastu í kampi í Berlin – til kappingina Berlin Open. Hetta er kapping á høgum støði við áleið 900 luttakarum úr øllum heiminum. Í hesi kappingini eydnaðist tað Høgna Kunoy Dávason og Markus Vazquez Dávidsson at vinna bronsu.

Í mai var graduering fyri 11. ferð í felagnum Hwarang Føroyar. Hettar er ein roynd, har luttakararnir royna at fáa eitt hægri belti, enn teir hava. Heilt frá hvítum belti og til reytt belti við trimum svørtum strikum, t.v.s. 10 beltir tilsamans. Graduering til svart belti nevnist Dan graduering. Tað eru 11 beltir tilsamans frá hvítum til svart belti. Eftir svart belti kemur tað, ið verður kallað Dan, sum gongur frá 1-9.

Í juni vóru 30 av okkara minstu íðkarum niðri í Danmark til Get2sport, sum er ein byrjanarkapping, har børnini fáa so nógvar kampar, ið teimum lystir. Kappingin var á Nørrebro, og vit royna at gera henda túrin á hvørjum ári. Hetta er kapping, ið er sera væl egnað til tey smáu. Vit ætla at skipa fyri slíkari kapping í Føroyum eisini.

Skipað var fyri venjingarlegu í juli, tá fimm danskir landsliðskemparar og ein kampvenjari vóru á vitjan hjá Hwarang Føroyum. Teir sparraðu – t.e. lættur kampur – hvønn dag við okkara kemparar. Allir luttakarar fingu sera nógv burtur úr hesi leguni. Av tí at taekwondo er so nýggj ítróttagrein her á landi, er alneyðugt at fáa íkast uttanífrá fyri at halda støðinum uppi. Tað er stórur áhugi at koma til Føroyar á vitjan, tí Føroyar av mongum verður sæð sum eitt eksotiskt stað at vitja, og tí okkara fólk hava gjørt vart við seg á jaligan hátt uttanlands. Ein teirra, ið var á vitjan, er tikin út til at umboða Danmark í OL 2020.

Í august vóru vit við til kappingina Wonderful Copenhagen, og sum navnið sigur, er hetta kapping í Keypmannahavn. Talan er um kapping á høgum evropiskum støði, sum komandi ár fær støðið G1-kapping. Ein G1-kapping er ein undankapping til EM og HM. Her merktu vit beinanvegin, at tað restar nakað í, áðrenn vit eru klár at gera okkum galdandi á slíkum støði. Fleiri av okkara íðkarum taptu sín fyrsta kamp.

## Dómaraskeið

Í oktober hildu vit fyri fyrstu ferð dómaraskeið í taekwondo. Hetta skeiðið var hildið í Runavík, har David Cooper, ið er olympiskur dómari, og Søren Dall, sum er altjóða dómari, undirvístu. Vit vóru 11 við til skeiðið, og níggju fingu C-dómaraprógv. Núggju dómararnir sluppu síðani at royna seg sum C-dómarar vikuskifti eftir, tá ið fyrsta FM í taekwondo var hildið í Bylgjuni í Runavík. 76 luttakarar vóru til kappingina, og øll vóru sjálvandi úr Hwarang Føroyum, sum enn er einasta taekwondufelag í landinum.

Fyri taekwondo sum ítróttagrein í Føroyum var tað eitt markamót at halda FM fyri fyrstu ferð. Kappingin spældi væl av og gav okkum royndir at standa fyri kapping her á landi.

## Dangraduering og danska meistaraskapið

2. november vóru 17 ung og vaksin uppi í royndi til Dangraduering. Sum vanligt var Dangraduringin hildin í felagnum tó við tí undantaki, at Keo San Do stóð fyri royndini. Keo San Do er altjóða góðkent at graduera til svart belti.

Nú eru 17 av næmingunum, sum Høgni hevur vant, síðan hann sjálvur var 10 ára gamal, góðkendir av Kukki Won, ið er hægsti mynduleiki innan taekwondo. Frá Keo San Do stóðu Claus Hendriksen og Michael Iversen fyri gradueringini. Samstundis var hetta fyrstu ferð, ein Dangraduering í taekwondo var hildin í Føroyum.

Hwarang Føroyar hevði trý donsk meistaraheiti frá 2018, ið vit skuldu royna av endurvinna í 2019. Danska meistarakappingin var hildin 23. november í Skanderborg. Vit luttóku við 18 kemparum og pomsaefólki, og ikki kann sigast annað enn, at tað gekk sera væl – vit megnaðu at vinna trý donsk meistaraheiti. Hesaferð gjørdu kvinnurnar í felagnum um seg, Elinborg Kunoy Dávadóttir, Oda Weihe og Noomi Kunoy Heradóttir kunnu kalla seg danskar meistarar í 2019. Elinborg er lítlasystir Høgna, sum er danskur meistari annað árið á rað.

## Altjóða limaskap og landsliðsvenjara

TSF hevur arbeitt miðvíst fram móti altjóða limaskapi í World Taekwondo, WT. Vit vilja umboða tjóðina og bera Merkið til kappingar uttanlands. 5. desember vóru vit til fyrsta fundin í WT høpi. Fundurin var hildin í Moskva og gekk sera væl. Vit fingu altjóða limaskap og gjørdust limir í WT og WTE. Hetta fer at hava stóran týdning fyri taekwondo í Føroyum – bæði fyri tey, sum íðka í dag, og fyri komandi ættarlið. Fyri Føroyar merkir tað, at vit hava tikið okkum eitt fet nærri OL-luttøku. Vit eru longu boðin við til Small Nations í San Marino í juni 2020.

Mathias Gabrielsen var 17. desember settur í starv sum landsliðsvenjari. Mathias er føddur í Fredericia, men er búsitandi í Føroyum. Hann hevur verið kampvenjari í Hwarang Føroyum síðan september 2017, og nú er hann eisini landsliðsvenjari.

## Heiður

Høgni var valdur ársins leiðari innan taekwondo í Danmark. Hann fekk heiðurin tillutaðan, tá danska meistarakappingin var hildin í Skanderborg. Borgarstjórin og formaðurin í Dansk Taekwondo Forbund hildu røðu fyri honum. Tað er so sanniliga eisini uttan fyri landoddarnar, at fólk øtast við, at ein 10 ára gamal drongur hevur stovnað eitt taekwondofelag, og at hetta felagið hevur slíka viðgongd, sum Hwarang Føroyar hevur havt.

Á ársins ítróttagalla, har ÍSF var vertur fyri einum framúr tiltaki í Müllers Pakkhúsi, var Høgni heiðraður sum ársins ítróttarfelagi, og TSF var heiðrað sum ársins ítróttasamband. Ikki kann sigast annað enn, at 2019 hevur verið eitt framúr taekwondoár.

## Búmerki og javnstøða

TSF fekk sítt búmerki í 2019, sum Else Sjúrðaberg hevur sniðgivið. Tað hevur verið ein drúgv tilgongd at fáa gjørt búmerkið, tí tað hevur verið okkara aðalmál at fáa eitt búmerki, ið lýsir ítróttin, og ikki minst eitt búmerki, sum heldur tíðarinnar tonn. Tað er altíð trupult at skapa eitthvørt, sum heldur inn í framtíðina.

Á okkara búmerki umboðar ein kvinna stríðsítróttin taekwondo við føroyska flagginum í bakgrundini. Tað er ikki av tilvild, at vit hava valt eina kvinnu og ikki ein mann. Vit ynskja at breiða boðskapin, at stíðsítróttur er líka nógv fyri kvinnur, sum hann er fyri menn.

Vit eru javnan úti í skúlum, frítíðarskúlum, øðrum feløgum, føðingardøgum, poltarabend og øðrum tiltøkum og undirvísa. Tá vit soleiðis koma út um landið at umboða taekwondo, leggja vit okkum altíð eftir, at bæði kynini eru umboðað.

Øll málini, sum TSF setti á skrá fyri 2019, vóru framd – og meira enn tað.

## Nevnd

- Vivian Guðjonsson, forkvinna
- Noomi Kunoy Heradóttir, næstforkvinna
- Elisabeth Hansen, kassameistari
- Dávur Kunoy Høgnason, nevndarlimur

## Feløg:

Hwarang Føroyar (úttalast harang Føroyar)
Limatal: 91 íðkandi limir og 286 stuðlandi limir

# Tennissamband Føroya

## Bjartskygni millum tennisleikarar

*Oyggjaleikirnir og FM vóru størstu ítróttahendingar innan tennis í 2019, og nýtt undirlag á tennisvøllunum í Gundadali hevur økt limatalið í Havnar Tennisfelag*

Tennissamband Føroya varð sett á stovn á sumri 2018 og hevur sostatt skjótt tvey ár á baki. Sambandið er eitt av teimum nýggju menningarsambondunum í ÍSF, hóast tennisítrótturin hevur nógv ár á baki í Føroyum. Virksemið hjá TSF í 2019 fevndi serliga um luttøku á Oyggjaleikunum á Gibraltar og FM í tennis fyri einstaklingar.

Tennis hevur seinastu mongu árini verið umboðað á oyggjaleikunum, og 2019 var einki undantak. TSF hevði gjørt avtalu við Pablo Merin um at vera venjari hjá landsliðnum hesuferð. Harumframt virkaði Pablo sum venjari hjá Havnar Tennisfelag í 2019, har hann vandi bæði yngri og vaksnar leikarar.

Føroysku leikararnir á oyggjaleikunum í fjør vóru Pætur M. Dahl, Jón Brekku, Anfinn Gaard umframt Pablo Merin, sum var leikandi venjari. Allir leikarar spældu bæði einmansleik og tvímansleik. Úrslitini kundu verið frægari, men sum heild var talan um eina væl eydnaða luttøku.

Í 2019 var eisini skipað fyri FM í tennis fyri menn og oldboys. Í finaluni fyri menn møttust Pætur M. Dahl og Jón Brekku, har Pætur vann í tveimum settum, bæði settini endaðu 6-2. Harumframt var FM fyri oldboys, har Erling í Liða og Sólbjørn Mortensen møttust í finaluni. Erling gjørdist sigursharri.

### Nýggir vøllir í Gundadali

Tað var stórhendingin fyri føroyskt tennis í 2019, at nýtt undirlag var lagt á tennisvøllirnar í Gundadali í Havn. Gamla undirlagið var úr gummi, og tað hevur verið brúkt í útivið 30 ár, síðan vøllirnir vórðu tiknir í nýtslu. Tað var ikki væl egnað til føroyska veðurlagið til tennis sum heild.

Nýggja undirlagið er graslíki við sandi á, og tað er sera væl hóskandi til tennis. Størsti batin er, at nú ber til at spæla tennis, hóast vøllurin er vátur. Tað var ikki møguligt á gamla undirlagnum, og tí var sera avmarkað, hvussu ofta vøllirnir kundu nýtast.

Havnar Tennisfelag og Tórshavnar kommuna fingu í felag hesa umvælingina í lag, og hetta fer at geva tennisítróttinum betri møguleikar at mennast í framtíðini. Avtala er eisini gjørd við Tórshavnar kommunu um at seta upp ljósmastrar og felagshús við vøllirnar í næstum. Í samband við, at nýtt undirlag var lagt á, var ein online-bókingarskipan tikin í nýtslu, og hon hevur virkað væl.

Umvælingin av vøllunum hevur havt við sær ein øktan limaskara í HTF, sum í fjør skrásetti umleið 70 limir. Tennissambandið vónar, at betraðu umstøðurnar í Gundadali fara at birta undir størri áhuga fyri tennis í Føroyum.

### Nevndin í Tennissambandi Føroya

- Stefan í Skorini, formaður
- Hjalti Mohr Jacobsen, kassameistari
- Jón Brekku, nevndarlimur
- Pætur M. Dahl, tiltakslimur

### Limafeløg

Havnar Tennisfelag

## ONNUR MENNINGARSAMBOND:

# Føroya Froskmannasamband

# Ítróttasamband Føroya

## ÁRSFRÁSØGN

## 2019

**FRUMRIT**

Ársfrásøgnin er løgd fram og góðkend á felagsins ársaðalfundi, tann

_____

Fundarstjóri

# Innihaldsyvirlit


| | Síða |
|---|---|
| **Átekningar** | |
| Leiðsluátekning | 1 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 2 |
| | |
| **Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2019** | |
| Nýttur roknskaparháttur | 4 |
| Rakstrarroknskapur | 7 |
| Fíggjarstøða | 8 |
| Notur | 10 |

## Leiðsluátekning

Starvsnevndin hevur í dag lagt fram ársfrásøgnina fyri 2019 hjá Ítróttasamband Føroya.

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ársroknskaparlógina.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2019 hjá felagnum og av úrslitinum av virkseminum hjá felagnum fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2019.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Tórshavn, tann 18. mai 2020

**Daglig leiðsla**

Petur Mittún
aðalskrivari

**Starvsnevnd**

Elin Heðinsdóttir Joensen
forseti

Jon Hestoy
varaforseti

John Kjær
nevndarlimur

Sigurd Rasmussen
nevndarlimur

Schandorff Vang
nevndarlimur

# Átekning frá óheftum grannskoðara

**Til limafeløgini í Ítróttasamband Føroya**

**Niðurstøða**

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Ítróttasamband Føroya fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2019 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum, undir hesum nýttur roknskaparháttur. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2019 hjá felagnum og av úrslitinum av virkseminum hjá felagnum í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2019 samsvarandi ársroknskaparlógini.

**Grundarlag fyri niðurstøðuni**

Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardir um grannskoðan og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti "Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin". Vit eru óheft av felagnum samsvarandi altjóða etisku krøvunum fyri grannskoðarar (etisku reglunum hjá IESBA) og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, og vit hava hildið okkara etisku skyldur, sum ásettar eru í hesum standardum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til, fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum; at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, har tað er viðkomandi; umframt at gera ársroknskapin eftir roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka felagið, steðga rakstrinum, ella at leiðslan í roynd og veru ikki hevur annan møguleika enn at gera tað.

**Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin**

Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at geva eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, tá slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og kunnu metast at vera týðandi, um tað kann væntast, at teir hvør sær ella saman ávirka fíggjarligu avgerðirnar, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiðir, sum hesir váðar krevja, umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burturúrlegging, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar.

- Gera niðurstøðu um, hvørt tað er hóskandi, at leiðslan hevur gjørt ársroknskapin við støði í roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, umframt um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa um hendingar og viðurskifti, sum kunnu viðføra týðandi iva, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit í okkara grannskoðanarátekning vísa á upplýsingar um hesi viðurskifti í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar og viðurskifti í framtíðini kunnu tó føra við sær, at felagið ikki longur megnar at halda fram við rakstrinum.

- Meta um samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, herundir upplýsingarnar í notunum, umframt um ársroknskapurin vísir tey undirliggjandi handilsviðurskifti og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd av hesum.

Vit samskifta við ovastu leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi eygleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit eyðmerkja undir grannskoðanini.

Tórshavn, tann 18. mai 2020

**P/F Januar**
løggilt grannskoðanarvirki

Jógvan Amonsson
statsaut. revisor

## Nýttur roknskaparháttur

Ársroknskapurin fyri Ítróttasamband Føroya er greiddur samsvarandi viðtøkunum um uppseting av ársroknskapinum og ársroknskaparlógini fyri feløg í flokki B. Tann nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur, í mun til undanfarna ár. Uppseting og notur eru tillagaðar virksemi ÍSF's.

**Alment um innrokning og virðisáseting**

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum standast av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapinum.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva felagnum fíggjarligar fyrimunir, og virðið á ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr felagnum, og virðið á skylduni kann ásetast álítandi.

Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur virðisásettar til útveganarvirði. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum greitt er frá niðanfyri um einstøku roknskaparpostarnar.

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið at væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum viðvíkja viðurskiftum, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

**Umrokning av fremmandum gjaldoyra**

Handlar í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðir til kursin, sum er galdandi á handilsdegnum.

Áogn, skuld og aðrir peningaligir postar í fremmandum gjaldoyra, sum ikki eru avroknaðir við roknskaparlok, verða umroknaðir til gjaldoyrakursin við roknskaparlok. Munurin millum gjaldoyrakursin við roknskaparlok og kursin, ið var galdandi á upptøkudegnum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin undir fíggjarpostum.

## Rakstrarroknskapurin

**Inntøkur**

Inntøkan er allur játtaður og útgoldin stuðul og aðrar sáttmálatengdar inntøkur í árinum.

**Kostnaður**

Ítróttasamband Føroya er ikki meirvirðisgjaldsskrásett. Allir kostnaðir eru tí íroknaðir MVG.

Rakstrarkostnaður fevnir um allan kostnað, sum knýtir seg til høvuðsraksturin hjá Ítróttasambandi Føroya.

## Nýttur roknskaparháttur

**Fyrisitingarkostnaður**

Fyrisitingarkostnaður fevnir um kostnað, sum knýtir seg til umsitingina av Ítróttasambandi Føroya, herundir avskrivingar v.m., sum ikki knýtir seg til høvuðsraksturin.

**Starvsfólkakostnaðir**

Starvsfólkakostnaður fevnir um allan kostnað, sum stendst av at hava fólk í starvi. Tað er lønar- og eftirlønarkostnaður og øll sosial gjøld.

**Fíggjarpostar**

Fíggjarligir postar umfata rentuinntøkur og -kostnaðir umframt staðfestan og óstaðfestan kursvinning og -tap viðvíkjandi fíggjarligum ognum og skyldum. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

## Fíggjarstøðan

**Materiell støðisogn**

Grundøki og bygningar verða virðisásett til útveganarvirði, við uppskrivingum løgdum afturat og frádrigið samlaðar avskrivingar og niðurskrivingar. Grundøki verða ikki avskrivað.

Avskrivingargrundarlagið er kostprísur við uppskrivingum til dagsvirði løgdum afturat, og frádrigið møguligt væntað restvirði eftir lokna brúkstíð.

Útveganarvirðið umfatar keypsprísin og kostnaðir, ið beinleiðis er knýttir at útveganini, til ognin er klár at taka í nýtslu.

Jøvn avskriving verður framd grundað á niðanfyristandandi meting av væntaðu brúkstíðunum og rest-virðunum hjá ognunum:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Bygningar | 30 ár | 30 % |

Smáamboð við eini væntaðari livitíð á undir 1 ár verða útreiðsluførd í útveganarárinum.

Vinningur ella tap við at avhenda materiella støðisogn verður gjørt upp sum munurin millum søluprís við frádrátti av sølukostnaðum og roknskaparliga virðið á søludegnum. Vinningur ella tap verður innroknað í rakstrarroknskapin undir ávikavist aðrar rakstrarinntøkur og aðrir rakstrarkostnaðir.

**Áogn**

Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Fyri at standa ímóti møguligum tapi verður niðurskrivað til nettorealisatiónsvirðið.

### Tíðaravmarkingar

Tíðaravmarkingar, sum eru innroknaðar undir ogn, umfata staðfestar kostnaðir, sum viðvíkja komandi roknskaparárið.

### Tøkur peningur

Tøkur peningur umfatar innistandandi í peningastovnum og reiðan pening.

### Skuld

Onnur skuld verður tikin við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virðið.

## Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember

| Nota | | 2019<br>kr. | 2018<br>kr. |
|---|---|---|---|
| 1 | Inntøkur | 23.872.260 | 17.704.454 |
| | **Inntøkur tilsamans** | **23.872.260** | **17.704.454** |
| | Ítróttaferðing | -393.803 | -644.838 |
| | Trygging av ítróttafólki | -525.000 | -525.000 |
| 2 | Antidoping | -202.123 | -367.811 |
| 3 | ONF | -995.784 | -1.020.881 |
| 4 | Oyggjaleikir | -1.978.012 | -56.521 |
| 5 | Felagsútreiðslur | -804.903 | -495.389 |
| 6 | Umsiting av ÍSF-húsinum | -173.962 | -235.784 |
| 7 | Skrivstovuútreiðslur | -193.878 | -367.376 |
| 8 | Starvsfólkakostnaður | -1.310.595 | -1.208.754 |
| | **Útreiðslur tilsamans** | **-6.578.060** | **-4.922.354** |
| | Avsettur stuðul frá Ítróttavedding | -438.000 | 2.000.000 |
| 9 | Stuðul til sersambond | -14.950.000 | -13.750.000 |
| 10 | Stuðul til altjóða kappingar í Føroyum | -500.000 | -500.000 |
| 11 | Stuðul til Úrvalsítrótt | -800.000 | -800.000 |
| | **Stuðul tilsamans** | **-16.688.000** | **-13.050.000** |
| | Rentuútreiðslur | -6.013 | 0 |
| | **Ársúrslit** | **600.187** | **-267.900** |
| | **Uppskot til býti av úrsliti:** | | |
| | Flytast til flutt úrslit | 600.187 | 0 |
| | Flutt frá fluttum úrsliti | 0 | -267.900 |
| | **Býtt tilsamans** | **600.187** | **-267.900** |

## Fíggjarstøða 31. desember

### OGN

| Nota | | 2019<br>kr. | 2018<br>kr. |
|---|---|---|---|
| | **Støðisogn** | | |
| | ÍSF-Húsið | 1.481.426 | 1.481.426 |
| | Materiell støðisogn tilsamans | 1.481.426 | 1.481.426 |
| | Partabrøv - Sp/f Ítróttarvedding (nom. kr. 50.000) | 50.000 | 50.000 |
| | Fíggjarlig støðisogn tilsamans | 50.000 | 50.000 |
| | **Støðisogn tilsamans** | **1.531.426** | **1.531.426** |
| | **Ogn í umferð** | | |
| | Vøru- og tænastuáogn | 254.859 | 10.825 |
| | Tíðaravmarking, Oyggjaleikir | 0 | 69.403 |
| 12 | Millumrokning við sambond | 348.000 | 831.391 |
| | Onnur áogn | 800.000 | 0 |
| | Áogn tilsamans | 1.402.859 | 911.619 |
| | Tøkur peningur | 8.653.635 | 7.778.387 |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **10.056.494** | **8.690.006** |
| | **OGN TILSAMANS** | **11.587.920** | **10.221.432** |

## Fíggjarstøða 31. desember

**SKYLDUR**

| Nota | | 2019<br>kr. | 2018<br>kr. |
|---|---|---|---|
| | **Eginogn** | | |
| | Tiltaksgrunnur fyri uppskrivingum | 1.758.841 | 1.758.841 |
| | Flutt úrslit | 6.356.418 | 5.756.231 |
| | **Eginogn tilsamans** | **8.115.259** | **7.515.072** |
| | **Skuld** | | |
| | Vøru- og tænastuskuld | 422.467 | 198.922 |
| | Skyldugur partur av stuðli frá Ítróttarvedding | 1.638.000 | 1.200.000 |
| 13 | Avsetingar | 1.412.194 | 1.307.438 |
| | Stuttfreistað skuld tilsamans | 3.472.661 | 2.706.360 |
| | **Skuld tilsamans** | **3.472.661** | **2.706.360** |
| | **SKYLDUR TILSAMANS** | **11.587.920** | **10.221.432** |

## Notur

| | | 2019<br>kr. | 2018<br>kr. |
|---|---|---|---|
| **1.** | **Inntøkur** | | |
| | Landskassastuðul | 8.150.000 | 8.150.000 |
| | Landskassastuðul til HSF | 800.000 | 0 |
| | Landskassastuðul til altjóða kappingar í Føroyum | 500.000 | 500.000 |
| | Landskassastuðul til Úrvalsítrótt | 800.000 | 800.000 |
| | Stuðul MMR Oyggjaleikir | 500.000 | 0 |
| | Ítróttarvedding | 11.038.000 | 7.661.000 |
| | ONF | 500.000 | 500.000 |
| | Aðrar inntøkur | 150.000 | 0 |
| | Inntøkur fyri skeið | 9.960 | 93.454 |
| | Oyggjaleikir, luttøkugjald | 1.424.300 | 0 |
| | | **23.872.260** | **17.704.454** |
| **2.** | **Antidoping** | | |
| | Dopingroyndir, fundir v.m. | 45.256 | 141.079 |
| | Løn | 156.867 | 226.732 |
| | | **202.123** | **367.811** |
| **3.** | **ONF** | | |
| | ONF | 742.562 | 831.822 |
| | EYOF | 68.003 | 0 |
| | Løn | 185.219 | 189.059 |
| | | **995.784** | **1.020.881** |
| **4.** | **Oyggjaleikir** | | |
| | Luttøkugjald IGA | 48.347 | 0 |
| | Ferðaútreiðslur | 699.381 | 0 |
| | Uppihald | 1.055.114 | 0 |
| | Umboðan | 18.530 | 0 |
| | Felagsútreiðslur | 149.305 | 56.521 |
| | Gávur | 7.335 | 0 |
| | | **1.978.012** | **56.521** |

## Notur

| | | 2019<br>kr. | 2018<br>kr. |
|---|---|---|---|
| **5.** | **Felagsútreiðslur** | | |
| | Ferðing og koyring | 3.726 | 3.449 |
| | Norðurlandafundir | 38.820 | 32.844 |
| | D.I.F. v.m. | 0 | 4.442 |
| | Alheimsfundir | 21.947 | 18.578 |
| | Avskriving av áogn | 4.691 | 0 |
| | Felagstiltøk | 170.565 | 125.870 |
| | Tiltakið, Ársins | 168.888 | 0 |
| | Skeiðsútreiðslur | 13.400 | 168.757 |
| | Umboðan | 240 | 1.990 |
| | Gávur og graveringar | 9.697 | 1.727 |
| | Skeið / ráðstevnur | 86.028 | 8.749 |
| | Starvsnevndarfundir | 16.480 | 17.210 |
| | Fíggjarnevndarfundir | 0 | 5.407 |
| | Umboðsting og aðalfundir | 53.088 | 63.515 |
| | Limagjøld til felagsrakstur | 18.462 | 18.371 |
| | Trygging av starvsfólki | 25.051 | 12.721 |
| | Altjóða nevndararbeiði | 0 | 11.759 |
| | ÍSF 80 ár | 173.820 | 0 |
| | | **804.903** | **495.389** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **6.** | **Umsiting av ÍSF-húsinum** | | |
| | Viðlíkahald | 1.562 | 77.602 |
| | El og hiti | 71.409 | 58.040 |
| | Trygging | 11.874 | 12.338 |
| | Reingerð og vask | 84.408 | 78.982 |
| | Annað til húsið | 4.709 | 8.822 |
| | | **173.962** | **235.784** |

| | | 2019<br>kr. | 2018<br>kr. |
|---|---|---|---|
| **7.** | **Skrivstovuútreiðslur** | | |
| | Skrivstovuhald | 24.106 | 34.254 |
| | Pappír og prent | 15.111 | 15.607 |
| | Postgjald | 1.551 | 1.449 |
| | Lýsingar | 16.274 | 6.845 |
| | Tól og innbúgv | 11.462 | 13.448 |
| | Telefon og internet | 52.257 | 43.520 |
| | Bókhald og roknskaparhjálp | 16.322 | 47.724 |
| | Grannskoðan og sakførarakostnaður | 30.200 | 81.476 |
| | Konsulenthjálp | 11.375 | 98.478 |
| | Limaskipan | 0 | 7.474 |
| | Flytingarprovisión | 10.860 | 9.250 |
| | Heimasíða | 4.863 | 7.850 |
| | Oyraavrunding | -503 | 1 |
| | | **193.878** | **367.376** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **8.** | **Starvsfólkakostnaður** | | |
| | Lønarendurgjald, starvsnevnd | 80.075 | 65.640 |
| | Løn | 983.075 | 891.597 |
| | Alm gjøld | 61.853 | 70.898 |
| | Eftirlønargjøld | 185.592 | 180.619 |
| | | **1.310.595** | **1.208.754** |

Av lønarkostnaðunum í árinum eru kr. 342.086 fluttar til Antidoping og ONF, ávíkavist nota 2 og nota 3. Samlaðu lønarkostnaðirnir í árinum eru sostatt kr. 1.652.681.

| | | 2019<br>kr. | 2018<br>kr. |
|---|---|---|---|
| **9.** | **Stuðul til sersambond** | | |
| | Fótbóltssambandið | 1.556.500 | 1.512.500 |
| | Hondbóltssambandið | 2.413.022 | 2.277.930 |
| | Flogbóltssambandið | 1.271.168 | 1.259.502 |
| | Róðrarsambandið | 778.953 | 801.700 |
| | Fimleikasambandið | 1.164.575 | 1.121.690 |
| | Parasport | 820.447 | 784.816 |
| | Svimjisambandið | 1.161.386 | 986.002 |
| | Judo Føroyar | 518.306 | 512.960 |
| | Badmintonsambandið | 864.649 | 863.381 |
| | Skjótisambandið | 481.541 | 488.790 |
| | Bogaskjótisambandið | 496.675 | 448.358 |
| | Borðtennissambandið | 485.106 | 503.656 |
| | Sambandið Fyri Súkkling og Triathlon | 467.320 | 525.376 |
| | Frælsur Ítróttur Føroya | 563.724 | 588.456 |
| | Ríðisambandið | 517.060 | 502.346 |
| | **Tilsamans** | **13.560.432** | **13.177.463** |
| | **Stuðul til menningarsambond** | | |
| | Boksisamband Føroya | 80.000 | 60.000 |
| | Føroya Seyðahundafelag | 90.000 | 80.000 |
| | Taekwondasamband Føroya | 90.000 | 80.000 |
| | Billiardsamband Føroya | 95.000 | 90.000 |
| | Golfsamband føroya | 95.000 | 0 |
| | Kurvabóltur | 110.000 | 90.000 |
| | Tennissamband Føroya | 20.000 | 30.000 |
| | Dartasamband Føroya | 90.000 | 0 |
| | Afturført stuðul til ser- og menningarsambond | -80.432 | 0 |
| | Avseting, stuðul til Menningarsambond | 0 | 142.537 |
| | **Tilsamans** | **589.568** | **572.537** |
| | **Útlutaður stuðul tilsamans** | **14.150.000** | **13.750.000** |
| | Hondsbóltssambandið Landskassastuðul | 800.000 | 0 |
| | | **14.950.000** | **13.750.000** |

| | | 2019<br>kr. | 2018<br>kr. |
|---|---|---|---|
| **10.** | **Stuðul til altjóða kappingar í Føroyum** | | |
| | Hondbóltsambandið | 0 | 140.000 |
| | Flogbóltsambandið | 400.000 | 160.000 |
| | Svimjisambandið | 152.000 | 0 |
| | Afturført stuðul til altjóða kappingar | -52.000 | 0 |
| | Avseting, stuðul til altjóða kappingar í Føroyum | 0 | 200.000 |
| | | **500.000** | **500.000** |
| **11.** | **Stuðul til Úrvalsítrótt** | | |
| | Hondbóltsamband Føroya | 0 | 100.000 |
| | Svimjisambandið | 725.753 | 725.000 |
| | Parasport | 156.000 | 0 |
| | Súkkling og triathlon | 117.000 | 80.000 |
| | Frælsur Ítróttur | 186.000 | 130.000 |
| | Fimleikasamband Føroya | 100.000 | 0 |
| | Umsitingarkostnaður | 22.899 | 0 |
| | Afturgoldin stuðul | -774.840 | 0 |
| | Regulering, avseting | 267.188 | -235.000 |
| | | **800.000** | **800.000** |
| **12.** | **Millumrokning við sambond** | | |
| | Hondbóltsamband Føroya | 0 | 800.000 |
| | Súkkling og Triathlon | 0 | 31.391 |
| | Badmintonsamband Føroya | 300.000 | 0 |
| | Flogbóltsamband Føroya | 200.000 | 0 |
| | Svimjisamband Føroya | -152.000 | 0 |
| | | **348.000** | **831.391** |

| | | 31/12 2019<br>kr. | 31/12 2018<br>kr. |
|---|---|---|---|
| **13.** | **Avsetingar** | | |
| | Oyggjaleikir í Føroyum | 147.600 | 147.600 |
| | Altjóða nevndararbeiði | 0 | 30.000 |
| | Stuðul til altjóða kappingar í føroyum | 148.000 | 200.000 |
| | Stuðul til Úrvalsítrótt | 954.489 | 687.301 |
| | Stuðul til ser- og menningarsambond | 62.105 | 142.537 |
| | Fyrireiking til nýtt ÍSF hús | 100.000 | 100.000 |
| | | **1.412.194** | **1.307.438** |

# Uppskot til býti, lagt fyri aðalfundin hjá Ítróttasambandi Føroya 30. mai 2020

| | Uppskot 2020 | Býti 2019 | Býti 2018 | Býti 2017 | Býti 2016 | Býti 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fótbóltssamband Føroya** | 1.300.000 | 1.556.500 | 1.512.500 | 1.501.500 | 1.320.384 | 1.167.038 |
| **Hondbóltssamband Føroya** | 2.513.007 | 2.413.022 | 2.277.929 | 2.058.421 | 1.233.400 | 975.240 |
| **Flogbóltssamband Føroya** | 1.316.037 | 1.271.168 | 1.259.501 | 1.237.752 | 1.131.745 | 965.240 |
| **Róðrasamband Føroya** | 752.067 | 778.953 | 801.699 | 815.640 | 634.776 | 510.760 |
| **Fimleikasamband Føroya** | 1.145.239 | 1.164.575 | 1.121.689 | 1.210.553 | 821.926 | 614.600 |
| **Svimjisamband Føroya** | 1.096.061 | 1.161.386 | 986.002 | 1.044.917 | 933.768 | 799.480 |
| **Judo Føroyar** | 539.473 | 518.306 | 512.959 | 496.807 | 476.096 | 392.840 |
| **Parasport Føroyar** | 909.612 | 820.447 | 784.815 | 781.899 | 535.209 | 392.840 |
| **Badmintonsamband Føroya** | 868.311 | 864.649 | 863.381 | 857.853 | 638.987 | 510.760 |
| **Borðtennissamband Føroya** | 510.935 | 485.106 | 503.656 | 529.709 | 477.786 | 392.840 |
| **Súkkling og Triathlon** | 83.883 | 467.320 | 525.376 | 504.125 | 435.482 | 345.000 |
| **Frælsur Ítróttur Føroya** | 566.406 | 563.724 | 588.455 | 603.863 | 568.388 | 464.760 |
| **Ríðisamband Føroya** | 522.416 | 517.060 | 502.345 | 518.346 | 439.033 | 345.000 |
| **Skjótisamband Føroya** | 500.876 | 481.541 | 488.790 | 478.880 | 425.051 | 345.000 |
| **Bogaskjótisamband Føroya** | 508.418 | 496.675 | 448.358 | 442.197 | 420.170 | 345.000 |
| **Menningarsambond** | 617.258 | 589.567 | 572.544 | 567.536 | 547.799 | 454.480 |
| | **13.750.000** | **14.150.000** | **13.750.000** | **13.650.000** | **11.040.000** | **9.020.878** |

Gundadalur 2 Postsmoga 223 FO-110 Tórshavn
tel. +298 312606 fax +298 319312 isf@isf.fo www.isf.fo

FØROYAPRENT | SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705